# GERÐABÓK

**Dato:** 13. desember 2018 **Kl**. 18:00
**Stað**: Býráðssalurin
**Málsnr:** 302/18-337/18

**FUNDARLEIÐARI:**
Annika Jacobina Olsen

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**

Helena á Dam Neystabø luttók í málunum 312-332
Tróndur Sigurðsson
Halla Samuelsen
Bogi Andreasen
Annfinn Brekkstein
Jákup Dam
Marin Katrina Ragnarsdóttir Frýdal
Bjørghild Djurhuus
Gunvør Balle
Turið Horn
Bergun Kass
Bjørg Dam

**LUTTÓKU EISINI:**
Barbara Vang
Jóan Petur Hentze
Marius Muller
Sigurð Vang
Eyðfríð Jacobsen
Lars Larsen Black
David Andresen

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Bjørgfríð Ludvig

**PROTOKOLLFØRARI:**
Magnus Dam

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>13. desember 2018 | Blað nr.: 1136<br>Formansins merki: |

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**


| | | | |
|---|---|---|---|
| 302/18 | 18/00020-1 | Mál beind í nevndir 2018 | 1138 |
| 303/18 | 18/03999-2 | Góðkenna víðarisølu av matriklunum, 40ae, af, ag, ah, ai, ak, al, am. | 1140 |
| 304/18 | 18/03588-2 | Útstykking til vinnu. Umhvørvisflokkur 3 - 7 | 1142 |
| 305/18 | 18/04051-5 | Matrikulviðurskifti við Eystara ringveg. | 1147 |
| 306/18 | 18/00491-5 | Leigusáttmáli millum TK og Hagapartin Heimara Helvt, matr. nr. 210, um brúksrætt til grótbrotið í Nólsoy | 1150 |
| 307/18 | 18/04154-1 | Uppskot til samstarvsavtalu um Vinnuferðavinnu 2019-2021 | 1153 |
| 308/18 | 18/03937-1 | Flyting millum kontur á grein 3 2018 | 1156 |
| 309/18 | 17/03897-1 | Bráðfeingistørvur á dagstovnaplássum | 1159 |
| 310/18 | 18/03521-1 | Útvega fleiri dagstovnapláss | 1172 |
| 311/18 | 18/00115-5 | Uppskot um avtalu við Fjølrit um nýtslu av vardum verkum. | 1178 |
| 312/18 | 15/01400-1 | Serstøk nevnd at fyrireika nýggjan svimjihyl | 1181 |
| 313/18 | 17/01362-1 | Virknishøll í Finsen | 1190 |
| 314/18 | 18/01726-4 | Umstøðurnar kring tennisøkið í Gundadali | 1193 |
| 315/18 | 16/01715-2 | Avtala við Ítróttasamband Føroya um ÍSF-húsið vm. | 1196 |
| 316/18 | 15/03637-1 | Kloakk á Signabø | 1202 |
| 317/18 | 18/04024-1 | Áheitan um setan av 4. parkeringsansara | 1204 |
| 318/18 | 16/04381-1 | Kommunan tekur ábyrgd, handfaring av burturkasti | 1207 |
| 319/18 | 14/05065-1 | Miðbýarætlan - Steinatún | 1212 |
| 320/18 | 17/02247-1 | Gøtan kring Havnina og fiskastykkið | 1219 |
| 321/18 | 18/01264-2 | Føroya Ríðingarfelag : Umsókn um trøðna matr. nr. 1156, Tórshavn | 1226 |
| 322/18 | 18/03670-2 | Nýggj serstøk byggisamtykt fyri íbúðarbygging á matr. nr. 877m við Dalastíg, Tórshavn | 1229 |
| 323/18 | 18/00982-1 | Skógfriðing | 1231 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 324/18 | 18/01173-1 | Nýggj serstøk byggisamtykt við Dalavegin, matr. nr. 864a, Tórshavn | 1237 |
| 325/18 | 18/01811-1 | Skipan av økinum omanfyri Marknagilsvegin og undir Fjalli | 1244 |
| 326/18 | 18/03140-1 | Broyting av serstøku byggisamtyktini fyri Marknagil | 1248 |
| 327/18 | 18/04108-2 | Broyting av almennu byggisamtyktini fyri matr. nr. 139b, Hoyvík, frá B8 til B7 | 1251 |
| 328/18 | 16/04362-1 | Kloakk í Villingardalsvegnum í samband við nýggja fjarhitaleiðing. | 1254 |
| 329/18 | 17/03303-2 | Hugskot/uppskot um nýtslu av tilfari úr Sandoyartunlinum. | 1256 |
| 330/18 | 18/04155-1 | Tøkur peningur 2018 | 1261 |
| 331/18 | 18/00018-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2018 | 1263 |
| 332/18 | 18/03968-1 | Ásetan av fundardøgum fyri býráðið 2019 | 1266 |
| 333/18 | 16/03105-2 | Dagføring av høvuðskloakkleiðing frá Sandvíkarhjalla | 1267 |
| 334/18 | 16/00407-3 | Graslíki á komandi fótbóltsvøll í Hoyvík - "Hoyvíksvøllur" | 1269 |
| 335/18 | 14/04763-136 | Umsókn um stuðul til umvæling av Tórshavnar ítróttar- og samkomuhøll - skeyti 1386 - ymiskt tilfar í eini kassettu (1999-0345) | 1277 |
| 336/18 | 18/04158-1 | Kunning / fráboðanir í 2018 til býráðið | 1299 |
| 337/18 | 18/04175-1 | Litir í Leiki í Skúlanum við Løgmannabreyt, blásiljóðføri | 1300 |

***<u>302/18 Mál beind í nevndir 2018</u>***

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 25.01.2018 | 7/18 | 18/00020-1 |
| 2 Býráðsfundur | 01.03.2018 | 30/18 | 18/00020-1 |
| 3 Býráðsfundur | 22.03.2018 | 50/18 | 18/00020-1 |
| 4 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 70/18 | 18/00020-1 |
| 5 Býráðsfundur | 24.05.2018 | 110/18 | 18/00020-1 |
| 6 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 138/18 | 18/00020-1 |
| 7 Býráðsfundur | 30.08.2018 | 180/18 | 18/00020-1 |
| 8 Býráðsfundur | 27.09.2018 | 203/18 | 18/00020-1 |
| 9 Býráðsfundur | 25.10.2018 | 233/18 | 18/00020-1 |
| 10 Býráðsfundur | 29.11.2018 | 261/18 | 18/00020-1 |
| 11 Býráðsfundur | 13.12.2018 | 302/18 | 18/00020-1 |

**Býráðsfundur 25. januar 2018:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 01. mars 2018:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 22. mars 2018:** Einmælt samtykt

**Býráðsfundur 22. mars 2018:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 24. mai 2018:** Einmælt samtykt

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 30. august 2018:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 27. september 2018:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 25. oktober 2018:** Einmælt samtykt.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>13. desember 2018 | Blað nr.: 1139 |
| | | Formansins merki: |

**Býráðsfundur 29. november 2018:** Einmælt samtykt

**Býráðsfundur 13. desember 2018:** Einmælt samtykt.

# 303/18 Góðkenna víðarisølu av matriklunum, 40ae, af, ag, ah, ai, ak, al, am.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 28.11.2018 | 326/18 | 18/03999-2 |
| 2 Býráðsfundur | 13.12.2018 | 303/18 | 18/03999-2 |

**Upprunin til málið:** Umsókn frá advokati.

**Lýsing av málinum – samandráttur**

Umsókn fyriliggur frá advokati, sum vegna Jóan Petur Vang Sp/,f heitir á kommununa um at góðkenna víðarisølu av einari lon á 8 grundstykkir, hóast húsini ikki eru liðugt bygd.

Ætlanin er at selja matriklarnar 40ae og 40am sum óbygd grundstykki, og matr. nr.40af, ag, ah, ai, ak, og al sum innilokaði sambygd hús.

Hesi 6 sambygdu húsini verða seld óinnrættað, men verður alt uttandura – og facadu arbeiði liðugt gjørt.

Sambært skeytisásetingunum, grein 3, kann ognin ikki uttan góðkenning frá Tórshavnar kommunu verða seld víðari, uttan sum grundstykki við ástandandi sambygdum húsum.

Sambært skeytisásetingunum, grein 1, skal øll bygging á staðnum verða liðug innan 1. oktober 2019.

Advokatur umsøkjarans upplýsir, at keyparar og seljari av matr.nr. 40ae og 40am í samband við søluna vátta skrivliga, at ognirnar verða liðugt bygdar innan 1. oktober 2019. Upplýst verður, at betongarbeiðið er komið væl áleiðis,v og at húsini verða innilokað innan ársskitið 2018/19.

Upplýst verður somuleiðis viðvíkjandi matr. nr. 40af, ag, ah, ai, ak, og al, at betongarbeiðið er komið væl áleiðis. Allir betongveggir eru komnir upp, og gólv verður stoypt í næstum. Eftir ætlan verður alt betongarbeiðið liðugt innan ársskiftið 2018/19.

Samlaða verkætlanin hjá felagnum umfatar 4 lonir á 8 sambygd hús, ella í alt 32 eindir.

Felagið hevur bygt lon 1, 2 og 4 við tilsamans 24 sambygdum húsum, og sostatt restar bert lon 3, ið sambært skeytinum skal verða liðug innan 1. oktober 2019.

Av tí at arbeiðið er komið so mikið væl áleiðis, og útlit eru til, at øll húsini í lon 3 verða liðugtgjørd innan ta í skeytinum ásettu freistina, verður mett, at kommunan kann víkja frá ásetingini um, at ognirnar ikki kunnu seljast víðari, fyrenn liðugt bygd sambygd hús eru bygd á grundøkið.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/læettar frá ásetingum.**

**Umhvørvisárin. Ongi.**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl.** Umsókn frá advokati, við váttanum. Kortskjal. Uppruna skeyti við servituttásetingum.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís øki í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á Stjórnarskrivstovuni mæla til at góðkenna víðarisølu av ognunum **40ae, af, ag, ah, ai, ak, al og am, Kirkjubøur/Argir undir teirri fortreyt, at allir servituttir verða óbroyttir galdandi.**

**Fíggjarnevndin 28. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 13. desember 2018:** Einmælt samtykt.

| | Býráðsfundur<br>13. desember 2018 | Blað nr.: 1142<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

# 304/18 Útstykking til vinnu. Umhvørvisflokkur 3 - 7

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 05.11.2018 | 42/18 | 18/03588-2 |
| 2 Tekniska nevnd | 27.11.2018 | 72/18 | 18/03588-2 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2018 | 260/18 | 18/03588-2 |
| 4 Fíggjarnevndin | 05.12.2018 | 343/18 | 18/03588-2 |
| 5 Býráðsfundur | 13.12.2018 | 304/18 | 18/03588-2 |

**Upprunin til málið:** Mangul upp á vinnugrundstykkir. Umhvørvisflokkur 3 – 7.

**Lýsing av málinum – samandráttur.**
Í løtuni hevur kommunan ongi vinnustykkir á sølulista. Øll stykkini á Skarðshjalla eru seld/umbiðin tó við undantaki av stykkjunum, sum verða brúkt til go-kartvirksemi.

Umframt at áhugin fyri vinnustykkjum á Skarðshjalla er stórur, hevur kommunan í løtuni ítøkiligar fyrispurningar frá trimum áhugaðum keyparum.

Viðmerkjast kann eisini, at av innasta vinnuøkinum Skarðshjalla eru umleið 12.000 m² lýstir til sølu undir einum til vinnuendamál, og tískil eru møguleikarnir fyri at menna hetta økið sum vinnuútstykking avmarkaðir.

Kommunan hevur arbeitt við einari vinnuútstykking á Velbastaðvegnum, men hevur onki lendið tøkt til ætlanina. Samráðingar hava verið við privatu eigararnar um keyp av lendi, men er onki úrslit komið burtur úr. Onkrir av hesum eigarum hava ikki áhuga í at selja, og fæst lendi ikki til keyps til ein nøktandi prís.

Kommunan hevur eisini arbeitt við eini verkætlan Á Ovara Hjalla, sum millum annað umfataði bygging av eini felags brennistøð innast á hesum økinum.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla til, at Vinnunevndin umrøður tørvin á nýggjum vinnugrundøkjum í kommununi og beinir málið í byggi- og býarskipanarnevndina við atliti til at vísa á staðseting av øki til nýggja vinnuútstykking.

**Vinnunevndin 05. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og eisini at heita á byggi- og býarskipanarnevndina um at kanna møguleikarnar at fáa vinnustykkir úti í grótbrotinum á Glyvursnesi. Helena Dam á Neystabø var ikki við til hetta málið.

**Ískoyti:**
Tørvur er á fleiri vinnustykkjum í kommununi, og hevur umsitingin tí hugt eftir, hvørjir møguleikar eru í sambandi við at staðseta nýggj vinnuøkir, umframt hvar ber til at víðka um verandi vinnuvirksemi. Talan er í fyrstu atløgu um vinnuøkir til virkir, sum verða flokkað eftir stig 4-6 í umhvørvisflokkingini av virkjum í Tórshavnar kommunu. Ásetingar eru í stig 4-6 um, at fjarstøða millum virkir og bústaðir skal vera millum ávikavist 100-300 metrar, soleiðis at bústaðarøki ikki hevur ampa av virkjum og virksemi teirra.

Býarskipanarliga er í fyrstu atløgu skilabest at víðka um verandi vinnuøkir, áðrenn farið verður undir at staðseta nýggj økir, hetta fyri at gagnnýta lendið og savna virksemið á einum stað, umframt at infrakervi, leiðingar v.m. longu er á staðnum. Víst verður á, hvar til ber at víðka um verandi vinnuøkir, hvar nýggj vinnuøkir møguliga kunnu staðsetast, sí kortskjalið *Vinnuøkir - nýggj og víðkan av verandi*:

*Í Vika, við gamla Velbastaðvegin*
Matriklarnir 1092 og 1079 eru partur av verandi vinnuøki í Vika, og er eyðsætt at víðka um hetta økið. Matriklarnir liggja somuleiðis í umráðisparti B3 í 3. grundumráði í byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, og er økið ætlað bygningum til smá vinnuvirki, verkstaðir og tílíkt og tænastuvirksemi, ið hava samband við hesi. Matriklarnir eru privat ogn, og tí er neyðugt, at kommunan ognar sær hesar matriklarnar..

*Skarðshjalli og Ovari hjalli*
Samtykt er at staðseta nýtt biogass anlegg innast á Skarðshjalla. Eitt grundstykki er eftir, men skal hetta vera tøkt til møguligar útbyggingar av biogass anlegginum ella líknandi virksemi. Í sambandi við ynskið at byggja nýggja brennistøð, verður víst á økið omanfyri á Hjalla sum eina eyðsædda nýggja vinnuútstykking, tí hetta longu er eitt vinnuøki í dag.

Økið er partur av matr. nr. 139a, og er neyðugt hjá kommununi at ogna sær lendið til endamálið. Økið liggur í umráðisparti B8 í 3. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, og er økið ætlað bygningum til vinnuvirkir, her undir umsitingar- og tænastuvirki, verksmiðjur, goymslur og tílíkt, ið hevur samband við hesi.

Uppskot til skipan av økinum er teknað, har víst verður á, at fleiri vinnustykkir fáast burtur úr økinum við at flyta ætlaða vegin, sum Tunnilsfelagið skal gera, longur út á hamarin. Tunnilsfelagið hevur víst á, at einki er til hindurs fyri at flyta vegin, so leingi ongar fíggjarligar avleiðingar eru fyri felagið. HMP hevur síðani hugt eftir vegalinjuni, og er talan um ein meirkostnað áleið 3,5 mió. kr., um vegurin skal flytast.

*Stóratjørn*
Skjøtul er settur á málið um at fara undir at skipa og býarmenna økið við Stórutjørn. Í sambandi við gerð av nýggjum skipanaruppskoti skal eitt nýtt vinnuøki gerast partur av hesum uppskotinum. Talan er um eina størri verkætlan at skipa økið, og skal kommunan í hesum sambandi ogna sær lendið til ætlanina.

*Við Oyggjarvegin*
Fram við oyggjarvegnum eru nøkur virki, sum liggja í umráðisparti B4 í 3. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Økið omanfyri liggur í 4. grundumráði, men til ber at gera fleiri vinnustykkir sum framhald av verandi vinnuøki, ið er har í dag. Kommunan má somuleiðis ogna sær lendið til endamálið.

*Velbastað*
Sambært almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu liggur bryggjaríið Okkara einsamalt í einum avmarkaðum vinnuøki. Ásetingin fevnir um bygningin og uttanumøkið, men hugsandi er, at hetta økið kundi víðkast og rúma fleiri vinnubygningum. Ein møguleiki hevði verið at gagnnýtt grótið úr Sandstunlinum til at víðka um verandi vinnustykkið á Velbastað, tó skal ein hava í huga, at landslagið er óbygt og órørt, av tí sama gerst útsýnið heilt serstakt, tá koyrt verður til Velbastaðar og Kirkjubøar. Økið er partur av matr. 51a, og má kommunan tí ogna sær lendið til endamálið.

*Gamlarætt*
Gamlarætt liggur sum eitt sár í landslagnum, og tískil er eyðsætt at nýta økið til vinnuligt virksemi. Við nýggja Sandstunlinum verður virksemið á økinum møguliga broytt nakað, og tí er hugsandi at nýtt virksemi kann setast í verk á økinum. Harumframt eru góðir møguleikar at víðka um møguligt virksemi við at gagnnýta grótið úr Sandstunlinum og víðka økið út á sjógv. Økið á Gomlurætt er ogn hjá landinum, og má kommunan tí ogna sær økið.

*Grótbrotið á Glyvursnesi*
Økið úti á Glyvursnesi er partur av eini framtíðar visjón, har ynski er at byggja nýggjan flogvøll. Um hetta gerst til eina ítøkiliga ætlan, so verður talan um ein nýggjan portal til ferðandi, sum koma til landið. Fleiri flogvøllir úti í heimi liggja ikki í nøkrum vøkrum umhvørvi, men er talan um eina ítøkiliga ætlan, so átti ein nýggjur portalur verið hugsaður sum ein atraktión, eins og virksemi og umhvørvið rundanum varð ein partur av hesum.

Upp at grótbrotinum er eitt stórt D2 øki lagt av til nýggjan golfvøll. Umráðisparturin D2 er ætlaður ítrótti og øðrum, sum eftir eini heildarætlan fyri alt økið ella ein part av økinum kann virka saman við ítróttinum. Nógvir møguleikar eru við grótbrotinum á Glyvursnesi, og eru fleiri góð dømi um grótbrot, sum verða umskapað til vøkur rekreativ øki, ið hóska sera væl saman við ítróttarvirksemi.

Við eini ætlan um nýggjan flogvøll og frítíðarvirksemi er eyðsæð, at økið úti á Glyvursnesi í framtíðini kann gerast til ein ítróttar- og mentanardepil, har ferðavinnan somuleiðis gerst partur av hesum. Í hesum sambandi tykist tilvildarligt at staðseta eitt vinnuøki í økinum, sum kann føra við sær nógva og tunga ferðslu. Eitt vinnuøki er vanliga ikki nøkur vøkur sjón, og tá fleiri aðrir møguleikar eru at staðseta nýggj vinnuøki og víðka um verandi, verður mælt til at arbeiða við øðrum loysnum fyrst.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Umhvørvisflokking av virkjum í Tórshavnar kommunu, sí skjalið við sama heiti.

*Flokkur 4*
Minsta frástøða – 100 m
Matvøruframleiðsla, bilverkstaðir við og uttan sproytukabinu.

*Flokkur 5*
Minsta frástøða – 150 m
Maskinverkstaðir, betongvirkir, sláturvirkir.

*Flokkur 6*
Minsta frástøða – 300 m
Størri maskinvirkir, betongvirkir, sláturvirkir, asfaltvirkir.

**Skjøl:/**
*Vinnustykkir - nýggj og víðkan av verandi,* journal nr. 18/03588-4.
*Umhvørvisflokking av virkjum í Tórshavnar kommunu*, journal nr. 14/04489-2.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til, at umsitingin fer undir at kanna møguleikarnar at keypa lendið til at víðka um vinnuøki í Vika, og at heimila umsitingini at arbeiða víðari við framtíðar vinnuútstykkingum á Ovara Hjalla, at heimila umsitingini at byrja at gera ítøkiligar ætlanir fyri raðfestu økini fyri síðani at venda aftur í nevndina við ávegis uppskotum fyri útstykkingarætlanir, og at beina málið í býráðið umvegis og fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 27. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 05. desember 2018:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

Gunvør Balle luttók ikki í viðgerðini, tí hon var ógegnig. Marin Katrina luttók í viðgerðini sum varalimur hennara.

**Býráðsfundur 13. desember 2018:** Samtykt við 9 atkvøðum fyri, ongari í móti og tveimum blonkum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus og Bjørg Dam

Blankt atkvøddu: Annfinn Brekkstein og Halla Samuelsen.

Gunvør Balle luttók ikki í viðgerðini tí hon var ógegnig.

# 305/18 Matrikulviðurskifti við Eystara ringveg.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 27.11.2018 | 70/18 | 18/04051-5 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2018 | 267/18 | 18/04051-5 |
| 3 Fíggjarnevndin | 05.12.2018 | 342/18 | 18/04051-5 |
| 4 Býráðsfundur | 13.12.2018 | 305/18 | 18/04051-5 |

**Upprunin til málið:**
Talan er um matrikulviðurskifti, frá tá ið Eystari Ringvegur varð gjørdur fyrst í 1980unum, sum ongantíð eru avgreidd.

**Lýsing av málinum – samandráttur.**
Matrikulviðurskiftini á vegamótinum Eystari Ringvegur og Hvítanesvegur eru ikki avgreidd, hóast vegurin var gjørdur uml. 1980.

Mælt verður til at rudda upp í hesum, soleiðis at vegur við vegkanti kemur at liggja sum kommunal ogn. Vegurin liggur í dag partvís inni á matr. nr. 1337, sum er privatogn og á matr.nr. 1333a, sum eisini er privatogn.

Kommunan hevur havt samráðingar við hesar privatu eigararnar, sum eisini ynskja at viðurskiftini verða greidd.

Marknaumskipast skal soleiðis :
- Privatur eigari. matr. nr. 1337 letur 155 $m^2$ til Litra eh.
- Tórshavnar kommuna letur 729 $m^2$, av litra eh, til matr.nr. 1337, privatur eigari.
- Privatur eigari. Matr 1333a, letur 2.293 $m^2$, til Tórshavnar kommunu, harav kommunan letur 136 $m^2$, til matr.nr. 1337, og verður restin 2.157 útlagt til veg, litra eh.

**viðv. matr. nr. 1333a.**
Kommunan gjørdi í 1979 eina makaskiftisavtalu við táverandi eigaran av matr.nr. 1333a, sum umfataði at matrikulin 1333a varð víðkaður eystureftir, og at økið til vegin skuldi frámatrikulerast til veg. Hetta er eisini tinglýst sum servituttur í skeytið. Av onkrari orsøk, hevur man ikki avgreitt málið liðugt, og liggur vegurin framvegis sum partur av matr.nr. 1.333a.

**Viðv. matr. nr. 1337.**
Í sambandi við somu vegagerð, hevur kommunan avtalað ymisk viðurskifti við táverandi eigara av matr.nr. 1337.

Hetta framgongur í skrivum, sum kommunan hevur sent táverandi eigara hin 27. mars 1980, "sí tekning. 129-1,129-11 og 129-12, at tað bert er ein lítil partur av hesum vegi, ið kemur at nerva ognina og førir hetta tí ikki við sær krav um endurgjald fyri mista jørð. Semja var um, at hegn verður sett upp í ytra borði av tí parti av vegnum fram við ogn tygara, ið er útlagdur til gongubreyt ella rabat, og at tann parturin av Hoydalsvegi ið kemur at liggja innanfyri hettar hegn, verður lagt afturat ognini, tó soleiðis, at áðrenn hegn verður sett upp verður mold koyrd á og sáa, so bøur fast úr hesum vegapetti.
Har skráin sunnan fyri ogn tygara vil koma ov langt oman í bøin, varð semja um at býarverkfrøðingurin syrgir fyri at stuðlamúrur verður laðaður so skráin verður styttri,

somuleiðis verður innkoyringin frá Hoydalsvegnum til ogn tygara gjørd uppá ein høgligan hátt, og verður liggjandi har hon er".

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í umráðspartinum B4 og D1 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavn.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Onki mál sum hevur týdning

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Onki frávik

**Umhvørvisárin**
Er viðgjørt eftir umhvørvisstigi 1

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Ongar viðmerkingar

**Skjøl.**
Sí kortskjøl fyri vegamótið Hvítanesvegur Eystari Ringvegur, 18/04051-6.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**
Tórshavnar kommuna skal gjalda fyri matrikuleringina til Umhvørvisstovuna.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á byggideildini mæla til at viðmæla marknaumskipanina, soleiðis at vegurin við vegkanti kemur at liggja sum kommunal ogn og at beina málið í fíggjarnevndina umvegis byggi- og býarskipanarnevndina.

**Tekniska nevnd 27. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 05. desember 2018:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 13. desember 2018:** Einmælt samtykt.

# 306/18 Leigusáttmáli millum TK og Hagapartin Heimara Helvt, matr. nr. 210, um brúksrætt til grótbrotið í Nólsoy

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 14.11.2018 | 309/18 | 18/00491-5 |
| 2 Býráðsfundur | 13.12.2018 | 306/18 | 18/00491-5 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Grótbrot í Nólsoy**

14. juni 2001 er sáttmáli gjørdur millum Nólsoyar kommunu og hagapartin Heimara Helvt, um veitan av gróti til grótkast. Henda avtala verður mett ikki at galda longur. Grótkastið er liðugt og uml. 4.500 m³ av leysum samfingnum gróti at nýta til vegir, bygging og planering liggur eftir í brotinum. Friðingarmyndugleikin gav loyvi at taka grót og skuldi brotið skipast soleiðis, at sum minst sást uttanífrá til benið í lendinum.

Tórshavnar kommuna arbeiðir við ætlanum fyri útstykkingum og vegagerð í Nólsoy og verður við hesum tørvur á gróti til vegagerð og planeringar, øki til burturbeining/tyrving av avgrevstri, mold, leiri v.m., og øki til kommunalt tekniskt fráleggingarpláss av tilfari, rørum, sandi, skervi, gróti v.m.

Skotið verður upp, at kommunan ger avtalu við eigararnar fyri hagapartin heimara Helvt um:

1.at keypa verandi brot og uml. 2000 m² aftrat suðureftir til at bróta grót úr
2. um ikki ber til at keypa so at gera leiguavtalu um sama
3. at økið kann skipast sum omanfyristandandi
4. at kommunan arbeiðir við at fríðka um verandi brot, og við tíðini fáa grasað teir partar, sum eru tyrvdir.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
**T**ekniska fyrisiting brúkar økið..

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til í fyrsta lagi at taka undir við pkt. 1, at keypa lendi frá hagapartinum Heimara Helvt, og annars sum skotið er upp. Síðani at beina málið til fíggjarnevdina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 31. mars 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. apríl 2008:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

Tórshavnar kommuna hevur roynt at fingið eina avtalu í lag, sum skotið upp undir pkt. 1. Hagastýrið fyri hagapartin Heimara Helvt í Nólsoy er ikki sinnað at selja lendið, og eru teir heldur ikki, sum nú er, sinnaðir at gera eina avtalu um at bróta meiri grót úr verandi grótbroti.

Hagastýrið er sinnað at gera eina sáttmála, sum skotið upp undir pkt. 2, har Tórshavnar kommuna fær rætt til at nýta grótbrotið til fráleggingartilfar av ymsum slag fyri kr. 4.000 um árið.

Hagastýrið er harumframt sinnað at selja Tórshavnar kommunu 4.500 m³ av leysum gróti fyri 3 kr. pr. m³, sum í dag liggur í grótbrotinum.

Sambært teknisku umsitingini nøktar mongdin av gróti tørvin í sambandi við útstykkingarnar o.a, sum liggja fyri framman.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir til, at nevndin tekur undir við uppskotinum til sáttmála.

**Fíggjarnevndin 2. september 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 11. september 2008:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Sáttmálin var galdandi í 10 ár  og gekk út í september 2018.
Kommunan ynskir at leingja sáttmálan, tí brúk er fyri grótbrotinum - bæði til at goyma skerv o.a. í og í sambandi við nýggju útstykkingina. Árliga leigan, sambært sáttmálanum undirskrivaður í september 2008, fyri nýtslu av økinum, er 4000 kr.
Hagastýrið ynskir hægri leigu, at leigan hækkar frá 4000 kr. árliga, til 6000 kr. árliga.
**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla til at leingja sáttmálan við 5 árum og at leigan verður 6000 kr. árliga, at rinda av konto 6111 “leiga av økjum”.

**Fíggjarnevndin 14. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og leingja sáttmálan við 5 árum við einari árligari leigu áljóðandi kr. 6000 árliga at rinda av konto 6111, leiga av økjum.

**Býráðsfundur 13. desember 2018:** Einmælt samtykt.

| | Býráðsfundur<br>13. desember 2018 | Blað nr.: 1153 |
|---|---|---|
| | | Formansins merki: |

# 307/18 Uppskot til samstarvsavtalu um Vinnuferðavinnu 2019-2021

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 26.11.2018 | 54/18 | 18/04154-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 05.12.2018 | 346/18 | 18/04154-1 |
| 3 Býráðsfundur | 13.12.2018 | 307/18 | 18/04154-1 |

**Upprunin til málið:**
Seinastu árini er áhugin fyri at ferðast í Føroyum og í Tórshavn vaksin nógv. Eisini áhugin fyri at halda ráðstevnur og tílíkt er vaksin. Tórshavnar kommuna hevur stuðlað arbeiðinum við at fáa fleiri ráðstevnur til býin við peningi til marknaðarføring, starvsfólk og móttøkur.

**Lýsing av málinum – samandráttur**

Vinnuferðavinna svara til MICE-ferðavinnu.
**M** stendur fyri: Meetings ella fundir
**I** stendur fyri: Incentives ella virkisferðir, sum fyritøkur lata starvsfólkum ella samstarvsfeløgum
**C** stendur fyri: Conferences ella ráðstevnur
**E** stendur fyri: Events ella størri tiltøk, t.d. í ítrótti, tónleiki ella øðrum

Sjálvt um vinnuferðavinna er fyri alt landið, so er tað fyrst og fremst í Tórshavn, at vinnuferðavinnu-tiltøkini verða hildin, tí tað er her, ið ráðstevnuhølir og gistingarmøguleikar eru.

Í næstum verða áleið 300 fleiri kømur á hotellum í Tórshavnar kommunu, og hetta ger, at møguleikarnir við vinnuferðavinnu gerast nógv størri, enn teir fyrr hava verið – so her liggur ein stórur møguleiki fyri Tórshavn.

Í 2018 vórðu kr. 900.000 settar av til endamálið:
Kr. 200.000 vóru fluttar til netverkið fyri vinnuferðavinnu. Í netverkinum eru Visit Faroe Islands, Visit Tórshavn og privata vinnan, og peningurin verður nýttur til marknaðarføring.
Kr. 300.000 vórðu settar av til at seta 0,5 starvsfólk, men tíverri segði viðkomandi seg úr starvi, og tí er meginparturin av peninginum ikki nýttur.
Kr. 400.000 vórðu settar av til móttøkur í sambandi við størri ráðstevnur.

Mælt verður til at fáa eina avtalu um samstarv millum Visit Tórshavn, Tórshavnar kommunu og Visit Faroe Islands. Tað tekur fleiri ár at fáa størri vinnuferðavinnutiltøk til landið, og nógv fyrireiking skal til, og tískil er tað av stórum týdningi at gera eina langtíðarætlan og eisini at hugsa um, at avrikið kemur seinni. Tí verður lagt upp til, at samstarvsavtalan er galdandi í 3 ár, 2019-2021.

Mett verður, at neyðugt er at seta meira pening av til endamálið. Visit Faroe Islands hevur upplýst, at tey nýta umleið kr. 2 mió. um árið til endamálið. Mælt verður til, at Tórshavnar kommuna nýtir umleið somu upphædd.

Uppskot til raðfesting fyri 2019:

| | Kr. í 2019 |
|---|---|
| Starvfólk | 800.000 |
| Móttøkur v.m. | 500.000 |

| | |
|---|---|
| Stuðul til ráðstevnur | 300.000 |
| Marknaðarføring | 400.000 |

Kr. 800.000 ljóðar sum ein stór upphædd til eitt starvsfólk, men nógv ferðing er í starvinum, og tað er kostnaðarmikið at luttaka á fleiri ráðstevnum við ymiskum vinnuferðavinnu-tiltøkum. Í 2018 hevur kommunan nýtt knapt 400.000 kr. til móttøkur í sambandi við ráðstevnur. Mett verður, at hesin eftirspurningurin eftir móttøkum fer at vaksa í framtíðini, bæði tí fleiri ráðstevnur vónandi fara at vera, og tí tað verður almenn vitan, at søkjast kann um henda stuðul. Harumframt verður mælt til, at peningurin eisini verður nýttur til at "lata býin í".
Í øðrum londum er vanligt, at fyrireikarar av størri ráðstevnum verða stuðlaðir, tí tað er ein stór og kostnaðarmikil uppgáva at fyrireika ráðstevnur.

Upphæddin til starvsfólk verður latin Visit Tórshavn. Tey seta eitt starvsfólk og bera útreiðslurnar í sambandi við tað. Upphæddin til móttøkur o.t. verður umsitin av Stjórnarskrivstovuni eftir "reglugerð fyri vinnuferðavinnu". Upphæddin til stuðul til ráðstevnur verður saman við upphæddini til móttøkur umsitin av umsitingini í Tórshavnar kommunu.
Upphæddin til marknaðarføring verður umsitin av netverkinum á Visit Faroe Islands, har Visit Tórshavn eisini luttekur.

Visit Faroe Islands og Visit Tórshavn er samd um, at fyri at fáa samstarvið at rigga og sýnast sum ein professjonel eind úteftir, mugu starvsfólkið hjá Visit Faroe Islands og starvsfólkið frá Visit Tórshavn sita saman. Báðir stovnarnir mæla til, at tey sita á Visit Faroe Islands, tí har er marknaðarføringarumhvørvið, og tað starvsfólkið, sum hevur arbeitt við vinnuferðavinnu inntil nú, arbeiðir á Visit Faroe Islands. Tað er ongin ivi um, at vinnuferðavinnuøkið kemur at ávirka menningina av Visit Tórshavn jaliga, og tí má tryggjast, at vinnuferðavinnu-starvsfólkið hevur tætt tilknýti til Visit Tórshavn, sjálvt um tað situr á Visit Faroe Islands.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís øki í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | x | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | x | | | x |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir vinnunevndini til at taka undir við

- uppskoti um avtalu við Visit Faroe Islands, galdandi í 2019-2021 og
- uppskoti um játtan til vinnuferðavinnu fyri 2019-2021 og uppskoti til raðfesting, og at tað verður goldið av konto 7710 Ferðavinnan

og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Vinnunevndin 26. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 05. desember 2018:** Samtykt at taka undir við vinnunevndini og beina málið í býráðið.

Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 13. desember 2018:** Einmælt samtykt.

# 308/18 Flyting millum kontur á grein 3 2018

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 07.11.2018 | 324/18 | 18/03937-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 14.11.2018 | 313/18 | 18/03937-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 28.11.2018 | 345/18 | 18/03937-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 28.11.2018 | 330/18 | 18/03937-1 |
| 5 Býráðsfundur | 29.11.2018 | 268/18 | 18/03937-1 |
| 6 Býráðsfundur | 13.12.2018 | 308/18 | 18/03937-1 |

**Upprunin til málið:**
Afturhildnar lønarútreiðslur í sambandi við verkfallið á dagstovnaøkinum.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í sambandi við verkfallið á dagstovnaøkinum vórðu fyri 2018 afturhildnar í lønum kr. 4,135 mió og fyribils sett á reguleringskontu 3199.
Fyrisitingin mælir til, at hesar verða fluttar út á kontur á grein 3 eftir fylgjandi uppskoti:
Konta 3111 Miðstovnurin (Realskúlin og Hornabø) kr. 1,3 mió
Konta 3214 Broytingar og minni umvælingar kr. 0,3 mió
Konta 3175 Barnaansing (løgur) kr. 2,5 mió
Niðanfyri verður hetta lýst.

**Konta 3111 Miðstovnurin**
Við ársenda 2016 hevði rakstrarstaðið eina minninýtslu, men í fjør og í ár eru stórar broytingar farnar fram í virkseminum. Í fjør varð dagstovnavirksemið í Hornabø skipað undir hesum rakstrarstað, og í ár er dagstovnavirksemi skipað í realskúlanum. Rakstrarstaðið ber eina meirnýtslu frá 2017 uppá uml. kr. 740.000, og henda meirnýtsla er pr. oktober 2018 vaksin til uml. 1,6 mió.

Samlaða virksemið í ár hevur í stóran mun verið merkt av uppstartsfasu í tveimum støðum við nógvum eyka innkoyringarútreiðslum bæði í mun til lønir (meirnýtslan pr. oktober er 560.000) og keyp av vørum og tænastum (meirnýtslan pr. oktober er kr. 228.000), har talan í stórum er um nýútvegan av barnavognum, etablering av spæliplássi v.m.

Rakstrarstaðið fær fult barnatal um ársskiftið og hevur pr. oktober minniinntøkur av foreldragjaldi uppá uml. kr. 50.000. Við støði í staðfestu foreldragjøldnum fyri november tykist hetta tó at javna seg við ársenda.

Væntað verður, at rakstrarstaðið í 2018 fer at hava stabilt virksemi, ið skuldi gagna fíggjarstýringini.

**Konta 3214 Broytingar og minni umvælingar**
Vaksandi barnatalið hevur við sær tørv á smærri broytingum á ávísum stovnum umframt keyp av útgerð/innbúgvi. Ætlan er, at kr. 100.000 fara til ávísar nýutveganir á vøggustovuni Stella Maris.

**Konta 3175 Barnaansing (løgur)**
Sum kunnugt fyrireikar kommunan at útvega nýggj dagstovnaplássum við modulbygging. Uppæddin er ískoyti til tað.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at flyta kr. 4,1 mió av kontu 3199 Regulering barnatal soleiðis,

- kr. 1,3 mió verður flutt á kontu 3111 Miðstovnurin (flyting millum undirkontur á somu høvuðskontu),
- kr. 0,3 mió á kontu 3214 Broytingar og minni umvælingar at beina í fíggjarnevndina (flyting millum høvuðskontur)
- kr. 2,5 mió á kontu 3175 Barnaansing (løgur) at beina í býráðið um fíggjarnevndina (er eykajáttan).

**Mentamálanevndin 07. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og játta kr. 1,3 mió av kontu 3199 til kontu 3111 Miðstovnin.

Harumframt samtykt at taka undir við tilmælinum at játta kr. 0,3 mió av kontu 3199 til kontu 3214 Broytingar og minni umvælingar og beina málið í fíggjarnevndina. Eisini samtykt at taka undir við tilmælinum at játta kr. 2,5 mió av kontu 3199 til kontu 3175 Barnaansing (løgur) og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 14. november 2018:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini, og harumframt samtykt at játta 0,3 mió. Kr. Av konto 3199 til konto 3214 og at játta kr. 2,5 mió. av kontu 3199 til kontu 3175 Barnaansing (løgur) og at beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Ískoyti:**
Víst verður til mál 17/03897 Bráðfeingistørvur á dagstovnaplássum og tilmælið omanfyri um at játta kr. 2,5 mió á kontu 3175 Barnaansing (íløgur). Í hesum sambandi verður skotið upp, at fíggingin kr. 2,5 mió verður játtað inn á kontu 3175 løgukonta L31009 Tillagingar av dagstovnum, har fíggjartørvur er.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at játta nevndu kr. 2,5 mió á kontu 3175 L31009 Tillaging av dagstovnum.

**Mentamálanevndin 28. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 28. november 2018:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 29. november 2018:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 13. desember 2018:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

# 309/18 Bráðfeingistørvur á dagstovnaplássum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 29.11.2017 | 306/17 | 17/03897-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 10.01.2018 | 2/18 | 17/03897-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 22.01.2018 | 36/18 | 17/03897-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 23.01.2018 | 29/18 | 17/03897-1 |
| 5 Býráðsfundur | 25.01.2018 | 18/18 | 17/03897-1 |
| 6 Mentamálanevndin | 23.04.2018 | 149/18 | 17/03897-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 24.04.2018 | 129/18 | 17/03897-1 |
| 8 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 83/18 | 17/03897-1 |
| 9 Mentamálanevndin | 06.06.2018 | 185/18 | 17/03897-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 13.06.2018 | 177/18 | 17/03897-1 |
| 11 Mentamálanevndin | 18.06.2018 | 206/18 | 17/03897-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 20.06.2018 | 204/18 | 17/03897-1 |
| 13 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 148/18 | 17/03897-1 |
| 14 Býráðsfundur | 30.08.2018 | 192/18 | 17/03897-1 |
| 15 Mentamálanevndin | 28.11.2018 | 343/18 | 17/03897-1 |
| 16 Fíggjarnevndin | 28.11.2018 | 329/18 | 17/03897-1 |
| 17 Býráðsfundur | 29.11.2018 | 267/18 | 17/03897-1 |
| 18 Býráðsfundur | 13.12.2018 | 309/18 | 17/03897-1 |
| 19 Mentamálanevndin | 13.12.2018 | 383/18 | 17/03897-1 |
| 20 Fíggjarnevndin | 13.12.2018 | 376/18 | 17/03897-1 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Talið av nýføðingum í 2016 í Tórshavnar kommunu var 21% hægri enn í 2015 (52 børn). Undanfarnu 5-6 árini hevur kommunan tillagað plásskapasitetin til eitt alsamt lækkandi barnatal við tað, at dagrøktarskipanin og virksemið í dagstovninum Vípan eru niðurløgd hesi árini.

Nú er øvugta støða, og tí hevur umsitingin í 2016 og 2017 arbeitt við ymsum loysnum til tess at tryggja øllum pláss. Í vár eru fingin áleið 30 vøggustovupláss, í leigaðum hølum, og við at fremja eina útbygging í Býlingshúsinum undir Brúnni.

Vegna framhaldandi tørv, hevur umsitingin arbeitt við øðrum loysnum. Til skúlabyrjan 2017/18 er frítíðarskúlin í Hornabø fluttur til felagseind í Kongagøtu, (sí mál 17/00817 Felagseind við skúla og frítíðarskúla í Kongagøtu) fyri á tann hátt at fáa nýggja vøggustovu í Hornabø. Sostatt eru bæði í Kongagøtu og í Hornabø gjørdar tillagingar, soleiðis at tað passar til givna virksemið.

Umframt hesi átøk, hava dagstovnar í kommununi tillagað stovnsins virksemi til tess, at teir hava kunnað tikið fleiri vøggustovubørn inn so hvørt í 2017. Tískil eru so gott sum eingi tøk pláss á dagstovnunum í kommununi.

Snarskivan, ið umsitur plássávísingina, hevur nú boðað barna- og ungdómsdeildini frá, at tørvur er á dagstovnaplássum, bæði vøggustovu- og barnagarðsplássum frá ársskifti 2017/18 at rokna, hetta serliga vegna tilflyting til kommununa. Í løtuni standa 26 børn á

bíðilista til vøggustovu, umframt 10 systkinapør, sum ynskja pláss á sama stovni. Harumframt koma fleiri á lista til eftirfylgjandi mánaðirnar.

Stovnarnir eru sum omanfyri nevnt longu fullir. Til tess at tryggja øllum á bíðilista pláss, verður neyðugt at útvega høli - skjótast. Veitir kommunan ikki pláss, kann Almannaverkið sbrt. forsorgarlógini veita foreldrum
fyribils hjálp vegna vantandi barnaansing, men álagt er kommununi at endurrinda landskassanum hesar útreiðslur. Fyri stakan forsyrgjara vil talan verða um kr. 15.674 um mðr.

Ynskiligt er, at loysnin, sum nú skal finnast, er ein varandi ella langtíðarloysn skilt á tann hátt, at tað er ikki haldbart at leiga og innrætta høli fyri stutta tíð í senn, so sum tað var gjørt í Kirkjustovu frá januar til juni 2017. Hetta er kostnaðarmikið, og haraftrat er torført at fáa starvsfólk til dagstovnaøkið yvirhøvur og uppaftur torførari til eitt so stutt tíðarskeið.

Stutttíðarloysnir hava eisini tann vansa, at vøggustovubørn skulu flyta umhvørvið og kvetta relatiónir við vaksin, sum  tey hava kent í 6 mðr. til aftur at skapa nýggjar relatiónir, tá tey vera flutt.

Umsitingin er farin í gongd við at finna høli.

Eitt uppskot kundi verið vøggustova og barnagarður í gamla realskúlanum. Í umhvørvinum í Kongagøtu eru góðir møguleikar til útivirksemi, bæði spælipláss í garðinum við Móttøkuhúsinum og spæliplássi í Grasagarði, umframt at tað virksemið, sum er ætlað fyri fimleikahøllina í Finsen, gagnligt fyri dagstovnatilboðið.

Virksemið í felagseindini í Kongagøtu kann eisini verða til gagns fyri vøggustovu- og barnagarðsvirksemi. Tað eru gjørdar tillagingar til frítíðarskúla virksemi í húsinum hjá Frk. Chor, sum eisini kann verða til gagns fyri dagstovnatilboðið fyrrapartin av degnum.

Fyrimunur er, at kommunan eigur bygningin og tískil er eingin leiga, men hølini skulu klárgerast, og óvist er, hvat tað kostar.

Aðrar loysnir kundi verið sethús, men tann marknaðurin er ikki lættur at koma framat í løtuni uttan stóran kostnað.

Undir øllum umstøðum verður neyðugt at útvega fígging, so at kommunan kann veita neyðugu plássini og ansingina, alternativt veita endurgjald fyri vantandi barnaansing.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávisar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingar avleiðingar | | | | |
| Unhvørvis avleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini boða nevndini frá plásstørvi og harvið fíggjartørvi til høli og rakstur, evt. endurgjald fyri vantandi barnaansing sbrt forsorgarlógini, og at umsitingin arbeiðir við loysnum at leggja aftur fyri nevnd.

**Mentamálanevndin 29. november 2017:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Dags dato er tørvur á 46 vøggustovuplássum og 17 barnagarðsplássum pr. 1. februar 2018.

Sum lýst omanfyri til fundin 29. november 2017 er arbeitt við at fáa til vega bráðfeingispláss og meira varandi loysnir.

Bráðfeingis ber til at skipa eina fyribils vøggustovu í gamla skúlanum á Hvítanesi. Har kunnu fáast til vega 10-12 pláss. Hetta er roynt áður, og ætlanin er, at leiðslan í Birkilund tekur sær av tilboðnum, ið er skjót at seta í verk. Staðbundna nevndin á Hvítanesi hevur givið samtykki til ætlanina treytað av, at ljósviðurskifti kring skúlan verða fingin í rættlag, at tað er væl frámerkt, hvar bilar til og frá skúlanum skulu parkera í bygdini, og at skelti verða sett upp í bygdini um, at ansa eftir børnum, ið spæla.

Harumframt verður stovnurin í Hornabø, sum byrjaði í august 2017, fyltur skjótari enn ætlað, so har verða 10-12 børn tikin inn.

Realskúlin
Umsitingin hevur arbeitt víðari við uppskotinum um at skipa part av gamla realskúlanum til dagstovn sum ein varandi miðbýarstovn, har hugsanin er, at hesin flytur og verður skipaður í skúlanum í Kongagøtu, tá Skúlin á Fløtum er liðugur í 2020. Seinastu árini hava ov fá pláss verið í miðbýnum. Staðsetingin er tískil góð í mun til afturvendandi tørvin á fleiri plássum í miðbýnum.

Við ávísum tillagingum kann realskúlin gerast dagstovnur við ml. 30-54 plássum alt eftir, hvussu stóran part av bygninginum, ið brúktur verður til endamálið, og hvussu samansetingin ml. vøggustovu- og barnagarðsbørn er.

Húsaumsitingin greiðir nærri frá neyðugu tillagingunum.

Víst verður í hesum sambandi eisini til mál 17/03883 Skúlin á Fløtum hølisviðurskifti (Realskúlin).

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin fyri barna- og ungdómsdeildina mæla til at umrøða ætlanina við dagstovni í realskúlanum.

**Mentamálanevndin 10. januar 2018:** Málið umrøtt og nevndin tekur undir við, at umsitingin arbeiðir víðari við ætlanini at skipa Realskúlan til dagstovn.

**Ískoyti:**
Víst verður til samtyktina frá undanfarna nevndarfundi. Víst verður somuleiðis til uppskot um fígging at gera realskúlan kláran til dagstovn, mál 17/03656.

Í løtuni verða neyvari kostnaðarmetingar gjørdar við støði í tilboðsprísum. Ætlandi flytur Heilsuhúsið út komandi vikurnar soleiðis, at partur av realskúlanum kann takast í nýtslu sum dagstovnur umleið hálvan februar. Restin av realskúlanum verður tikin í nýtslu, tá allur bygningurin er tøkur og so hvørt tillagingarnar eru gjørdar. Harumframt verða høli til Litir í leiki hjá Skúlanum á Fløtum.

Til tess at kunna seta tillagingararbeiðini í gongd, og til tess at kommunan kann bjóða foreldrum nýggju plássini út, er neyðugt at staðfesta endaliga, at dagstovnur skal skipast í realskúlanum.

Nærri yvirlit yvir, hvussu aktuelli plásstørvurin verður loystur, verður lagt fram á fundinum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at samtykkja, at dagstovnur verður skipaður í realskúlanum, harumframt eisini høli til Litir í leiki hjá Skúlanum á Fløtum, og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 22. januar 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 23. januar 2018:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið til kunningar.

**Býráðsfundur 25. januar 2018:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Tað er framvegis støðugt trýst á kommununa um at veita fleiri dagstovnapláss. Hóast fleiri tillagingar eru gjørdar og aðrar ávegis soleiðis, at fleiri pláss eru komin á dagstovnaøkinum, so er avbjóðingin ikki bast, um hugt verður fram til várið 2019.

Við nýútvegaðu plássunum í gamla realskúlanum kann væntast, at tey, ið d.d. eru á bíðilista, fáa bjóðað pláss til ynsktu tíð í august 2018, hetta tó treytað av, at allur bygningurin verður nýttur til dagstovnavirksemi.

Hetta loysir bráðfeingisavbjóðingina til august, men eingi pláss eru frá september. Vanliga mynstrið er, at ml. 60 og 90 børn leggjast aftrat tíðarskeiðið september-mai.

Vísandi til ætlanina, at Skúlin á Fløtum flytur úr brúna skúla í Fríðriks Petersensgøtu (sí mál 17/03883), er møguleiki at brúka bygningin til dagstovn frá sumrinum ella so skjótt til ber at hava bygningin kláran. Mett verður, at hetta er góður "buffari" at fylla upp so hvørt tørvur er á dagstovnaplássum tíðarskeiðið fram móti jólum alt eftir, hvussu nógv børn rúmast har.

Alneyðugt er tó eisini at taka avgerð um meira framtíðartryggjaðar loysnir, so henda bráðfeingisstøða, har nýggjar fyribilsloysnir er einasti handlimøguleiki, ikki gerst vanliga støðan.

Í fyrireikingararbeiðinum til talgildu plássupptøkuskipanina, sum fer at geva umsitingini munandi betri møguleika at staðfesta plásstørv mánaðir fram í tíðina, og í arbeiðinum at gagnnýta møguliga tøkan plásskapasitet á dagstovnaøkinum, hava barna- og ungdómsdeildin og húsaumsitingin pláss-skrásett allar stovnar og stovur. Hetta er gjørt eisini í mun til nýggju bygningskunngerðina, sum vísir á minsta mark fyri fermetrum til hvørt barn á dagstovni/stovu, og í mun til námsfrøðiligt viðmæli um bólkastødd av børnum í dagstovnaaldri.

Henda gjøgnumgongd vísir, at onkrir stovnar hava heldur stórt barnatal, meðan aðrir kunnu rúma fleiri børnum, verða ávísar tillagingar gjørdar. Henda støða, har onkrir stovnar skulu hava færri børn enn í dag, eigur at takast við, tá ið samlaði plásstørvurin verður viðgjørdur. Greitt verður nærri frá hesum á fundinum.

Niðanfyri verður víst á loysnir:

1. Til tess at basa bráðfeingistørvin, ið er, og sum aftur kemur á heysti 2018:
   - At allur gamli realskúlin verður nýttur til dagstovnavirksemi. Realskúlin hevur í løtuni 21 pláss. Tá allar tillagingarnar eru lidnar, rúmast bygningurin í mesta lagi 68 børnum, hetta veldst um samansetingina av vøggustovu- og barnagarðsbørnum.
   - At brúni skúli verður tillagaður og nýttur til dagstovnavirsemi frá heysti 2018. Í løtuni verður kannað, hvussu nógvum børnum, ið brúni skúli kann rúma, hvat krevst av tillagingum, og hvat tað verður mett at kosta, men roknast kann helst við trimum stovum. Eisini verður kannað, hvørt bygningurin er egnaður sum ein varandi loysn, ella um hetta er at meta sum ein fyribilsloysn.

- At skúlin á Hvítanesi framhaldandi verður brúktur sum fyribils loysn. Loysnin er á Hvítanesi er væl umtókt og kann halda fram uttan stórvegis tiltøk.

2. Til tess at fáa til vega fleiri pláss við at tillaga innrætting á nøkrum stovnum:
   - At arbeitt verður víðari við uppskotunum um tillagingar í innrætting.
   - At avbjóðingin, ið ávísir stovnar hava við barnatalinum, verður umrødd og atlit tikið til tað yvir tíð, harundir ávís býlingshús og Kurla.

Sum omanfyri lýst eru allir verandi dagstovnar gjøgnumgingnir av barna- og ungdómsdeildini og húsaumsitingini til at meta um, á hvørjum stovni tað ber til at gera tillagingar í innrætting, so stovnurin kann rúma fleiri børnum. Burturúr hesum eru komin ymisk uppskot uppá tillagingar at økja plásskapasitetin. Fyrimunur við hesum er, at einstaka rakstrarstaðið fær betri rakstrargrundarlag, og at bygningarnir verða fullnýttir við nýggjum varandi plássum, heldur enn at økja um talið av bygningum/rakstrarstøðum.

Enn vantar at kostnaðarmeta uppskotini, sum aftur er grundarlag fyri eini raðfesting, har hetta loysir seg best. Greitt verður nærri frá hesum á fundinum.

3. Til tess at framtíðartryggja plásskapasitetin við út- og nýbygging, har tað eisini verða fingin til vega nýggj varandi pláss (íløgur):
   - At arbeiða víðari við uppskotum um at byggja út ávísar dagstovnar.
   - At arbeiða víðari við uppskoti um at byggja nýggjan og størri dagstovn á Argjum í staðin fyri verandi dagstovnin á Argjum.
   - At arbeiða víðari við uppskoti at tillaga Skúlan í Kongagøtu til varandi miðbýarstovn, tá bygningurin verður tøkur summarið 2020.

Nýggj varandi pláss er fortreyt fyri, at tað støðugt skal bera til at veita foreldrum plásstrygd. Harumframt er tað fortreyt fyri endurnýggjan av ótíðarhóskandi plássum, har antin bygningurin eigur at verða saneraður sum dagstovnur ella er ikki egnaður á annan hátt.

Uppskot fyriliggur uppá útbygging av dagstovninum á Hamrinum á Argjum. Treytað av, at nýtt lendi verður lagt aftrat verandi grundøki, kann fáast ein vøggustova og eina barnagarðsstova afturat. Kostnaðarmeting uttan lendiskeyp er nakað yvir kr. 10 mió. Til ber eisini at byggja dagstovnin í Maritugøtu út við einum vognrúmi, sum leysgevur annað høli á stovninum til 10 nýggj vøggustovupláss. Hetta uppskot er ikki kostnaðarmett enn. Metast má, at eisini aðrir stovnar við fyrimuni kunnu byggjast út, og eigur hetta at verða kannað ítøkiliga beinanvegin, íroknað kostnaðarmeting og raðfesting.

Mentamálanevndin hevur áður fingið lagt fram uppskot til nýggjan og væl størri dagstovn á Argjum (mál 17/03943) lutvíst til at endurnýggja ótíðarhóskandi stovnspláss/bygning og til at útvega uml. 40 pláss fleiri (samlaður plásskapasitetur sbrt. uppskotinum 112). Kostnaður uml. kr. 35 mió. Til ber ikki einki at gera, tí verandi stovnur krevur stórar og kostnaðarmiklar ábøtur.

Tá Skúlin á Fløtum er liðugur í 2020 og flutt verður úr skúlanum í Kongagøtu, er uppskot, at bygningurin verður gjørdur um til dagstovn at koma í staðin fyri realskúlan, sum ætlandi er fyribilsloysn. Mett verður, at bygningurin rúmar 100-120 børnum alt eftir samansetingini av vøggustovu- og barnagarðsbørnum. Fyrimunur er, at bygningurin rúmar øllum børnunum í realskúlanum umframt t.d. Kurlu ella brúna skúla, verða hesi niðurløgd. Bygningurin í Kongagøtu er nýggjur og í góðum standi, og mett verður ikki neyðugt við stórum tillagingum.

Fyrimunur við hesum uppskoti er, at kommunan sleppur undan íløgu í nýggjan dagstovn, ið ikki verður minni enn tær kr. 35 mió, sum nýggi dagstovnurin á Argjum verður mettur at kosta, og mett verður ikki sannlíkt, at kommunan byggir tveir stovnar við uml. 100 plássum í senn, hóast plásstørv.

Fíggjartørvur:
Til tess støðugt at fáa til vega nýggj pláss, tað verið seg við smærri tillagingum í innrætting, útbyggingum og nýbyggingum, er neyðugt at raðfesta fígging til endamálið bæði í rakstri og íløgum. Umsitingin kemur við neyvari greining av tørvi, so hvørt uppskotini verða kostnaðarmett og raðfest. Roknast kann við nýggjum fíggjartørvi í inniverandi ári.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at samtykkja:
- At allur realskúlin verður dagstovnur í minsta lagi fram til ársskiftið 2020/21.
- At brúni skúli verður dagstovnur frá august 2018 í minsta lagi fram til ársskiftið 2020/21, og at umsitingin ger neyvari meting um kostnað at gera bygningin kláran til dagstovn at leggja aftur fyri nevndina.
- At skúlin á Hvítanesi framhaldandi verður brúktur sum fyribilsloysn.

Harumframt mæla trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini til at samtykkja:
- At umsitingin leggur fram neyvari raðfesting av tillagingarmøguleikum í innrætting á dagstovnum, har tað verður mett at hava fyrimun at økja plásskapasitetin.
- At heimild verður latin umsitingini at fáa til vega ítøkilig og kostnaðarmett uppskot til útbyggingar av verandi stovnum.
- At prinsipiell støða verður tikin til uppskotið, sum lagt er fram um bygging av nýggjum og størri dagstovni á Argjum, og at fáa fígging til vega í langtíðaríløguætlanini.
- At taka prinsipiella støðu til, at skúlabygningurin í Kongagøtu verður at brúka til varandi dagstovn eftir summarið 2020, og at umsitingin fær heimild at fyrireika ætlanina.

**Mentamálanevndin 23. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við teim fyrstu seks tilmælunum, og at fara undir eina tilgongd at avgera, hvat skúlabygningurin í Kongagøtu skal brúkast til.

**Fíggjarnevndin 24. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Víst verður til tilmæli og samtyktir omanfyri.

Høvuðsavbjóðing júst nú er:
- At tað eru ov nógv børn inni á fleiri stovnum
- At nettotilflytingin av børnum undir skúlaaldur eftir øllum at døma hevur verið serliga stór í 2017
- At rættiliga stórur bíðilisti er eftir plássum longu frá august

Hetta lagt saman gevur ein tørv á plássum svarandi til ein miðal árgang í aldrinum 0-7 ár.

Raðfestast má í fyrsta lagi at útvega nýggj pláss, áðrenn til ber yvir tíð at lækka barnatalið á ávísum stovnum.

Staðfest er, at realskúlin verður ikki allur tikin í nýtslu fyrr enn 1. november 2018, tí arbeiðið verður ikki liðugt fyrr enn tá. Í løtuni eru 25 børn í realskúlanum, men væntast kann ikki, at hini uml. 40 plássini eru tøk fyrr enn í november. Ætlandi er realskúlin fyribils loysn tvey ár fram, tvs. hesi skulu endurútvegast í seinasta lagi um tvey ár. Brúni skúli kann, um arbeiðið fer í gongd nú í summar, væntandi verður klárur at taka í nýtslu í januar 2019. Har eru 64 varandi pláss.

Støðan ger, at arbeiðast mugu við fleiri loysnum í senn og tað beinanvegin.

Gjørd eru nú uppskot og fyribils kostnaðarmetingar uppá tillagingar í Dagstovninum á Velbastað, Býlingshúsinum í Maritugøtu og Býlingshúsinum Inni á Gøtu, sum samlað geva 44 pláss (24 VG og 20 BG) fyri uml. kr. 2,5 mió handverkaraútreiðslur, tvs uttan mvg, byggiharraútreiðslur, innbúgv v.m.

At tillaga Brúna skúla við neyðugum útbyggingum av vognrúmi, vognskúri, svala (útgongdum frá stovum), innrættingum í stovnunum, liðugt gjørt útiøki v.m. er mett til kr. 6,3 mió – í hesum føri er allar byggiharraútreiðslur íroknaðar.

Hesar fýra verkætlanirnar geva sostatt 108 varandi pláss fyri uml. kr. 10 mió í íløgum, og kunnu allar verða lidnar komandi 6-7 mánaðirnar, verður arbeiðið byrjað nú.

Verður skúlin í Kongagøtu gjørdur um til dagstovn um 2-2,5 ár, so verða 100 pláss aftrat fyri ta upphædd, ið tillagingarnar kosta – í tí førinum mest smærri innrættingar.

Dagstovnurin á Argjum er størri íløguætlan, har tað í fyrsta umfari snýr seg um at framtíðartryggja verandi 70 plássini við at byggja nýggjan og størri stovn, har tað kunnu fáast uml. 33 pláss aftrat. Kostnaðarmetingin fyri uppskotið til bygning, ið lagt er fram í mentamálanevndini, er uml. kr. 35 mió, men hetta skal viðgerast neyvari. Tó eigur upphædd til neyvari verkætlanarfyrireikingar og prosjekting at verða fingin til vega skjótast og helst í inniverandi ári, so at møgulig bygging kann byrja næsta ár.

Øll hesi átøk, har plássini í skúlabygninginum í Kongagøtu og nýggja Dagstovninum á Argjum tó ikki kunnu roknast við fyrr enn í 2020/21, samstundis sum plássini í realskúlanum tá ætlandi detta burtur, geva í alt 176 pláss.

Trygd er ikki fyri, at hetta er nokk, men innanfyri komandi 6-8 mánaðirnar eru tó við uppskotunum omanfyri sannlíkindi fyri, at til ber at hava 148 nýggj pláss tøk (Velbastað 20 BG, Maritugøta 12 VG, Inni á Gøtu 12 VG, Brúni skúli 64, Realskúlin 40).

Kollafjørður:
Plásstrot er eisini á Dagstovninum Kura í Kollafirði. Barnatalið er hækkað nakað síðstu árini, og ábendingar eru um framhaldandi vøkstur í barnatalinum. Møguleikar at byggja Kuru út við eini vøggustovu og eini barnagarðsstovu eiga tí at kannast, umframt at frítíðarskúlin og ungdómstilboðið halda til í lutvíst leigaðum hølum, ið ikki longur eru hóskandi. Kommunan kundi sum fyribils loysn tikið upp samband við samkomuna Zion, ið er beint við, við tí endamáli at leiga og innrætta kjallaran til dagstovn, og annars hava felags garð við Kuru. Hesi pláss kunnu sostatt útvegast yvir rakstur.

Onnur atlit:

Tá so stórt fokus er á bráðfeingis tørvin, so eigur at verða mint á onnur atlit, ið eisini hava við sær øktan plásstørv og harvið fígging. Dagstovnurin í Kaldbak er eisini við at vera ov lítil. Dagstovnurin í Løkjatúni hevur ikki nøktandi umstøður til vognar, kjallarahæddin í Býlingshúsinum í Norðasta horni skal umvælast og kundi hýst nýggjari barnagarðsstovu, Býlingshúsið á Ternuryggi manglar vognrúm, og Stella Maris hevur tørv á tillagingum, tí bygningurin er gamal.

Onnur vaksandi avbjóðing eru børn við "serligum serligum" tørvi. Hetta eru børn, sum ikki kunnu vera í vanligu stovunum á dagstovnaøkinum vegna heilsuvanda eitt nú í mun til smittu, ella hava umfevnandi menningaravbjóðingar. Her kunnu smærri rúm á ávísum stovnum setast av til hetta, men sum kann ávirka vanliga plásskapasitetin.

Til slík atlit eigur ein føst upphædd, t.d. kr. 1 mió, at verða sett av árliga á kontu 3214 broytingar og minni umvælingar.

Fígging:
Arbeiðið við realskúlanum er fíggjað, men tað eru hinar ætlanirnar ikki.

Størsta arbeiðið í mun til loysnirnar her og nú er Brúni skúli. Her er møguligt at flyta kr. 6 mió av íløgujáttanini, sum ætlað er til musikkskúlabyggingina í ár, tí roknað verður har við minninýtslu í ár. Hetta hevur sostatt ikki avleiðing fyri musikkskúlabyggingina, men krevur tó, at upphæddin verður játtað aftur til musikkskúlabyggingina í 2019.

Verkætlanirnar á Velbastað, Maritugøtu og Inni á Gøtu hava onga fígging. Her mugu útvegast ml. kr. 3-3,5 mió til endamálið.

Eingin játtan er sett av til verkætlanarfyrireikingar og prosjektering av nýggjum Dagstovni á Argjum. Mett verður, at neyðugt er við kr. 3,5 mió til endamálið til tess at menna prosjektið fram til útboð (mál 17/03943).

Spurningurin um framtíðina hjá skúlabygninginum í Kongagøtu má takast skjótast.

Verður hann ikki dagstovnur, má annar stovnur í miðbýnum byggjast og arbeiðið at fyrireika prosjekt tí byrja beinanvegin.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at játta kr. 6 mió til at út- og umbyggja Brúna skúla til dagstovn, íroknað at gera útiøkið liðugt, og at heimila umsitingini at bjóða arbeiðið út og gera neyðugar sáttmálar. Mælt verður til, at arbeiðið verður fíggjað við at flyta kr. 6 mió av løgukontu 5175 Musikkskúlin løgukarmur L0001 til løgukontu 3175 barnaansing, sum verður at játtað musikkskúlaverkætlanini aftur í fíggjarætlanini 2019.

Harumframt mæla trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini til at taka undir við uppskotunum um tillagingar av Dagstovninum á Velbastað, Býlingshúsinum í Maritugøtu og Býlingshúsinum Inni á Gøtu, og í hesum sambandi at játta kr. 3,5 mió til endamálið við at umraðfesta í íløguætlanina fyri 2018, og heimila umsitingini at bjóða arbeiðini út og gera neyðugar sáttmálar.

Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla somuleiðis til at játta kr. 3,5 mió til prosjektfyrireikingar v.m. av nýggjum Dagstovni á Argjum við umraðfestingum í íløguætlanini fyri 2018, og í hesum sambandi at seta bygginevnd samsvarandi reglugerð um íløguverkætlanir størri enn kr. 20 mió.

Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla eisini til at geva umsitingini heimild at samráðast við samkomuna Zion í Kollafirði um møguleikan at leiga og innrætta kjallarahæddina í bygningin teirra til dagstovnavirksemi at leggja aftur fyri nevndina.

At enda mæla trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini til endaliga støðutakan um skúlabygningurin í Kongagøtu verður at brúka til dagstovn eftir 2020, og um ikki, so at játta fígging kr. 1 mió til at seta í gongd prosjektfyrireikingar v.m. til bygging av nýggjum dagstovni í miðbýnum, og í hesum sambandi at at seta bygginevnd samsvarandi reglugerð um íløguverkætlanir størri enn kr. 20 mió.

**Mentamálanevndin 06. juni 2018**: Ein meiriluti, Gunvør Balle, Turið Horn og Jákup Dam, samtykti at taka undir við tilmælinum um at gera brúna skúla um til dagstovn og játta kr. 6 mió av løgukontu 5175 Musikkskúlin løgukarmur L00001 til løgukontu 3175 barnaansing, og í hesum sambandi heimila umsitingini at bjóða arbeiðið út og gera neyðugar sáttmálar. Málið beinast í býráðið um fíggjarnevndina.

Harumframt samtykt at geva umsitingini heimild at samráðast við samkomuna Zion í Kollafirði um møguleikan at leiga og innrætta kjallarahæddina í bygningi teirra til dagstovnavirksemi at leggja aftur fyri nevndina.

Vent verður aftur til hini tilmælini á seinni fundi.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Halla Samuelsen, stemma blankt og krevja málið fyri býráðið.

**Ískoyti:**
Víst verður til uppskotini til síðsta mentamálanevndarfund um tillagingar av Dagstovninum á Velbastað, Býlingshúsinum í Maritugøtu og Býlingshúsinum Inni á Gøtu til tess fáa 44 nýggj dagstovnapláss at nøkta part av bráðfeingis plásstørvinum, og sum mett verður kosta kr. 3,5 mió at fáa til vega. Til henda fund var tó ikki møguligt at ávísa fígging.

Mett verður, at til ber at flyta kr. 3,5 mió av løgukarmi 2775 eldrarøkt L00001 ætlað umlættingar- og rehabiliteringsdepli, tí roknað verður við, at henda verkætlanin hevur ikki tørv á allari játtanini í ár. Hetta hevur sostatt ikki nakra avleiðing fyri verkætlanina í ár, men krevur tó, at umlættingar- og rehabiliteringsdepilin (L27011) hesa játtan aftur sum part av samlaðu íløgujáttanini fyri 2019.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at gera ávísar tillagingar av Dagstovninum á Velbastað, Býlingshúsinum í Maritugøtu og Býlingshúsinum Inni á Gøtu, og í hesum sambandi at játta kr. 3,5 mió til endamálið og heimila umsitingini at bjóða arbeiðini út og gera neyðugar sáttmálar.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2018:** Tikið av skrá vísandi til, at nevndarlimir hava kravt málið fyri býráðið.

**Ískoyti:**
Víst verður til síðsta ískoytið og tilmælið omanfyri um at játta kr. 3,5 mió til at gera tillagingar av Dagstovninum á Velbastað, Býlingshúsinum í Maritugøtu og Býlingshúsinum Inni á Gøtu. Sambært nýggjum kostnaðarmetingum verður játtanartørvurin helst um kr. 5,5 mió.

Mett verður, at fyri tær kr. 3,5 mió ber í øllum førum til at fremja tvær av ætlanunum, men til ber ikki at staðfesta endaliga kostnaðin fyri allar ætlanirnar fyrr enn tilboðskostnaðurin fyriliggur eftir útboð. Mett verður tí skilabest, at umsitingin við støði í innkomnu tilboðunum raðfestir ætlanirnar, ið kunnu figgjast innanfyri kr. 3,5 mió, og at møgulig fígging til triðju ætlanina verður reist antin sum eykajáttanarmál í 2018 ella sum partur av fíggjarætlanini fyri 2019.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at gera ávísar tillagingar av Dagstovninum á Velbastað, Býlingshúsinum í Maritugøtu og Býlingshúsinum Inni á Gøtu, og í hesum sambandi at játta kr. 3,5 mió til endamálið og heimila umsitingini at bjóða arbeiðini út og gera neyðugar sáttmálar.

Trivnaðarstjórin, heilsu- og umsorganarstjórin og leiðarin fyri barna- og ungdómsdeildina mæla til at játta kr. 3,5 mió av løgukarmi 2775 eldrarøkt L00001 til løgukontu 3175 barnaansing til endamálið.

**Mentamálanevndin 18. juni 2018:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Turið Horn og Marin Katrina Frýdal, tekur undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Helena Dam á Neystabø og Halla Samuelsen, mælir til ikki at gera realskúlan til dagstovn, men at lata Skúlan á Fløtum bygningin til skúla og ístaðin útvega nýggj dagstovnapláss eftir sama leisti sum Spíranum í Havnardali.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2018**: Ein meiriluti Annika Olsen, Turið Horn og Gunvør Balle tekur undir við samtyktini í Mentamálanevndini og at beina málið í býráðið.

Ein minniluti Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein mælir til at gera tillagingar av Dagstovninum á Velbastað, Býlingshúsinum í Maritugøtu og Býlingshúsinum Inni á Gøtu. Umframt verður víst á tað, ið minnilutin í Mentamálanevndini vísir á.

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Fyrst varð atkvøtt um soljóðandi broytingaruppskot frá Helenu Dam á Neystabø, Hallu Samuelsen, Tróndur Sigurðsson, Bjørg Dam, Bjørghild Djurhuus og Annfinn Brekkstein:

Mælt verður til ikki at gera realskúlan til dagstovn, men at lata Skúlan á Fløtum bygningin til skúla og ístaðin útvega nýggj dagstovnapláss eftir sama leisti sum Spíranum í Havnardali.

Uppskotið fall við seks atkvøðum fyri og sjey ímóti.

Fyri atkvøddu: Bjørg Dam, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Ruth Vang.

Síðani varð atkvøtt um samtyktina hjá meirilutanum í mentamálanevndini tann 6. juni 2018 og samtyktina hjá meirilutanum í fíggjarnevndini tann 20. juni 2018, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri og trimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Ruth Vang, Helena Dam á Neystabø , Annfinn Brekkstein og Bjørghild Djurhuus

Blankt atkvøddu: Bjørg Dam, Tróndur Sigurðsson og Halla Samuelsen.

**Býráðsfundur 30. august 2018**: Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Víst verður til býráðssamtyktina 30. august 2018 um at játta kr. 3,5 mió til at gera tillagingar á trimum dagstovnum hetta til tess at fáa til vega fleiri dagstovnapláss.

Byrjað er við at bjóða út arbeiðini viðvíkjandi Býlingshúsinum í Maritugøtu og Býlingshúsinum Inni á Gøtu. Nú tilboðini eru komin inn kann staðfestast, at fíggingin røkkur ikki til meira enn aðra verkætlanina. Tilboðið uppá Maritugøtu er uml. kr. 3,1 mió og uppá Inni á Gøtu kr. 2,4 mió mvg íroknað, men ikki aðrir projektkostnaðir, ið roknast til uml. kr. 0,5 mió.

Samlaður kostnaður verður kr. 6 mió, og fíggjartørvur til at fáa framt báðar hesar verkætlanirnar er sostatt kr. 2,5 mió.

At munurin á kostnaðarmeting og tilboðum er so stórur skyldast fyri stóran part, at kostnaðarmetingin er gjørd tíðliga í tilgongdini, og at verkætlanirnar eru mentar so hvørt bæði sambært tørvi og krøvum.

Avbjóðing hjá kommununi er, at hesi nýggju plássini í Maritugøtu og Inni á Gøtu eru bókað hjá børnum at byrja februar/mars. Tað er sostatt neyðugt at fáa hesi arbeiði í gongd.

Í býráðnum liggur ein eykajáttan til íløgur at útvega fleiri dagstovnapláss, sí mál 18/03937 Flyting millum kontur á grein 3, har ætlandi kr. 2,5 mió verða játtaðar til kontu 3175 Barnaansing (íløgur). Henda kann játtast inn á løgukontu L31009 Tillagingar á dagstovnum. Avgerð um tað verður at gera í máli 18/03937.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin fyri barna- og ungdómsdeildina mæla til at fremja verkætlanirnar viðvíkjandi Býlingshúsinum í Maritugøtu og Býlingshúsinum Inni á Gøtu fyri ein samlaða játtan uppá kr. 6 mió á kontu 3175 Barnansing L31009 og heimila umsitingini at gera neyðugar sáttmálar.

**Mentamálanevndin 28. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 28. november 2018:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 29. november 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Samráðing hevur verið við arbeiðstakaran, sum umbyggir Brúna skúla til dagstovn, til tess at framskunda umbyggingina soleiðis, at stovnurin er klárur at taka børn inn 1. mars heldur enn 1. mai. Samlaði meirkostnaðurin stavar serliga frá eyka arbeiðstímum.

Foreldur hava í heyst fingið boð um, at børnini sleppa inn 1. mars. 2019.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at játta kr. 1,5 mió av løgujáttan 3175 Barnaansing fyri 2019 til løgukontu L31008 Umvæling av Brúna skúla til dagstovn og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 13. desember 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 13. desember 2018:** Samykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 13. desember 2018:** Einmælt samtykt.

# 310/18 Útvega fleiri dagstovnapláss

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 03.10.2018 | 286/18 | 18/03521-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 08.10.2018 | 303/18 | 18/03521-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 10.10.2018 | 279/18 | 18/03521-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 28.11.2018 | 344/18 | 18/03521-1 |
| 5 Mentamálanevndin | 10.12.2018 | 370/18 | 18/03521-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 13.12.2018 | 371/18 | 18/03521-1 |
| 7 Býráðsfundur | 13.12.2018 | 310/18 | 18/03521-1 |
| 8 Mentamálanevndin | 13.12.2018 | 382/18 | 18/03521-1 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Víst verður til mál 17/03897, har støðan við manglandi plásskapasiteti á dagstovna-økinum er lýst. Høvuðsavbjóðingin er enn hin sama, nevniliga:

- at barnatalið undir skúlaaldri økist, hetta bæði sum úrslit av fleiri føddum børnum og tilflyting
- at foreldur ikki fáa pláss til barnið til ynskta tíð
- at tað eru ov nógv børn inni á ávísum stovnum.

Øll pláss, sum verða bygd nú at taka í nýtslu í november 2018 (Realskúlin) og í januar-februar 2019 (Dagstovnurin Fríðriksgarður (t.e. Brúni skúli), Býlingshúsið í Maritugøtu og Býlingshúsið Inni á Gøtu), eru útlutað.

Hetta nøktar tó ikki tørvin. Í fíggjarætlanaruppskotinum fyri 2019 er samlaða talið fyri vøggustovu- og barnagarsbørn 145 fleiri enn í 2018, tey flestu av hesum eru ikki til fysiskt, tvs., at tey skulu útvegast.

Tá nýggja talgilda plássbókingarskipanin verður tikin í nýtslu í oktober 2018, eru eini 40-50 børn, sum søktu pláss eftir gomlu skipanini, ið ikki hava fingið pláss, men sum nú kunnu bóka sær tøkt pláss, ið væntandi er longri fram í tíð enn ynskt. Harumframt koma øll tey, sum í umleggingini til nýggju skipanina ikki hava havt møguleika at søkja pláss, og so tey, sum vanliga leggjast aftrat, sum árið líður.

Í skrivandi stund ber ikki til neyvt at siga, hvussu nógv pláss skulu útvegast alt fyri eitt, men við verandi gongd og høvuðsavbjóðingini omanfyri í huga er eingin orsøk at seta talið ov lágt. Við nýggju talgildu skipanini ber betri til at meta um tørvin á plásskapasiteti, men til ber tó longu nú at staðfesta, at nógv tey flestu foreldrini fáa ikki pláss til ynskta tíð.

Eftir at plásstørvurin á dagstovnaøkinum fór at vaksa í stórum, eru pláss fingin til vega við at taka í nýtslu tøk høli, bygningar ella smærri út- og umbyggingar eru framdar. Hesir møguleikar eru í stóran mun troyttir, og aðrar skjótar og haldgóðar loysnir skulu finnast beinanvegin.

Gott boð uppá tað, ið eisini tekur atlit at støðuni byggivinnuni fyri tíðina, er at flyta inn liðugt bygd dagstovnasmodul at seta saman, ið er vanligt aðrastaðni, og sum kommunan eisini hevur góðar royndir við í Havnardali.

Mett verður, at til ber at staðseta slík modul í hóskandi stødd upp at nøkrum av verandi stovnum, ið liggja frítt fyri, og har til ber at vaksa um grundøkið og garðsøkið. Leveransan er nakrar mánaðir, ið gevur neyðugt skotbrá at fáa gjørt allar fyrireikingar á staðnum. Eisini ber til at byggja modul uppí verandi stovn.

Annar møguleiki við modulum at seta saman er at flyta inn ein sjálvstøðugan stovn í hóskandi rakstrarstødd. Tá krevst at áseta staðseting fyri nýggjum dagstovni, har grundøkið helst skal vera høgligt at byggibúgva.

Mett verður skilabest at seta skjóttarbeiðandi arbeiðsbólk umboðandi trivnaðarfyrisiting-ina og teknisku fyrisitingina at gera uppskot til:

1. Hvørjar staðsetingar eru best egnaðar til at seta upp liðugt bygd dagstovnamodul, ið kunnu verða
    a. bygd upp at verandi stovni
    b. bygd uppí verandi stovn
    c. bygd sum sjálvstøðugur stovnur
2. Í hesum sambandi áseta best hóskandi tal av dagstovnaplássum fyri hvørja verkætlan, ið eisini taka atlit til arbeiðsgongdir v.m. á staðnum og rakstur annars, og meta um tørv á nýggjum lendi til grundøki v.m.
3. Við støði í 1. og 2. gera uppskot til snið, innrætting v.m. fyri hvørja einstøku verkætlan, fáa til vega tíðarætlan og kostnaðarætlan fyri hvørja einstøku verkætlan, harundir lendisútvegan, jørðarbeiði, stoyping av sokklum, leiðingar, uppsetan v.m.

Arbeiðsbólkurin skal vera liðugur í seinasta lagi 15. november 2018.

**Heildarætlan**

Tørvur er eisini miðvísari planlegging, tá um samlaðu verandi og komandi bygningsmongdina á dagstovnaøkinum viðvíkur, harundir eisini stovubygnað, tvs. lutfall millum vøggustovur/-pláss og barnagarðsstovur/-pláss.

Í 2015 varð samtykt (mál 14/01148) at gera heildarætlan fyri bygningar á dagstovnaøkinum. Grund fyri hesum var lutvíst at fáa skipað størri rakstrareindir, tvs. størri stovnar, og at leggja ætlan fyri endurnýggjan av ótíðarhóskandi bygningum at niðurleggja sum dagstovnur og byggja nýtt í staðin.

Húsaumsitingin hevur gjøgnumgingið allar bygningnar á dagstovnaøkinum og mett um dagføringartørv, har eitt nú Dagstovnurin á Argjum er átrokandi. Tó manglar at fáa gjørt eina ætlan fyri skipaða bygging av nýggjum stovnum fram í tíð, harundir í býarskipanini at fáa avsett lendi til endamálið í ymsum pørtum av høvuðsstaðarøkinum.

Í mun til støðuna í 2015 er nú galdandi, at henda heildarætlan eisini skal taka støði í fólkavøkstrinum.

Sum 4. arbeiðsetningur eiga trivnaðarfyrisitingin og tekniska fyrisitingin at fáa gjørt uppskot til heildarætlan tí viðvíkjandi, so skjótt teir fyrstu spurningarnir eru loystir.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og leiðarin fyri barna- og ungdómsdeildina mæla til at seta arbeiðsbólk umboðandi trivnaðarfyrisitingina og teknisku fyrisitingina til í seinasta lagi 15. november 2018 at hava gjørt uppskot til:

1. Hvørjar staðsetingar eru best egnaðar til at seta upp liðugt bygd dagstovnamodul, ið kunnu verða
   a. bygd upp at verandi stovni
   b. bygd uppí verandi stovn
   c. bygd sum sjálvstøðugur stovnur
2. Í hesum sambandi áseta best hóskandi tal av dagstovnaplássum fyri hvørja verkætlan, ið eisini taka atlit til arbeiðsgongdir v.m. á staðnum og rakstur annars, og meta um tørv á nýggjum lendi til grundøki v.m.

3. Við støði í 1. og 2. gera uppskot til snið, innrætting v.m. fyri hvørja einstøku verkætlan, fáa til vega tíðarætlan og kostnaðarætlan fyri hvørja einstøku verkætlan, harundir lendisútvegan, jørðarbeiði, stoyping av sokklum, leiðingar, uppsetan v.m.

**Mentamálanevndin 03. oktober 2018:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Turið Horn og Marin Katrina Frýdal, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Halla Samuelsen, tekur undir við tilmælinum, og mælir til at fyrireika bygging av nýggjum dagsstovni.

**Ískoyti:**
Sum framgongur av málslýsingini til undanfarna fund, er talan um um fýra arbeiðssetningar, har tann síðsti snýr seg um heildarætlan fyri bygging og bygningar á dagstovnaøkinum. Av misgáum manglaði síðsti parturin av tilmælinum í skránni, og sum var um júst hetta.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og leiðarin fyri barna- og ungdómsdeildina mæla harumframt til, at trivnaðarfyrisitingin og tekniska fyrisitingin fáa til vega uppskot til heildarætlan fyri bygningar og bygging av nýggjum dagstovnum, harundir staðsetingum.

**Mentamálanevndin 08. oktober 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum. Heðin Mortensen og Marin Katrina Frýdal luttóku ikki í viðgerðini.

**Fíggjarnevndin 10. oktober 2018:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini.

**Ískoyti:**
Kunnað verður um málið.

**Mentamálanevndin 28. november 2018:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Tekstur kemur.

**Mentamálanevndin 10. desember 2018:** Kunnað varð um málið.

Ískoyti:
Víst verður til samtykt í mentamálanevndini í oktober 2018 og hjálagt upprit um plásstørv á dagstovnaøkinum.

Arbeitt er við trimum ítøkiligum loysnum, sum samlað geva í mesta lagi 228 pláss. Uppskotini eru:

- Byggja nýggjan stovn í Stórubrekku við 8 stovum (4 vg og 4 bg, í mesta lagi 128 børn)
- Útbyggja Býlingshúsið Vesturi á Flat við 4 stovum (2 vg og 2 bg, í mesta lagi 64 børn)
- Útbyggja Dagstovnin á Hamrinum við 2 stovum (1 vg og 1 bg), í mesta lagi 32 børn).

Samband varð tikið upp við fýra danskar veitarar av modulum og tilfar sent til teirra, harav tveir vístu áhuga. Avgjørt varð at arbeiða víðari við Scandi Byg. Articon/SNA hevur biðið um og fingið sama tilfar.

Tilboð eru komin inn frá Scandi Byg uppá modulbygningar, har annar kostnaður fyri lendisarbeiði, montering v.m. skal leggjast aftrat, og frá Articon/SNA uppá alt arbeiðið, sí hjálagt yvirlit, har tað eisini verður mett um fyrimunir og vansar.

Samlað er heildartilboðið hjá Articon/SNA tað bíligara tilboðið, meðan samlaða loysnin við modulum frá Scandi Byg væntast fyrr liðug. Við støði í lýsingini av fyrimunum og vansum og samlaða kostnaðinum, so verður mett, at Articon/SNA hevur tað betra tilboðið og við lægri váða.

Á íløguætlanini fyri 2019 eru kr. 20 mió settar av til dagstovnar. Hetta røkkur til at byggja loysnina við Vesturi á Flat. Mett verður, at henda verkætlanin er tann, sum skjótast kann byrja, so skjótt øll lendisviðurskifti eru avgreidd.

Í mun til vavið av byggingini, so verður mett skilagott, at útbyggingin av Dagstovninum á Hamrinum eisini verður framd í 2019 samstundis.

Samlaður íløgutørvur í 2019 fyri hesar báðar byggingarnar er uml. kr. 30 mió fyri 96 nýggj pláss. Aftrat skal leggjast upphædd til innbúgv, spælipláss v.m., sí yvirlitið.

Størsta verkætlanin kann tá møguliga bíða at seta í gongd til seinni í 2019 ella tá útstykkingarætlanin í Stórubrekku er komin longri. Í ti kostnaðarmetingini er ikki iroknað vegatkoma.

Mett verður møguligt at gera sáttmála við Articon/SNA um heildarveiting av øllum trimum byggingunum at byggja í stigum. Harumframt skal fígging fáast til vega fyri hvørt stigið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at fáa heimild at fara í samráðing við Articon/SNA um sáttmála um heildarveiting av øllum trimum loysnum at byggja í stigum við einum samlaðum íløgukarmi uppá í mesta lagi kr. 60 mió árini 2019-2020.

Við støði í hesum verður harumframt mælt til heimild at gera arbeiðstøkusáttmála við Articon/SNA um útbygging av Býlingshúsinum Vesturi á Flat at fíggja av íløgukarmi 3175 Barnaansing í 2019.

Mentamálanevndin 13. desember 2018: **Ein meiriluti, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal og Jákup Dam mælir til at taka undir við tilmælunum, tó við teirri broyting, at heimild verður latin at samráðast um arbeiðstøkusáttmála um útbygging av Býlingshúsinum Vesturi á Flat, og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.**

Ein minniluti, Halla Samuelsen og Bjørghild Djurhuus, mælir til, at heildarveitingin verður boðin út.

**Fíggjarnevndin 13. desember 2018:** Ein meiriluti Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass samtykkkja at heimila umsitingini at taka upp samráðingar um arbeiðstøkusáttmála um útbygging av Býlingshúsinum Vesturi á Flat.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Halla Samuelsen, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 13. desember 2018:** Tikið av skrá.

# 311/18 Uppskot um avtalu við Fjølrit um nýtslu av vardum verkum.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 27.08.2018 | 251/18 | 18/00115-5 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.09.2018 | 257/18 | 18/00115-5 |
| 3 Býráðsfundur | 27.09.2018 | 216/18 | 18/00115-5 |
| 4 Mentamálanevndin | 07.11.2018 | 334/18 | 18/00115-5 |
| 5 Fíggjarnevndin | 05.12.2018 | 353/18 | 18/00115-5 |
| 6 Býráðsfundur | 13.12.2018 | 311/18 | 18/00115-5 |

**Upprunin til málið:**
Áheitan frá Fjølrit at gera avtalu um nýtslu av vardum verkum.

**Lýsing av málinum**
Fjølrit er felagsskapur, sum er góðkendur sambært § 40 í upphavsrættarlógina til at umsita rættindi hjá upphavsrættarfólki og er meginfelag hjá feløgum, sum umboða rættindahavarar, tá ið verk, vard av lógini um upphavsrætt, verða nýtt.

Kommunufelagið hevur samskift við Fjølrit um avtalu og hevur gjørt eitt uppskot til standardavtalu. Nakrar kommunur ætla at leggja avtaluna fyri kommunustýrini at taka støðu til. Higartil hevur bert Runavíkar kommuna skriva undir avtaluna.

Sambært uppskotinum til avtalu verður gjaldið 200 kr. fyri hvønn næming í fólkaskúlunum í kommununi. Næmingatalið í Tórshavnar kommunu er uml. 3.000, sostatt er tørvur á 600.000 kr., og verður avtalan undirskrivað, er neyðugt at játta hesa upphædd á kontu 5313 Gjøld til rættindi. Á kontu 5313 er játtan til Sprotan og Koda.

Uppskot til fyribils avtalu við fjølrit er hjálagt.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg nr. 30 frá 30. apríl 2015 um upphavsrætt.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja hjáløgdu standardavtalu at galda í eini royndartíð á tvey ár frá 1. januar 2019.

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja, at í fíggjarætlan 2019 verða 600.000 kr. játtaðar aftrat á kontu 5313 Gjøld til rættindi og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina..

**Mentamálanevndin 27. august 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 19. september 2018:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. september 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Uppskotið til avtalu er umrøtt á fundi við skúlaleiðarar í Tórshavnar kommunu, og samskifti er millum Fjølrit og Eysturskúlan um skráseting.

Uppskotið til avtalu er galdandi fyri tvey skúlaár frá 1. august 2018 til 1. august 2020. Fjølrit sendir rokning í mai. Rokningin er fyri eitt skúlaár og tekur støði í næmingatalinum 1. september árið fyri. Sostatt verður rokningin fyri hetta skúlaárið send í mai 2019.

Á býráðsfundi 27. september varð hjálagda uppskot til avtalu samtykt at galda í tvey ár frá 1. januar 2019. Sambært uppskotinum er avtalan tó galdandi fyri tvey skúlaár tvs. frá 1. august 2018.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til, at avtalan verður galdandi fyri skúlaárini 2018/2019 og 2019/2020.

**Mentamálanevndin 07. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 05. desember 2018:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 13. desember 2018**: Einmælt samtykt.

# 312/18 Serstøk nevnd at fyrireika nýggjan svimjihyl

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 23.04.2015 | 83/15 | 15/01400-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 25.05.2016 | 148/16 | 15/01400-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 08.06.2016 | 225/16 | 15/01400-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 15.06.2016 | 174/16 | 15/01400-1 |
| 5 Tekniska nevnd | 13.06.2016 | 70/16 | 15/01400-1 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 14.06.2016 | 179/16 | 15/01400-1 |
| 7 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 16.06.2016 | 46/16 | 15/01400-1 |
| 8 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 163/16 | 15/01400-1 |
| 9 Mentamálanevndin | 06.12.2016 | 314/16 | 15/01400-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 07.12.2016 | 402/16 | 15/01400-1 |
| 11 Býráðsfundur | 15.12.2016 | 329/16 | 15/01400-1 |
| 12 Býráðsfundur | 26.01.2017 | 46/17 | 15/01400-1 |
| 13 Mentamálanevndin | 16.10.2017 | 266/17 | 15/01400-1 |
| 14 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 77/17 | 15/01400-1 |
| 15 Fíggjarnevndin | 15.11.2017 | 270/17 | 15/01400-1 |
| 16 Býráðsfundur | 22.11.2017 | 266/17 | 15/01400-1 |
| 17 Mentamálanevndin | 10.01.2018 | 8/18 | 15/01400-1 |
| 18 Mentamálanevndin | 07.03.2018 | 82/18 | 15/01400-1 |
| 19 Mentamálanevndin | 12.09.2018 | 277/18 | 15/01400-1 |
| 20 Býráðsfundur | 22.03.2018 | 52/18 | 15/01400-1 |
| 21 Fíggjarnevndin | 19.09.2018 | 260/18 | 15/01400-1 |
| 22 Býráðsfundur | 27.09.2018 | 214/18 | 15/01400-1 |
| 23 Mentamálanevndin | 28.11.2018 | 364/18 | 15/01400-1 |
| 24 Fíggjarnevndin | 05.12.2018 | 350/18 | 15/01400-1 |
| 25 Býráðsfundur | 13.12.2018 | 312/18 | 15/01400-1 |

**Málslýsing**:
Til tess skjótt at fáa gongd á at betra umstøðurnar til almenna svimjing og kappingarsvimjing í høvuðsstaðarøkinum, verður bygginevndin til 50 m svimjihyl tikin av, og í staðin verður serstøk nevnd við tilvísing til fíggjarnevndina sett at gera allar neyðugar fyrireikingar til bygging av svimjihøll, herundir at:

- Gera neyva tørvslýsing av nýggjari svimjihøll til almenna svimjing og kappingarsvimjing, herundir lýsing av, hvussu verandi svimjihallir í høvuðsstaðarøkinum kunnu nýtast til at nøkta partar av nýtslutørvinum
- Gera uppskot til staðseting av nýggjari høll
- Gera byggiskrá til verkætlan, herundir hølistørv, teknisk krøv og orkukrøv
- Gera kostnaðarmeting og tíðarætlan fyri bygging
- Gera rakstrarætlan, t.e. roknað meting um árligar rakstrarkostnaðir
- Gera uppskot til fígging, herundir møguleikar at fáa til vega fígging frá uttanhýsis pørtum

Serstaka nevndin fyri bygging av svimjihøll verður mannað við politiskum umboðum og umboðum fyri trivnaðarfyrisitingina og teknisku fyrisiting. Fíggjarnevndin setir nevndina, sum í

minsta lagi 2. hvønn mánaða leggur statusfrágreiðing fyri mentamálanevndina og fíggjarnevndina, ið skal góðkenna arbeiðið.

**Býráðsfundir 23. apríl 2015:** Samtykt við 10 atkvøðum fyri og ongari ímóti, at seta serstaka nevnd undir fíggjarnevndini at fyrireika nýggja svimjihøll við omanfyristandandi arbeiðssetningi og at velja Elin Lindenskov og Annfinn Brekkstein í nevndina.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørg Dam, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Rúni Djurhuus, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen.

Greiddu ikki atkvøðu: Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur 23. mai 2016 samtykt byggiskrá fyri byggiverkætlanina. Byggiskráin er hjáløgd sum fylgiskjal 1 og svarar hon uppá settu spurningarnar og punktini.

Tó viðv. spurninginum um lýsing av, hvussu verandi svimjihallir í høvuðsstaðarøkinum kunnu nýtast til at nøkta partar av nýtslutørvinum, er at viðmerkja:

Tórshavnar kommuna hevur fylgjandi svimjihallir:
1). Svimjihøllin í Kollafjarðar skúla.
Verður brúkt bæði til skúlar og stovnar og er opin fyri almenninginum fleiri dagar um vikuna og alt skúlaárið. Høllin tænir einum lokalum endamáli burturav og er ikki upplagt at broyta nakað tí viðvíkjandi. Høllin er í góðum standi.

2). Svimjihøllin í eindini á Argjavegi hjá Skúlanum á Fløtum (gl. Argja Skúla). Verður brúkt burturav til skúlabrúks. Framtíðin er nógv tengd at, hvussu verður við eindini á Argjavegi tá Skúlin á Fløtum er liðugur í 2020. Uppskotini, ið hava verið nevnd eru til annað kommunalt endamál, so sum innan eldraøkið og hevur Nám X eisini verið nevnt, tó so at í løtuni verður arbeitt út frá, at Nám X fer inn í Handilsskúlabygningin. Alt eftir hvat framtíðar endamálið verður, skal støða takast til, um hylurin framhaldandi skal verða í brúki, ella hølið verður brúkt til annað endamál. Er ynski at minka um rakstrarkostnaðir er viðkomandi at taka støðu til at niðurleggja henda hylin. Høllin er í góðum standi.

3). Svimjihøllin í Hesti. Verður vanliga brúkt summarmánaðirnar. Ikki nøkur ætlan fyribils um nakra broyting. Høllin er í hampiligum standi.

4). Svimjihøllin í Eysturskúlanum. Hylurin verður brúktur til skúlabrúks umframt til kvøldskúla og aðra undirvísing. Mælt verður til at halda fram við honum óbroytt. Er serliga áhugaverd til ymiskar sertørvir, umframt skúlabrúks. Er ynski at minka um rakstrarkostnaðir er viðkomandi at taka støðu til at niðurleggja henda hylin, ið annars er í góðum standi.

5). Svimjihøllin í Gundadali. Er nógv brúkt til alskyns endamál.

Undangóðkenning av ráðgevaratoymum
Umsitingin er í holt við at fyrireika undangóðkenning av ráðgevaratoymum til eina møguliga hugskotskapping, sum ætlandi fer í gongd um miðjan juni og gongur fram til oktober.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjóri, býarakitekturin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja
byggiskránna og at beina málið í býráðið, umvegis byggi- og býarskipanarnevndina, teknisku nevndina, náttúru- og umhvørvisnevndina og fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 25. mai 2016:** Útsett.

**Ískoyti**
Sbrt. Býráðssamtykt 23. apríl 2015 er talan um eina serstaka nevnd, sum vísir til fíggjarnevndina. Av teirri orsøk verður viðgerðin av byggiskránni at byrja í fíggjarnevndini, sum so beinir málið víðari til aðrar nevndir, áðrenn endaliga viðgerð í fíggjarnevndini og hareftir býráðsviðgerð.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla fíggjarnevndini til at samtykkja byggiskránna og at beina málið í býráðið umvegis mentamálanevndina, byggi- og býarskipanarnevndina, teknisku nevndina, náttúru- og umhvørvisnevndina.

**Fíggjarnevndin 08. juni 2016:** Samtykt at taka undir við byggiskránni og beina málið í býráðið umvegis mentamálanevndina, teknisku nevnd, byggi- og býarskipanarnevndina og heilsu- og umhvørvisnevndina.

**Tekniska nevnd 13. juni 2016:** Samtykt at taka undir við byggiskránni.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 14. juni 2016:** Samtykt at taka undir við byggiskránni.

**Mentamálanevndin 15. juni 2016:** Samtykt at taka undir við byggiskránni.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 16. juni 2016:** Samtykt at taka undir við byggiskránni.

**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Hugskotskappingin fyri langhyl í Gundadal var útskrivað í august 2016, eftir at Tórshavnar býráð 16. juni 2016 hevði samtykt byggiskránna fyri langhyl í Gundadali.

Trý ráðgevaratoymi vóru undangóðkend til at luttaka í hugskotskappingini.

Tey eru:
- Toymið Ósbjørn Jacobsen Ark.
- Toymið SNA Ark.
- Toymið Árni Winther Ark.

23. november 2016 lótu toymini inn síni boð uppá loysn og vóru tey latin navnloynt soleiðis, at dómsnevndin ikki visti, hvat toymið átti hvat uppskot.

2. desember 2016 hevur dómsnevndin gjørt úrskurð og tilmæli í málinum um, hvat uppskot skal vinna hugkappingina og fáa møguleika at innganga møguliga avtalu um projektering vm. Sí hjálagt dómsúrskurðin.

Hetta mál er tengt at máli 16/01715 Avtala við Ítróttasamband Føroya um ÍSF-húsið vm., ið eisini er til viðgerðar í løtuni.

Á løgukonto 5775 L5610 eru umleið 7.000 tkr. tøkar til verkætlanina. Ætlanin er í næstum at fara undir nærri greiningar og samráðingar við vinnandi hugskotið og koma aftur til nevndarviðgerð við nærri greining av heildarkostnaði, tíðarætlan, útboðsleisti og fíggjarætlan.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, mentamálaleiðari og býararkitekurin mæla mentamálanevndini til at staðfesta úrskurðin hjá dómsnevndini um vinnandi hugskotið og at heimila umsitingini til at fara undir samráðingar við vinnandi ráðgevaratoymið í dómsúrskurðinum um møguliga projektering, umframt gerð av tíðarætlan, útboðsleisti, fíggjarætlan vm. og venda aftur til nevndina við einum uppskoti. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 6. desember 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 07. december 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 15. desember 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Mælt verður til at skipa bygginevnd í sambandi við nýggja langhylin samsvarandi vanligu mannagongdini fyri verkætlanir, har býráðið velur 2 limir.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mælir býráðnum til at velja tveir limir í bygginevndina fyri nýggjum langhyli.

**Býráðsfundur 26. januar 2017:** Tikið av skrá.

**Býráðsfundur 02. mars 2017:** Vald vórðu Bergun Kass og Heðin Mortensen.

**Ískoyti:**
Tekstur kemur mánadagin.

**Ískoyti:**
Á løgukarminum fyri 2017 eru játtaðar 4.798 tkr. á konto 5775 mentan og frítíð.

Í fjør var hugskotskapping um verkætlanina, ið toymið við SNA ark. v.fl. vunnu. Sbrt. kappingartreytunum fingu tey bæði toymini sum luttóku, men ikki vunnu, 200 tkr. fyri luttøkuna.

Seinni í heyst kemur ætlandi til viðgerðar uppskot til sáttmála við vinnandi ráðgevaratoymið um projektering av verkætlanini.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at játta 420 tkr. av løgukarminum konto 5775, mentan og frítíð á projektkonto L57015 Svimjihøll. Málið verður beint í býraðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 16. oktober 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 15. november 2017:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 22. november 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**:
Tekstur kemur til fundin.

**Mentamálanevndin 10. januar 2018:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**:
Tekstur kemur mánadagin.

**Ískoyti**
Serstaka nevndin fyri langhyl hevði fund 7. feb. 2018.

Soleiðis var ført í fundarfrásøgnina: "*3. Viðv. tíðarætlan og samráðingunum um projekteringssáttmála. Uppskot um projekteringssáttmála umleið 7 mió. kr. Tøkar eru umleið 4,5 mió. kr. í løgukarminum í 2017. Tað, sum er á karminum, er ikki flutt í 2018 enn. Hinvegin, hvat ið er tøkt, verður vantandi endaligt í mars 18. Stjórnin metir, at projektið eigur at vera forskotið, til fíggingin er tøk til samlaðu projekteringina og rúm er í íløguætlanini fyri byggikostnaðinum. Fundur hevur verið við SNA-toymið um at forskjóta projektið til ársskiftið 18/19. Málið verður lagt fyri mentamálanevndina á einum komandi fundi. Fyribils meting hjá teknisku fyrisiting er, at projektering tekur umleið 1 ár (við fyrivarni) + útbjóðing 2-3 mánaðir.*

*Heðin Mortensen metir ikki, at projektið eigur at útsetast, tí 4,5 mió. kr. eru avsettar í 2017, og eiga at verða fluttar yvir í 2018. Við at avseta restfígging í 2019, verður komið á mál við projekteringini. Síðani avseta pening til bygging av svimjihøllini á íløguætlanini fyri komandi árini."*

Fráboðað er Havnar Svimjifelag og Svimjisamband Føroya at projektering ætlandi verður planløgd at byrja um árskiftið 2018/19. Í sambandi við gerð av fíggjarætlan fyri 2019 verður ætlandi gjørt eitt uppskot til fíggingarætlan fyri projektering og bygging av langhyli. Vent verður aftur í nevndina við málinum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka undir við at projekteringin verður sett at byrja um ársskiftið 2018/19 og at fígging til projektering og bygging verður tikin upp í sambandi við fíggjarætlan 2019.

**Mentamálanevndin 07. mars 2018:** Ein meiriluti, Turið Horn, Marin Katrina Frýdal og Bergun Kass tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Bjørghild Djurhuus, krevja málið fyri býráðið.

**Býráðsfundur 22. mars 2018:** Heðin Mortensen, Odd Færø, Bjørghild Djurhuus, Bjørg Dam, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein seta fram soljóðandi broytingaruppskot:

Mælt verður til, at projekteringin av langhylinum fer í gongd beinanvegin, at 4,5 mió. kr., avsettar á fíggjarætlanini 2017, verða fluttar til fíggjarárið 2018, og at restfígging, umleið 2,5 mió. kr. at fíggja projekteringina, verður avsett í sambandi við fíggjarætlanararbeiðið 2019.

Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskotið, ið fall við seks atkvøðum fyri og sjey ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Odd Færø, Annfinn Brekkstein, Halla Samuelsen, Bjørghild Djurhuus og Bjørg Dam.

Ímóti: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass og Jógvan Arge.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá meirilutanum í mentamálanevndini, ið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri, fimm ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass og Jógvan Arge.

Ímóti atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Halla Samuelsen, Bjørg Dam, Bjørghild Djurhuus og Heðin Mortensen.

Blankt atkvøddi: Odd Færø.

**Ískoyti**
Á løgukarminum 5775 mentan og frítíð fyri 2018 eru framfluttar 5.029 tkr. Umsitingin er í holt við at samráðast um ráðgevarasáttmála við vinnandi ráðgevaratoymið og kemur ætlandi í nevnd við málinum í oktober/november 2018 soleiðis at projekteringin kann byrja í desember 2018/januar 2019. Tørvur er at hava tøkan pening á projektkontuni í sambandi við samráðingarnar v.m., ið er í gongd í løtuni.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at játta 5.029 tkr. av løgukarminum konto 5775, mentan og frítíð á projektkonto L57015 Svimjihøll. Málið verður beint í býraðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 12. september 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Heðin Mortensen og Turið Horn vóru ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 19. september 2018:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. september 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
**UPPSKOT Í GERÐ!!!!!**

Serstaka nevndin (bygginevndin) fyri gerð av langhyli, hevur á fundi 16, 20 og 2x. november 2018 samtykt at taka undir við samráðingarúrslitinum frá samráðingunum um ráðgevarasáttmála við vinnandi SNA samtakið, ið fevnir um SNA umframt LBF og SMJ. Bygginevndin mælir til at høllin og hylurin verða breiðkað nakað, umframt at støða verður tikin til um verkætlanin eisini skal fevna um 2 terapihyljar.

Fylgjandi viðurskifti eru at viðgera nærri í sambandi við ráðgevarasáttmálan:

I. Stødd á langhylinum

Í sambandi við tilgongdina at gera ráðgevarasáttmála var 10. oktober 2018 fundur millum umsitingina, umboð fyri Svimjisambandið og Havnar Svimjifelag við Joaquin Pujol, formann í FINA (altjóða svimjisambandinum) Facilities Committtee um verkætlanina. Sí hjálagt fundarfrásøgn frá fundinum og niðurstøður.

Eftirfylgjandi hevur umsitingin fingið afturmelding frá Joaquin Pujol um, at frásøgnin er rættvísandi, og avtalað er, at tá nýtt skipanaruppskot er tøkt, ætlandi í fyrsta ársfjórðingi 2019, verða nýggj frágreiðing og tekningar sendar FINA til viðmerkingar, har støða er tikin til ymisku viðurskiftini, sum vórðu viðgjørd á fundinum í okt. 2018. Herundir sonevnt flow í høllini í sambandi við kappingar, um pláss til áskoðarar, miðlar, VIP etc. og um karmar til sjónvarp, lýsingar o.a.

Við støði í samskiftinum við FINA hevur bygginevndin viðgjørt, hvørt tað er hóskandi at breiðka hylin og høllina nakað. Semja er um, at tað er mest hóskandi at hava 10 geilar á 2,5 m. hvør, í staðin fyri 8 geilar á 2,5 m. umframt 0,5 m. skvatligeil í hvørjari síðu. Við hesi broyting verður hylurin betri egnaður til kappingar, umframt at hann fær enn betri nyttuvirði í mun til dagligu og fjølbroyttu nýtsluna hesi komandi 3-4 áratíggjuni. Vansin við hesi broyting er, at hylurin gerst størri, og harvið eisini vatnnøgdin, ið skal hitast og viðgerast størri, umframt at høllin gerst tilsvarandi breiðari. Nevndin er samd um at longdin framhaldandi verður 50 m., umframt 1 m. afturat til eina flytiliga brúgv, so til ber at býta hylin uppá ymiskan hátt bæði til 25 m. langar geilar og samansett 25 m./50 m. langar geilar.

Annað týðandi høvuðsmál er, at høllin má gerast nakað breiðri enn í verandi støðu. Hetta serliga við atliti til at kunna seta upp fyribils áskoðarapláss (rúma fleiri áskoðarum til serligar kappingar), pláss til officials, sjónvarping, lýsingar o.a. Í tí dagliga kann øki brúkast til venjingar, upphiting, avseting o.a. Samanlagt verður høllin breiðkað til umleið 46 m. Á hjáløgdu mynd sæst, hvussu bygningurin fyllir byggiøkið í plan. Kostnaðurin av hesi broyting er í lýstur í skjali x.

II. Nýggjur innandura smábarnahylur/terapihylur og uttandura terapihylur

Í kappingaruppskotinum, ið vann, var á tekningunum lýst ein loysn við uttandura terapihyli, umframt einum serligum heitvatns-terapihyli innandura í millumøkinum millum bygningarnar. Hesin er serliga hugsaður til smærri børn, umframt til onnur, ið ynskja møguleikan at vera í einum serliga heitum hyli við terapi og vælveru í huga. Hugsanin er, at rúmið skal vera

lutfalsliga lágt og tætt, soleiðis at tað er lættari at halda ein høgan hita. Meirkostnaðurin av uttandura terapihylinum og innandura terapihylinum eru lýstir í skjali x.

Bygginevndin metir at gerð av hesum báðum ískoytisverkætlanum er áhugaverd í sambandi við at umgera Svimjihøllina til ein vatndepil við vælveru, rørslu og kappingum.

III. Fleiri brúsur og skiftirúmsviðurskifti

Í byggiskránni er viðgjørt viðv. táverandi heitvatnsskipan til brúsurnar og tørv á fleiri brúsum.

Í 2017 bleiv heitvatnsskipanin til brúsurnar endurnýggjað. Í 2019 er ætlanin at greina møguleikarnar fyri útbyggingum við fleiri brúsum (óheft av langhylsverkætlanini). Miðrúmini í skiftingarrúmunum, har tað áður vóru sólir, kunnu umgerast soleiðis, at har ber til at gera fleiri brúsur. Í 2018 eru skápini í skiftingarrúmunum endurnýggjaði, og ber lutfalsliga lætt til at økja um talið av skápum. Eisini eru viðurskiftini hjá fólki, ið bera brek, og sum hava tørv hjálp til skifting o.a. tørv á at gerast betri í verandi høll. Hetta verður eisini tikið upp í 2019.

III. Ráðgevarasáttmálin og kostnaður

Hjálagdur er uppskot til sáttmála við tilhoyrandi fylgiskjølum. Samlaða upphæddin fyri projektering er ásett til tkr. 11.500. Í hjálagda skjali er greining mettu av kostnaðarviðurskiftunum fyri verkætlanina við teimum ymisku valmøguleikunum.

Verður avgjørt at verkætlanini eisini skal geva um báðar terapihyljarnar hækkar kostnaðurin fyri projektering til tkr. 12.400.

Umframt sáttmála við SNA-samtakið, er ætlanin at hava tilknýttar 2 byggiharraráðgevar t.e. Sp/f Ráð til almenna byggiharraráðgeving og byggileiðslu í sambandi við bygginingina, umframt DTI til ráðgeving og eftirlit í sambandi við hylja- og vatntøkniveiting. Hædd er tikin fyri hesum í kostnaðarmetingini.

Á løgukontu L57015 Svimjihøll eru umleið 4,9 mio.kr. tøkar til projektering o.a. Tørvur er á umleið 4 mio.kr. afturat í 2019 til projektering.

Sbrt. tíðarætlanini byrjar projektering í desember 2018 og gongur fram til á várið 2020. Hareftir skal støða takast til útbjóðing og er hugsandi at bygging kann byrja í august 2020.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararkitekturin, deildarleiðarin á verkætlanardeildini og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja:

a). at hylurin og høllin verða breiðkað

b). og mæla nevndini til at ráðgevarasáttmálin fevnir um projektering av uttandura heitvatnshyli og innandura heittvatns/terapihyli, og við teimum tillagingum at innganga ráðgevarasáttmála við SNA-samtakið um projektering av langhyli. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 28. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 05. desember 2018:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Ískoyti:**
Neyva sáttmálaupphæddin fyri ráðgevarasáttmálan (sbrt. samtykt í mentamálanevndini og fíggjarnevndini) er kr. 12.346.671.

**Býráðsfundur 13. desember 2018:** Einmælt samtykt.

# 313/18 Virknishøll í Finsen

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 03.05.2017 | 107/17 | 17/01362-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 15.06.2017 | 174/17 | 17/01362-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 10.01.2018 | 5/18 | 17/01362-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 28.11.2018 | 357/18 | 17/01362-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 05.12.2018 | 352/18 | 17/01362-1 |
| 6 Mentamálanevndin | 16.01.2019 | 4/19 | 17/01362-1 |
| 7 Býráðsfundur | 13.12.2018 | 313/18 | 17/01362-1 |

**Málslýsing:**
Í samgonguskjalinum er m.a. ásett: "**Framsøknan ítróttarpolitikk -** Ítróttur og rørsla hava stóran týdning fyri trivnaðin í kommununi. Møguleikarnir fyri ítrótti verða áhaldandi útbygdir bæði fyri breiddina og úrvalsítrótt."

Nú Finsen í næstum verður liðugt, er hugsan frammi um at lata niðaru fimleikahøllina í Finsen (fyrrv. kommunuskúlanum) til virknis- rørsluendamál. Sí hjálagdar myndir og tekning av hølunum.

Høllin er partur av høvuðsumvælingin av Finsen til lestrarbústaðir hvat viðvíkur útveggum, vindeygum og taki, men er annars ogn hjá kommununi. Høllin fær hita frá Finsen. Samráðingar eru í gongd við Bústaðir um bygningsviðlíkahald uttan, hita o.a.

Skotið verður upp at høllin verður í dagtíð tøk hjá skúlanum og frítíðarskúlanum hjá Eindini í Kongagøtu hjá Skúlanum á Fløtum og frítíðarskúlanum í Sankta Frans skúla, umframt dagstovnum í økinum. Høllin kundi eisini í dag verið tøk hjá eldraøkinum at brúkt til virknistiltøk hjá Heilsuhúsinum. Eftir uml. kl. 16 ella 17 kundi høllin verið tøk at leiga hjá borgarum, fyritøkum o.s.fr., ímóti gjaldi at kunna brúka høllina til alskyns spæl, ítrótt, rørslu o.a., t.d. til fótbólt, kurvabólt, flogbólt, fimleik og aðra likamsvenjing.

Í sunnara enda av høllini er eitt goymslurúm, sum kann rúma ymiskum reiðskapi, tólum o.ø. Í norðara enda eru eisini rúm. Høllin kemur at vera hædd um hædd við virksemi á ovaru hæddini og er málið at hesi kunna og megna at virka lið um lið.

Sbrt. núverandi praksis vildu skúlarnir og frítíðarskúlarnir ikki rindað fyri nýtslu, meðan aðrir brúkarabólkar/eindir vera at rinda ásett tímagjald sbrt. galdandi gjaldsskrá hjá Ítróttaanleggum. Bílegging v.m. vildi farið fram á www.hallirvallir.fo. Hugsanin er at høllin sum útgangsstøði ikki verður disponerað til fast virksemi hjá t.d. hondbólts-, flogbólts- og fimleikafeløgunum.

Samskift hevur verið við teknisku fyrisiting/Húsaumsitingina um standin av hølunum v.m. Ætlanin er at halda fram við greiningunum og fáa endaliga avkláring í mai 2017. Sannlíkt er at ávísir kostnaðir eru av at fáa høllina brúkiliga.

Á fundinum kemur umsitingin at greiða nærri frá fyribils metingum viðv. uppstartskostnaðum og rakstri av hølunum, umframt WC-bygninginum, ið er partur av hallunum. Málið er at raksturin í stóran mun kann verða fíggjaður av leiguinntøkum frá brúkarum.

Henda verkætlan vil innibera at verkætlanin um innandura spæliland í hallunum í Finsen (mál 16/02253) verður slept í hesum umfari.

Við hesi verkætlan ber til at fáa eitt viðkomandi virknishøli miðskeiðis í býnum, tøk til grannalagi, tey lesandi í Finsen, býin sum heild og soleiðis eitt nú stuðla undir visjónina um tann virkna og vakna høvuðsstaðin.

Um neyðugu fyritreytirnar eru til staðar er sannlíkt, at høllin kundi latið upp í heyst.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini at viðgera og samtykkja, um farast skal víðari við fyrireiking av verkætlan um virknishøll í Finsen

**Mentamálanevndin 03. mai 2017:** Samtykt at farast skal víðari við fyrireiking av verkætlanini. Nevndin mælir til at kanna í hvønn mun til ber at hava atgongd til frítt spæl ávísa tíð í vikuni.

**Ískoyti:**
Tekstur kemur mikudagin.

**Mentamálanevndin 15. juni 2017:** Útsett.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur saman við ráðgeva fyrireika arbeiðsætlan og kostnaðarætlan fyri virknishøllina. Sí hjálagt kostnaðarmeting, umframt skitsur. Talan er um metingar, ið skulu takast við ávísum fyrivarni. Eisini hevur verið samskift við Byggi- og umhvørvisdeildina viðv. fyritreytum og krøvum um í mun reglurnar í byggikunngerðini fyri Føroyar.

Samanlagt er samlaða metingin fyri hondverkaraútreiðslur (HVÚ) 1.458 tkr., umframt ráðgeving (ca. 6% av HVÚ) og ókent (ca. 15% av HVÚ) og MVG (6,25% av øllum postum). Hugsanin er at starvsfólk hjá Ítróttaanleggum kunnu gera nakað av arbeiðinum og sostatt spara nakað í metingini, umframt at møguliga eru einstakir postar sum kunnu takast út.

Málið hongur lutvíst saman við máli 16/03404, ið eisini er á skrá á fundinum og har tilmæli er at flyta uml. 941 tkr. frá aðrari verkætlan til hesa. Tískil vantar nakað av fígging til at kunna fremja verkætlanina.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at viðgera metingina við atliti til at umsitingin kemur við endaligum tilmæli um verkætlanina og fíggingina til komandi fund.

**Mentamálanevndin 10. januar 2018:** Málið umrøtt.

**Ískoyti:**
Sbrt. avtaluni við Bústaðir um Finsen skal TK taka sær av lonini har hallirnar eru.

Tilmæli um hallirnar er enn í gerð og er væntandi til komandi fund, bæði viðv. virknishøll og listaverkstøðum.

Samstundis rykkir Bústaðir eftir, at ljós kemur í serliga skrellirúmið, vesirúmið og almenna garðin og metir hetta ikki kann bíða. Eisini er støðan at hallirnar standa kaldar og eru ikki íbudnar hita í verandi støðu. Í áður gjørdari meting, er HVS -(útskifta radioatorar, montering o.a). arbeiðið mett til 50 tkr.

Íbinding hjá SEV, talva, montering, o.a. er mett til 94 tkr. til samans. Við tí fæst ljós í bygningin, skrellirúmið, vesirúmið og almenna garðin. Afturat upphædddunum skal roknast umleið 10% til eftirlit o.a., 10% til ókent, umframt kommunalt MVG. Tilsamans mett til 182 tkr. Húsaumsitingin og verkætlanardeildin samstarva um verkætlanina og at fáa arbeiðstakarar at útinna arbeiðið.

Á framflutta løgukarminum L00002 eru 1.051 tkr. tøkar til verkætlanina í hallunum í Finsen.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, deildarleiðarin á verkætlanardeildini, deildarleiðarin á Húsaumsitingini og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at heimila umsitingini at fremja el&hvs arbeiði í Finsen og at flyta 1.051 tkr. á nýggja løgukontu til hallirnar í Finsen. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 28. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 05. desember 2018:** Samtyk at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 13. desember 2018:** Einmælt samtykt.

# 314/18 Umstøðurnar kring tennisøkið í Gundadali

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 27.08.2018 | 249/18 | 18/01726-4 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2018 | 257/18 | 18/01726-4 |
| 3 Fíggjarnevndin | 05.12.2018 | 351/18 | 18/01726-4 |
| 4 Býráðsfundur | 13.12.2018 | 314/18 | 18/01726-4 |

**Upprunin til málið:**
Umsókn frá Havnar Tennisfelag (HTF)

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Felagið ynskir at fáa endurnýggjað og betra um karmarnar fyri virksemi felagsins í Gundadali, herundir nýggja breyt, goymslu, ljós o.a.

Felagið er upprundaliga stovnað í 1934, men í longri tíðarskeið var onki virksemi inntil felagið var endurreist í 1996, tá hevði tennisvirksemi verið nøkur ár skipað innan Havnar Badmintonfelag á nýggjum tennisvallunum í Gundadali frá 1990. Vallirnir eru at kalla óbroyttir síðani tá og metir felagið at tíðin nú er komin at betra um karmarnar. Felagið hevur júst mannað nevndina av nýggjum og nýggjur høvuðsvenjari er settur í eitt ár, ið skal taka sær av regluligum venjingum summar og vetur, umframt gera fyrireikingar til Oyggjaleikirnar 2019. Eitt sersamband Tennissamband Føroya er sett á stovn í samráð við ÍSF. Ætlandi verður FM aftur skipað og ymisk átøk fyri at fáa fleiri limir afturat teimum 32 verandi limunum.

Ítøkiliga ynskir felagið at fáa gjørt fylgjandi:
- Nýtt felagshús
- Leggja graslíki á verandi vallir (verandi belægningur er ikki góður í vátum veðri) og sostatt fáa fleiri venjingartímar í árinum
- Fáa ein vøll afturat teimum báðum verandi, so fleiri fáa vant í senn
- Betra um ljósviðurskiftini, so spælast kann størri part av degnum og árinum

Uppá sikt kundi felagið hugsa sær at spurningurin um eina innandura tennishøll var tikin upp.

Felagið hevur fylgjandi uppskot til fígging:

- Graslíki leggjast á verandi vallir. HTF hevur móttikið tilboð fyri 2 vallir á 285 tkr. uttan mvg og toll. Søkt verður um at kommunan fíggjar 100 %.
- Ljósprojektørar setast upp við vallirnar. Søkt verður um at kommunan fíggjar 100 %. Ítøkilig meting er ikki gjørd enn! Eitt fyribils boð er eini 100 tkr.
- Ein vøll afturat eystanfyri verandi vallirnar. Søkt verður um at kommunan fíggjar 100 %. Neyvari meting má gerast av kostnaðinum.
- Nýtt felagshús verður bygt (sí tekningar). Eingin ítøkiligur kostnaður fyriliggur, men ein mettur prísur er 1.600 tkr. (80 m2 x tkr. 20). HTF eginfíggjar 400 tkr., svarandi til 25 %. Søkt verður um at kommunan kann stuðla við restini, uml. 1,2 mió. kr.

Umsitingin metir at í sjálvum sær er talan um eina áhugaverda og viðkomandi verkætlan, ið er ætlað at bera eina lítla ítróttagreina víðari fram á leið, bæði hvat viðvíkur hentleikum og møguleikum fyri venjing o.a. Tó so at tríggir vallir ikki eru nokk til møguligar komandi Oyggjaleikir.

Í verandi støðu eru ikki avsett játtan til gerð av nýggjum vølli, felagshúsi, meðan at ætlanin um at skifta belægning á verandi vallum møguliga kann greiðast innan raksturin hjá Ítróttaanleggum.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Ongar.
**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Mál 18/01964 Nýtt spælipláss í Gundadali og mál 16/01715 Avtala við Ítróttasamband Føroya um ÍSF-húsið v.m.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Ikki viðkomandi.

**Umhvørvisárin**
Nakað í sambandi við bygging o.a.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Málið fer ætlandi at vera viðgjørt víðari saman við Býarskipanardeildini, teknisku deild v.fl.)

**Skjøl**
Framløga um virksemi felagsins v.m.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til beina spurningin um staðseting av møguligum eyka tennisvølli og felagshúsi í byggi- og býarskipanarnevndina til viðgerðar.

**Mentamálanevndin 27. august 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Tekniska fyrisiting og trivnaðarfyrisitingin hava reist málið 18/03453 Skipan av Gundadali, ið snýr seg um at fáa uttanhýsis ráðgeva til at menna eina heildarætlan yvir ítróttaøkið í Gundadali.

Í økinum halda flestu ítróttagreinar til, og skal heildarætlanin lýsa hvussu Gundadalur kann rúma øllum virksemi á økinum, umframt møguligum nýggjum virksemi. Staðsetan av virksemi hjá tennisfelagnum er natúrligur partur av hesi heildarætlanini.

Í hesum sambandi hevur býarskipanardeildin mælt til, at uttanhýsis ráðgevin, ið kemur at standa fyri verkætlanini, skal kanna og finna uppskot til staðsetingar av virksemi hjá tennisfelagnum.

Í málinum **18/03453 Skipan av Gundadali** verður skrivað soleiðis:

*"Tennis er ein ítrótt í menning. Tennissamband Føroya er nýtt sersamband, sett á stovn í samráð við ÍSF. Havnar Tennis Felag hevur sett nýggjan høvuðsvenjara, sum skal taka sær av at gera fyrireikingar til Oyggjaleikir 2019, og ynskir Tennisfelagið at fáa endurnýggjað og betra um karmarnar fyri virksemi felagsins"*

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at samtykkja at heimila umsitingini at lata uppgávuna um staðseting av virksemi hjá Tennisfelagnum til ráðgeva, ið stendur fyri málinum "Skipan av Gundadali" og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 05. desember 2018:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina malið í býráðið.

**Býráðsfundur 13. desember 2018:** Einmælt samtykt.

## 315/18 Avtala við Ítróttasamband Føroya um ÍSF-húsið vm.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 15.06.2016 | 176/16 | 16/01715-2 |
| 2 Mentamálanevndin | 17.10.2016 | 266/16 | 16/01715-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 07.12.2016 | 405/16 | 16/01715-2 |
| 4 Mentamálanevndin | 02.11.2016 | 281/16 | 16/01715-2 |
| 5 Mentamálanevndin | 30.11.2016 | 309/16 | 16/01715-2 |
| 6 Fíggjarnevndin | 22.02.2017 | 29/17 | 16/01715-2 |
| 7 Mentamálanevndin | 15.03.2017 | 46/17 | 16/01715-2 |
| 8 Býráðsfundur | 20.06.2017 | 169/17 | 16/01715-2 |
| 9 Mentamálanevndin | 13.09.2017 | 206/17 | 16/01715-2 |
| 10 Mentamálanevndin | 04.10.2017 | 236/17 | 16/01715-2 |
| 11 Mentamálanevndin | 08.11.2017 | 276/17 | 16/01715-2 |
| 12 Mentamálanevndin | 29.11.2017 | 311/17 | 16/01715-2 |
| 13 Mentamálanevndin | 07.03.2018 | 83/18 | 16/01715-2 |
| 14 Mentamálanevndin | 06.06.2018 | 189/18 | 16/01715-2 |
| 15 Byggi- og býarskipanarnevndin | 15.08.2018 | 176/18 | 16/01715-2 |
| 16 Mentamálanevndin | 12.09.2018 | 264/18 | 16/01715-2 |
| 17 Mentamálanevndin | 03.10.2018 | 296/18 | 16/01715-2 |
| 18 Mentamálanevndin | 28.11.2018 | 348/18 | 16/01715-2 |
| 19 Mentamálanevndin | 10.12.2018 | 378/18 | 16/01715-2 |
| 20 Fíggjarnevndin | 13.12.2018 | 372/18 | 16/01715-2 |
| 21 Býráðsfundur | 13.12.2018 | 315/18 | 16/01715-2 |

**Málslýsing:**
Sum liður í framtíðar gerð av langhyli (50 m.) (sí mál 15/01400 – Serstøk nevnd at fyrireika nýggjan svimjihyl) við síðuna av Svimjihøllini í Gundadali, hevur umsitingin innleiðandi havt dialog við Ítróttasamband Føroya (ÍSF) um møguliga niðurtøku av ÍSF-húsinum, ið stendur á kommunalum lendi matr. 1268 í Gundadali. Leiguavtalan er frá 1975 (sí hjálagt fylgiskjal 1 á nevndarportalinum).

Gjørt er uppskot til keypsavtalu (sí hjálagt fylgiskjal 2 á nevndarportalinum). Tó viðv. keypsupphædd ella endurgjald fyri niðurtøkuna hevur ikki verið nøkur realitetsviðgerð. Fyri at fáa ásett eina upphædd eru tvinnir møguleikar. Hin fyrri at samráðast til eina semju og hin seinni er sbrt. ásetingum í leiguavtaluni at biðja Sorinskrivarin um at tilnevna tveir metingarmenn sum so áseta eina bindandi upphædd.

Harumframt er gjørt uppskot til ætlanarskriv um staðseting av framtíðar ÍSF-húsi (sí hjálagt fylgiskjal 3 á nevndarportalinum). Her er nevnt viðv. møguleika fyri at byggja nýtt høvuðssæti omaná Fimi í Gundadali, sbrt. nærri treytum um byggistig, byggisnið, gjald fyri íbindingar vm. Hesin rættur skal vera galdandi í ávíst áramál.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, løgdeildarleiðarin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða spurningin um framtíðar staðseting í Gundadali og at heimila umsitingini at fara undir samráðingar um endurgjaldsupphædd antin við samráðingum ella metingarmonnum.

**Mentamálanevndin 15. juni 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum um samráðing.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur samráðst við ÍSF og er nú komið ásamt um eina keypsavtalu og ætlan um leigu av byggigrund omaná Fimi innan nærri ásett áramál. Alt hetta treytað av at undirtøka var fyri hesum í nevndum og býráðnum og á aðalfundi hjá ÍSF.

Hjálagt eru dagført skjøl við støði í fundinum og teirri semju viðv. endurgjaldi fyri ÍSF-húsini.

Keypið skal fíggjast á løgukarminum fyri 2018.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og løgdeildarleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja uppskot til keypsavtalu og uppskot til ætlanarskriv um leigu av byggigrund omaná Fimi og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 17. oktober 2016:** Útsett.

**Mentamálanevndin 02. november 2016:** Útsett.

**Mentamálanevndin 30. november 2016:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson og Sigrún Mohr, tekur undir við at gera keypsavtalu fyri í mesta lagi kr. 4 mió, men tekur ikki undir við at leiga ÍSF byggigrund omaná Fimi.

Ein minniluti, Jógvan Arge, mælir til, at málið verður lagt fyri nýggja býráðið til støðutakan.

Helena Dam á Neystabø var ikki við í viðgerðini.

**Fíggjarnevndin 07. december 2016:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 22. februar 2017:** Samtykt at beina málið í mentamálanevndina.

**Ískoyti**
Nú er nakað fráligið síðani samráðingarnar við ÍSF. Mett verður hóskandi at fara undir eina nýggja tilgongd og har kanna nærri um aðrar staðsetingar eru møguligar umframt bygging omaná Fimi.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at heimila umsitingini at fara undir nýggjar samráðingar við ÍSF við atliti til keypsupphædd o.a. fyri verandi ÍSF-hús og møguligar framtíðar staðsetingar av virkseminum hjá ÍSF.

**Mentamálanevndin 15. mars 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 20. juni 2017:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**
Býarskipanardeildin/tekniska fyrisiting hevur gjørt eina sonevnda volumenkanning viðv. í hvønn mun eitt møguligt ÍSF-hús yvirskipað kann rúmast á ymiskum støðum í Gundadali. Dømini eru at síggja í hjáløgdu fílu.

Á fundinum kemur umsitingin at greiða frá uppskotunum. Ætlandi halda samráðingarnar við ÍSF fram í september og ætlandi kann ein loysn leggjast til støðutakan í oktober.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðari mæla mentamálanevndini til at umrøða uppskotini við atliti til at umsitingin heldur fram við samráðingunum við ÍSF.

**Mentamálanevndin 13. september 2017:** Útsett.

**Mentamálanevndin 04. oktober 2017:** Umrøtt.

Halla Samuelsen ynskir at ÍSF verður boðið á fund við mentamálanevndina at greiða frá sínu støðu.

Heðin Mortensen var ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Ískoyti 8. november 2017**
Greitt verður frá fyribils status í samráðingunum og fráboðan frá ÍSF um, hvørji støð tey nú ynskja at realitetsforhandla um.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða málið við atliti til at umsitingin heldur fram við samráðingunum.

**Mentamálanevndin 08. november 2017:** Útsett.

**Mentamálanevndin 29. november 2017:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Turið Horn og Marin Katrina Frýdal, mælir til at arbeiða víðari við eini loysn frá vestara skýli oman móti niðara vølli sum fyrsta val.

Halla Samuelsen ynskir at ÍSF verður boðið á fund við mentamálanevndina at greiða frá sínu støðu.

**Ískoyti**
Fyri at kunna lýsa eini loysn frá vestara skýli oman móti niðara vølli er neyðugt at gera eitt sonevnt volumenstudie, har kannað verður um økið rúmar einum nærri hugsaðum bygningi. Býarskipanardeildin hevur ikki orku til at gera arbeiðið í løtuni. Fyri at koma víðari er hugsanin at biðja uttanhýsis ráðgeva um at gera arbeiðið. Er mett til ca. 2 dagar. Ætlanin er at at fáa uttanhýsis ráðgeva at gera kanningina og at tað verður fíggjað 50%/50% millum kommununa og ÍSF. Útreiðslurnar hjá kommununi vera fíggjaðar av konto 5365 Stuðul til ítrótt.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka kunningina til eftirtektar.

**Mentamálanevndin 07. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Í mun til tilmæli seinast er tann broyting, at ÍSF sjálvt átók sær at gera eitt uppskot saman við ráðgeva sínum Sp/f MAP ark. Sí hjálagt uppskot frá ÍSF. ÍSF hevur í hyggju innleiðandi at umrøða uppskotið við HB og B36, ið eru tveir høvuðsáhugapartar í mun til ovara vøll og skýlið.

Eftir umrøðuna í mentamálanevndini verður spurningurin um staðseting við ovaravøll í Gundadali beindur til viðgerðar í Bygg- og býarskipanarnevndini. Hareftir verða møguligar samráðingar við ÍSF tiknar uppaftur.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða uppskotið og at samtykkja at beina spurningin um staðsetingna til viðgerðar í Byggi- og býarskipanarnevndini.

**Mentamálanevndin 06. juni 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í teknisku nevnd eisini.

**Ískoyti:**
Ítróttarøkið í Gundadali er karmur um fleiri ítróttargreinar og aktivt virksemi, sum støðugt veksur, og ynskini um betri umstøður, ábøtur ella nýggjar funktiónir vaksa somuleiðis alsamt meira. Plásstrot er í Gundadali, men fleiri møguleikar eru at víðka um virksemi, anlegg og útbyggingar/nýbyggingar.

Tá talan er um nógv ymiskt virksemi og bygging innan eitt avmarkað øki, so er neyðugt at hyggja at, hvørjir møguleikar eru at sameina nýbygging við verandi bygging, soleiðis at meira lendi ikki verður tikið til nýbyggingar. Gott er at hava «luft» rundan um og ímillum ymsu bygningarnar, hetta m.a. til gøtusamband, parkering og fríøki.

Nógvar ábøtur eru gjørdar í Gundadali, men enn eru nakrir bygningar, ið kundu verið umvældir. M.a. er tað skýlið á vestursíðuni við ovara vøll, sum í dag er ein baksíða út ímóti býnum. Skýlið er eyðkent við eini langari einsháttaðari framsíðu upp at einum óskipaðum parkeringsplássi. So heldur enn at spjaða meiri bygging í økinum, er eyðsýnt at staðseta og flætta saman nýtt ÍSF við verandi skýlið, soleiðis at alt økið verður skipað og fríðkað um. Hetta er ein leistur, ið átti at verið nýttur í sambandi við framtíðar víðkanir og ábøtur í Gundadali, tí fleiri møguleikar eru at gagnnýta pláss, har tað samstundis verður betra um verandi øki.

Ítróttasamband Føroya er somuleiðis høvuðssætið fyri alla ítróttina, tískil er staðsetingin og nógva plássið í økinum væl egnað til ein miðdepil, sum ÍSF er. Verandi atkoma til økið gerst samstundis til eina greiða høvuðsinngongd til Gundadal, umframt at ÍSF fær útsýnið út yvir alt ítróttarøkið - og ítróttina.

Nýggja staðsetingin er partur av ítróttaøkinum í Gundadali, og er tí fevnt av umráðispartinum D2 í Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, har ásetingarnar eru:

> *3. Umráðispartarturin D2 verður kannaður ítrótti og øðrum, sum eftir eini heildarætlan fyri alt økið ella ein part av økinum kann virka saman við ítróttinum.*

**Tilmæli:**

Virkandi tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla til at taka undir við staðsetingina til nýtt ÍSF hús, og at beina málið aftur í mentamálanevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. august 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**:
Umsitingin hevur verið í samráðingum við ÍSF um málið. Grundarlag tykist nú vera fyri semju við ÍSF um málið, herundir endurgjald fyri ÍSF-húsið og nær húsið verður tikið niður, umframt prinsipsemja um staðseting av nýggjum húsi og treytirnar fyri tí.

Sí hjálagt uppskot til avtalur við ÍSF, ið nú skulu til endaligt samráðingarumfar.

Keypsvtalan inniber at TK skal rinda ÍSF 5.000 tkr. fyri ÍSF-húsið. Í sambandi við fíggjarætlanararbeiðið fyri 2019 ella 2020 skal henda upphædd setast av á fíggjarætlanini.

Avtalan um nýggju staðsetingina vil innibera at TK skal fíggja ávísar útreiðslur í sambindingini millum nýggja ÍSF-húsið og Ovara skýlið. Hesar vera neyvari mettar í sambandi við at ÍSF og tess ráðgevi gera disposiónsuppskot. Harumframt ynskir ÍSF at TK avklárar jarðfrøðiliga váðan í sambandi við bygging á økinum ella kompenserar fyri tað. Umsitingin er í holt við at kanna hetta og fyriliggur ein avkláring ætlandi innan 2 vikur. Sostatt eru útlit fyri endaligari semju við ÍSF innan fáar vikur. Fundur er í umboðstinginum hjá ÌSF 9. okt. og er ætlan at tá skal endalig semja fyriliggja.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin, leiðarin á Stjórnarskrivstovuni og mentamálaleiðarin kunna um gongdina í samráðingunum.

**Mentamálanevndin 12. september 2018:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti**:
Tekstur kemur.

**Mentamálanevndin 03. oktober 2018:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**:
Viðv. byggiøkinum sunnanfyri skýlið og parkeringsøkið vestanfyri

Umsitingin hevur samskift við P/F LBF, ið eisini stóð fyri projektering og eftirlitið í sambandi við arbeiðið í sjeytiárunum fyri at fáa meiri at vita um ætlaða byggiøkið. Felagið upplýsir, at mastrafundamentini við vestara skýlið eru funderað á hellu og at tá niðari vøllur varð dagførdur fyrst í 90 inum bleiv hella sprongd burtur í útnyrðingshorninum-niðan móti ovara vølli. Felagið heldur harumframt, at tá skýlið og p-plássið vóru gjørd, at alt bleytt tilfar varð grivið burtur niður á fastan botn, fastan leir/ hellu og fylt uppaftur við gróti.

Við støði í hesum tykist vera greitt (við tí fyrivarni slíkar metingar um jarðfrøðilig viðurskifti altíð vilja hava!) at tað skuldi verið rímiliga líkatil at fara undir bygging har.

Viðv. sambyggingini av bygningunum

Sp/f MAP er ráðgevi hjá ÍSF og metir felagið at serligu kostnaðirnir fyri sambyggingina við ovara skýlið eru umleið 3.000 tkr., umframt útreiðslurnar til byggibúning sunnanfyri á 550 tkr.

Hjálagt eru dagførd skjøl t.e. skjeyti og ætlanarskriv um leiguavtalu.

Sbrt. avtaluni flytir ÍSF úr ognini í 2020. Neyva tíðspunktið verður ásett til at vera í seinasta lagi 1. juni 2020. Gjaldið fyri húsið verður at rinda í seinasta lagi við útflytning, meðan kostnaðurin fyri sambyggingina av nýggja ÍSF-húsinum, við skýlið við ovara vøll, fellir tá ÍSF fer undir byggingina. Hetta er enn óvist og helst gongur nakað av tíð, áðrenn tað verður farið undir tað. Í ætlanarskrivinum er ásett, at ÍSF skal vera farið undir bygging innan 2024.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin, leiðarin á stjórnarskrivstovuni og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka undir við at kommunan gerð avtalu við ÍSF um keyp av ÍSF-húsinum og ætlanarskriv um leiguavtalu. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 28. november 2018:** Útsett.

**Ískoyti:**
ÍSF ynskir at skeytið verður treytað av at avtala er inngingin um leigusáttmála um bygning á leigari grund við skýlið við ovara vøll. Hetta gerð at ÍSF skal vera nakað fyrri við sínum fyrireikingum, men annars mett í lagi.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, leiðarin á stjórnarskrivstovuni og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at kommunan gerð avtalu við ÍSF um keyp av ÍSF-húsinum og ætlanarskriv um leiguavtalu. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 10. desember 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 13. desember 2018:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 13. desember 2018:** Einmælt samtykt.

## 316/18 Kloakk á Signabø

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 07.10.2015 | 103/15 | 15/03637-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 21.10.2015 | 257/15 | 15/03637-1 |
| 3 Býráðsfundur | 29.10.2015 | 201/15 | 15/03637-1 |
| 4 Kollafjarðarnevndin | 19.10.2015 | 10/15 | 15/03637-1 |
| 5 Tekniska nevnd | 27.11.2018 | 66/18 | 15/03637-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 05.12.2018 | 357/18 | 15/03637-1 |
| 7 Býráðsfundur | 13.12.2018 | 316/18 | 15/03637-1 |

**Málslýsing:**
Lýsing av málinum – samandráttur:
Sambært góðkendari spillivatnsætlan hjá TK, er ætlanin at fara undir arbeiðið at samla kloakkirnar á Signabø. Talan er um at savna verandi kloakk frárensl á Signabø í skipaða leiðing, sum verður leidd út á streymasjógv. Í løtuni verður stórur partur av spillivatni leitt út í á, sum munnar út í fjøruna.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Arbeiðið er mett at kosta kr. 0,35 mió. og er ynski um at fáa heimild at fáa Martin E. Leo at gera útbjóðingartilfar klárt, at bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión.

Samlaða upphæddin fyri markaðum íløgum fyri kloakkir í 2015 er 3 mió. kr. og er ætlanin at nýta 0,35 mió. kr. til prosjektering fyri dagføring av útleiðingunum.

Sambært fíggjarligu uppgerð, j. nr. 15/03637-3 verður samlaði fíggjartørvurin fyri at gera útbjóðingartilfar kr. 0,35 mió. (við 6,25% MVG).

### Tilmæli:
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at játta kr. 0,35 mió. av markaðum íløgum fyri kloakkir fyri 2015, konto 6875 (Kloakkir) og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 07. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Kollafjarðarnevndin 19. oktober 2015:** Umboð frá teknisku deild greiddi frá málinum.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og játta kr. 350.000 av markaðum íløgum fyri kloakkir fyri 2015. konto 6875 (kloakkir) og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 29. oktober 2015:** Einmælt samtykt

**Ískoyti:**
Prosjektið við at savna kloakkirnar á Signabø í skipaða leiðing, sum verður veitt út á streymasjógv fyri at lúka krøvunum frá Umhvørvisstovuni í samband við spillivatnsætlanina, er liðugt.

Umsitingin hevur avgjørt at bjóða 1. Byggistig at savna kloakkirnar á Signabø út í innbodnari lisitatión j.nr. 15/03637-7

1. Byggistig umfatar savnan, tyrving og leggjan av kloakkleiðingum brunnum, pumpubrunni og írenningarkummu, herundir, útleiðing á sjógv eystanfyri bátahylin. Somuleiðis dagføring av undirføringum á strekkinum har arbeitt verður á strekkinum frá á Signabø 18 og eystureftir framvið bátahylin.

Lisitatión varð hildin 5. nov. 2018 á skrivstovuni hjá Martin E. Leo. Víst verður til lisitatiónsprotokoll j.nr. 15/03637-9.

Av innkomnum tilboðum var lægsta boð frá Sp/f Maskingrevstur v/ Frank Hellisdal uml. kr. 3,1 mió. J.nr. 15/03637-10

Umsitingin kunnar um prosjekt og tilmæli frá ráðgeva j.nr. 15/03637-11

**Fíggjarviðurskifti:**
Sambært fíggjarligu uppgerð j.nr. 15/03637-12 verður samlaði fíggjartørvurin fyri 1. byggistig kr. 3,85 mió. (v/6,25% mvg). Samlaða upphæddin fyri markaðum íløgum fyri kloakkir 2018 er kr. 10 mió.
Biðið verður um kr. 3,85 av markaðum íløgum fyri kloakkir 2018, konto 6875 (kloakkir)

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta kr. 3,85 mió. av markaðum íløgum fyri kloakkir 2018 konto 6875 (kloakkir) og beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 27. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 05. desember 2018:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 13. desember 2018:** Einmælt samtykt.

# 317/18 Áheitan um setan av 4. parkeringsansara

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 27.11.2018 | 64/18 | 18/04024-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 13.12.2018 | 374/18 | 18/04024-1 |
| 3 Býráðsfundur | 13.12.2018 | 317/18 | 18/04024-1 |

**Upprunin til málið:**
Orsakað av at stóra ferðslutrýstið í kommununi er økt og tíðaravmarkaða parkeringsøkið er víðkað, meta parkeringsansararnir ikki at teir megna at røkja sínar arbeiðsuppgávur til fulnar. Fylgjurnar innibera strongd og ótryggleika. Tí verður mett at normeringin má hækkað, so ein ansari kann setast í starv aftrat.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í dag eru tríggir parkeringsansarar í kommununi, tveir fulla tíð og ein ¾ tíð.
Talið av tíðaravmarkaðum parkeringsbásum er økt við 27% seinastu 4 árini.
Komandi vár verður parkeringsøkið í miðbýnum økt við uml.190 tíðaravmarkaðum parkeringsbásum aftrat.

Ansararnir starvast frá kl. 9-18 yrkadagar og 10-14 leygardagar.
Stóra økingin av bilum og harvið ferðslu- og parkeringsavbjóðingum í kommununi, hevur neiliga ávirkan á arbeiðsdagin hjá parkeringsansarunum.
Kenslan av ikki at røkja uppgávurnar nøktandi, førir til strongd hjá ansarunum.
Umframt at ansa tey tíðaravmarkaðu parkeringsøkini í býnum og vegir við parkerings avmarkingum, er eisini boð eftir ansarunum frá borgarum um at koma teimum til hjálpar, tí bilførarar uttan fyrilit parkera ótrygt, og í nógvum førum læsa fólk inn á ogn síni.

Haraftrat hava ansararnir aðrar dagligar uppgávur, so sum at vegleiða borgarum, hvar møgulig tøk parkeringspláss eru, um klagumøguleikar av parkeringsgjøldum, geva boð til løgreglustovuna um húsvognar, viðheftisvognar, bilar uttan nummarspjøldur og um manglar av skeltum og slitnum básum.
Men tann álvarsamasta avleiðingin av hesum krevjandi starvi er, at trygdin hjá ansarunum er í vanda, tí ansararnir verða hóttir av óhøviskum persónum. Ansararnir hava tí tørv á í fleiri førum at vera tveir í fylgi, og hettar krevur eisini hægri normering.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Parkeringsansanin er skipað eftir: Løgtingslógarkunngerð um ferðslu, sum seinast varð broytt við løgtingslóg nr. 94 frá 6. juni 2017.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Um ein parkeringspolitikkur skal eydnast, skal ansanin vera munadygg. Royndir vísa, at um ansanin ikki verður gjørd regluliga, verður parkerað í størstan mun ímóti ferðslulógini.

Um parkeringsansanin peningaliga kann hvíla í sær sjálvari, við einum ansara aftrat í starvi er samlíkt, men ikki heilt vist. Parkeringsansanin gav í 2017 eitt yvirskot á kr. 309.000, og við einum ansara aftrat skuldu inntøkurnar hækkað samsvarandi.
Tó skal viðmerkjast at parkeringsgjaldið er lágt í mun til umsiting og arbeiði av innheintan, so tað stóra yvirskotið verður ikki av parkeringsansanini.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

Ongin viðmerking

**Møgulig frávik/læattar frá ásetingum**
Ongin viðmerking

**Umhvørvisárin**
Ongin viðmerking

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Løgreglan, sum varðar av ansarunum, sigur, at tað kann als ikki góðtakast, at ansararnir eru so illa mannaðir, at teir skulu útsetast fyri hóttanum, tí manning ikki er til at vera tveir í fylgi til tyngjandi uppgávur.

**Skjøl**
Ongin skjøl

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís øki í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☒**
Sum sagt er samlíkt at 4. ansarin gevur samsvarandi yvirskot, sum skipanin gevur í dag við trimum parkeringsansarum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at tann 4. parkeringsansarin verður settur skjótast.

**Tekniska nevnd 27. november 2018:** Ein meiriluti, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein, atkvøða blankt.

**Fíggjarnevndin 13. desember 2018:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Halla Samuelsen, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 13. desember 2018:** Samtykt við 8 atkvøðum fyri, ongari ímóti og 5 blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass og Bjørghild Djurhuus.

Blankt atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen, Bjørg Dam og Annfinn Brekkstein.

# 318/18 Kommunan tekur ábyrgd, handfaring av burturkasti

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 01.12.2016 | 72/16 | 16/04381-1 |
| 2 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 16.03.2017 | 17/17 | 16/04381-1 |
| 3 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 05.10.2017 | 45/17 | 16/04381-1 |
| 4 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 08.03.2018 | 11/18 | 16/04381-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 18.04.2018 | 102/18 | 16/04381-1 |
| 6 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 03.05.2018 | 28/18 | 16/04381-1 |
| 7 Mentamálanevndin | 06.06.2018 | 201/18 | 16/04381-1 |
| 8 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 08.11.2018 | 53/18 | 16/04381-1 |
| 9 Tekniska nevnd | 27.11.2018 | 61/18 | 16/04381-1 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2018 | 255/18 | 16/04381-1 |
| 11 Fíggjarnevndin | 05.12.2018 | 354/18 | 16/04381-1 |
| 12 Býráðsfundur | 13.12.2018 | 318/18 | 16/04381-1 |

**Málslýsing:**
Við støði í 'Grønu Leiðini: Umhvørvispolitikkur fyri Tórshavnar Kommunu', hevur byggi- og umhvørvisdeildin sett skjøtul á arbeiði at greina burturkastið í kommununi. Í fyrstu atløgu er ætlanin at kanna:

- Hvussu kommunan best kann innføra grønan innkeypspolitikk.
- Í samráð við starvsfólkini á kommunalu stovnunum og arbeiðsplássum seta mannagongdir í verk at minka um burturkastið.
- Arbeiða fyri at allar matur á kommunalu stovnum og arbeiðsplássum er vistfrøðiligur og at minni mat spilla er.
- At kanna hvussu kommunan best kann skilja lívrunnið burturkast til djóraføði og sankutøð
- At seta í verk mannagongd fyri endurnýtslu av gomlum innbúgvi.
- Seta í verk mannagongd fyri endurnýtslu av byggitilfari í kommununi.
- Seta í verk mannagongdir fyri endurnýtslu av asfalt, betong og glas í kommununi.

Smærri mál sum kunnu gerast skjótt:

- Í samráð við kommunalu stovnar virka fyri at plastnýtslan verður skerd t.d. at kantinan hjá kommununi skiftir til ordilig gløs, at toy posar vera nýttir ístaðin fyri plast posar.
- At kommunan gevst við at keypa eingangs koppar og gløs og fer at brúka koppar
- At finna hóskandi ruskspannir til allar kommunalar stovnar og arbeiðspláss sum eru 4-5 deild: Pappír, Glas, Brenning, Battarí/Spari perur/ljósrør og eina til lívrunnið burturkast (má hava lok).

Summi av málunum eru skjótari vunnin enn onnur. T.d. at kommunan gevst við at keypa eingangs koppar og gløs, meðan onnur fara at krevja longri tíð at fremja.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla til at nevndin tekur undir við at smærri málini omanfyri verða sett í verk sum skjótast og at arbeitt verður víðari við hinum málunum, fyri at røkka málinum um at fremja ein skynsaman umhvørvispolitikk.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 01. desember 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at kunna um samtyktina í fjølmiðlunum.

**Ískoyti:**
***Prenta á báðum síðum – betur fyri umhvørvi og fyri játtanina***
Við støði í Grønu leiðini - Kommunan tekur ábyrgd, strembar kommunan eftir at gerast ein enn grønari kommuna.

Við at prenta á báðum síðum verður mett at kommunan kann spara upp til 25% av pappíri. Harumframt skal minni goymsla til og tað er bíligari at posta.

Í 2015 keypti kommunan 4.975 pakkar av A4 pappíri, hetta svarar til kr. 114.425 (2017 prísir) og 2.487.500 ørk av A4. Við at prenta á báðum á síðum minkar kommunan um tilfeingisnýtsluna og verður mett at kommunan kann spara upp til 25%, ella uml. kr. 30.000.00 og 620.000 A4 ørk.

KT-deildin kann gera broytingina, so at standard verður at prentað verður á báðum síðum. Tá eitthvørt serstakt skal prentast út bert á eini síðu, ber til hjá hvørjum einstøkum at broyta hetta til høvið. Broytingin krevur tó, at umboð fyri KT-deildina mugu út til hvønn einstaka printara at broyta uppsetingina.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla til at taka undir við tilmælinum um at standard verður at prentast skal á báðum síðum.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 16. mars 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
**Plastdálking í Tórshavnar kommunu – fyrsta stig**
Plastdálking er ein alheims trupulleiki. Mikroplast-dálking er staðfest frá minsta plankton upp alla føðiketuna til fisk, skeljadjór og súgdjór. Mikroplast stavar frá, tá ið syntetisk framleidd evni, s.s. akryl, polyester, polyamide, fleece osfr vera niðurbrotin og t.d. vaskað út. Mikroplast er nýliga staðfest í fløsku- og kranavatni kring allan heimin. Enn er ókent, hvussu mikroplast ávirkar náttúru og menniskju. Vælkendu litføgru uppvaskisvamparnir og nógvir reingerðarklútar (mikroklútar) eru framleiddir úr omanfyri syntetisku nevndu evnum, og eru tískil ein kelda til mikroplast dálking. Umsitingin mælir tískil til, at Tórshavnar kommuna steðgar keypi og nýtslu av syntetisku uppvaski/skúri svampum og mikro-klútum. Hetta skal vera galdandi fyri fyrisitingina og allar kommunalar stovnar, skúlar, ellisheim, sambýli og aðrar kommunalar bygningar, har kommunan varðar at. Ístaðin skulu svampar og klútar framleiddir úr natúrligum umhvørvisvinarligum evnum nýtast.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla til at taka undir við tilmælinum at steðga við at nýta uppvaski/skúri svampar úr plasti og mikro-klútar.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 05. oktober 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at tað verður kunnað og vegleitt.

**Ískoyti:**
Í einum útboði eru vanliga 3 partar, ið verða vektaðir: 1/3 prísur, 1/3 tænasta og 1/3 umhvørvi og CSR (corporate social responsibility). Umhvørvisdeildin metir,at royndirnar vísa, at umhvørvið er vektað ov lítið, tá ið avgjørt verður hvør vinnur útboðið. Umhvørvisdeildin metir, at krøv til umhvørvið átti at verið sett sum standard í útbjóðingartilfarinum, so at umhvørvið ikki tapir í vektingini. Fyri at tryggja, at umhvørvið verður tikið við sum krav, heitir umsitingin tískil á nevndina, at heita á fíggjarnevndina, at umboð fyri umhvørvsideildina altíð skulu vera við í arbeiðinum at gera útboð.

**Tilmæli:**
Leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mælir til at nevndin heitir á fíggjarnevndina, at umboð fyri umhvørvisdeildina altíð eru við í arbeiðinum at gera útboð.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 08. mars 2018:** Nevndin heitir á fíggjarnevndina um at broyta útbjóðingarreglarnar soleiðis, at Tórshavnar kommuna altíð keypir loysnir, sum eru umhvørvisvinarligar.

**Ískoyti:**
Víst verður til notat til málið, sum lýsir hvør mannagongdin er í dag í sambandi við útboð og innkeyp. Víst verður á hvørji atlit verða tikin til, millum annað umhvørvi.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2018:** Samtykti at taka undir við tilmælinum frá fyrisitingini og tryggja framyvir, at umboð frá umhvørvisdeildini eru við í tilgoongdini, og kunning skal fara út á deildir og stovnar at taka atlit til umhvørvið.

**Ískoyti:**
Plast er ein alheims trupulleiki og serliga dálkingin av lítlum plastbitlum er ein álvarsligur trupulleiki, serliga tí vit enn ikki kenna avleiðingarnar av hesi dálking.

Flest allir dagstovnar hava bláar plastskógvar við dyrnar, so at foreldur ikki nýtast at lata seg úr skónum. Hesir plastskógvar eru tó gjørdir úr sera bíligum og vánaligum plastevnum, og tískil slítast teir sera skjótt, og eftir liggja plastbitlar í hópatali, sum børnini spæla og anda í seg.

Umsitingin mælir til, at heitt verður á dagstovnarnar at gevast við at brúka hesar bláu plastskógvar á øllum dagstovnaøkinum, og at øllum dagstovnum stendur í boði at fáa skelti frá kommununi, har á stendur: "Vinarliga latið tykkum úr skónum – her ganga vit ikki inni í skóm" ella líknandi. Átakið er mett at kosta kr. 20-30.000 fyri skelti til allar 38 dagstovnar, eisini tí stovnarnir hava fleiri inngongdir.

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og virkandi leiðarin á umhvørvisdeildini mæla til at nevndin tekur undir við tilmælinum: 1) at heita á dagstovnarnar at gevast at nýta plastskógvar á dagstovnaøkinum í Tórshavnar kommunu, 2) at játta pening av 6610 til framleiðslu av skeltum til allar dagstovnar, har á stendur, at fólk skulu lata seg úr skónum, og 3) at beina málið í trivnaðarnevndina.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 03. mai 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, tó ynskir nevndin at tað ikki verður loyvt at nýta plastskógvar á øllum stovnum í Tórshavnar kommunu og at beina málið í trivnaðarnevndina.

**Ískoyti:**
Plastskógvar verða nýttir á eini røð av stovnum og eindum hjá kommununi. Tað er tí hóskandi at fáa framt eina hoyring áðrenn endaliga viðgerð av málinum. Hetta soleiðis at atlit verða tikin til møgulig serviðurskifti.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, leiðarin fyri Barna- og ungdómsdeildina og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at allir viðkomandi stovnar í kommununi vera hoyrdir um ætlanina.

**Mentamálanevndin 06. juni 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Tórshavnar kommuna ger á hvørjum ári nógv rørarbeiði, tað veri seg við útstykkingum, kloakkarbeiði og annað. Rørini hava tó eina livitíð á uml. 100 ár og skulu tí skiftast út viðhvørt.

Tórshavnar kommuna hevur brúkt bæði PVC (polyvinylchlorid), PP (polypropylen) og PE (polyethylen) rør í sínum arbeiðum. PVC rør hava tó tann óhepna eginleika, at tey kunnu ikki smeltast og brúkast til at gera nýggj rør og mugu tískil tyrvast, meðan PP og PE rør kunnu smeltast umaftur og umaftur til at gera nýggj rør. ljós- og vatndeildin hava bert nýtt PE rør seinastu 25 árini, og kloakkdeildin hevur sett sum krav í øllum kloakk verkætlanum seinastu 6 árini, at nýta PP rør. Nevnast kann t.d. at í nýggju útstykkingini í Nólsoy, hevur tekniska deild gjørt alt kommunala arbeiðið við PP og PE rørum.

Tað at lutir kunnu áhaldandi verða verandi í ringrás og brúkast umaftur, er sera týdningarmikið fyri komandi ættarlið. Tískil verður mælt til, at seta hetta í fasta legu og at Tórshavnar kommuna hereftir fer frá at brúka PVC rør, og einans nýtir rør úr evnum, sum kunnu endurnýtast.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á umhvørvisdeildini mæla til, at nevndin tekur undir við tilmælinum:

- at Tórshavnar kommuna gevst við at nýta PVC rør í øllum sínum komandi verkætlanum og arbeiðum.
- at Tórshavnar kommuna mælir borgaranum frá, at nýta rør, tangar og brunnar úr PVC.

at málið verður beint í teknisku nevnd, byggi- og býarskipanarnevndina, fíggjarnevndina og býráðið.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 08. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Í sambandi við fíggjarlig viðurskifti skal nevnast, at eingin meirkostnaður stendst av broytingini at fara frá PVC til PP ella PE. Umsitingin hevur tosað við heimildarfólk á tekniska økinum og er í dag eingin prísmunur. Harumframt er prísurin á PP og PE lækkandi.

Í tí støðu, har ein ávísur lutur, skoyti, tangi ella annað bert fæst í PVC, so er sjálvandi møguligt at biðja um undantaksloyvi til henda ávísa lut hjá avvarðandi verkætlanarleiðara ella hjá umhvørvisdeildini.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin, býararkitekturin og leiðarin á byggideildini mæla til at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 27. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 05. desember 2018:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 13. desember 2018:** Einmælt samtykt.

## 319/18 Miðbýarætlan - Steinatún

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2014 | 61/14 | 14/05065-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 03.12.2014 | 331/14 | 14/05065-1 |
| 3 Býráðsfundur | 11.12.2014 | 258/14 | 14/05065-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 20.11.2015 | 240/15 | 14/05065-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 05.02.2016 | 49/16 | 14/05065-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 17.02.2016 | 58/16 | 14/05065-1 |
| 7 Býráðsfundur | 25.02.2016 | 45/16 | 14/05065-1 |
| 8 Ferðslunevndin | 23.03.2016 | 26/16 | 14/05065-1 |
| 9 Byggi- og býarskipanarnevndin | 29.04.2016 | 133/16 | 14/05065-1 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 17.05.2016 | 135/16 | 14/05065-1 |
| 11 Tekniska nevnd | 18.05.2016 | 60/16 | 14/05065-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 19.05.2016 | 189/16 | 14/05065-1 |
| 13 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 134/16 | 14/05065-1 |
| 14 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.10.2016 | 269/16 | 14/05065-1 |
| 15 Fíggjarnevndin | 16.11.2016 | 378/16 | 14/05065-1 |
| 16 Býráðsfundur | 30.11.2016 | 304/16 | 14/05065-1 |
| 17 Tekniska nevnd | 07.11.2017 | 58/17 | 14/05065-1 |
| 18 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.11.2017 | 214/17 | 14/05065-1 |
| 19 Tekniska nevnd | 28.11.2017 | 79/17 | 14/05065-1 |
| 20 Byggi- og býarskipanarnevndin | 29.11.2017 | 225/17 | 14/05065-1 |
| 21 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.12.2017 | 241/17 | 14/05065-1 |
| 22 Tekniska nevnd | 12.12.2017 | 81/17 | 14/05065-1 |
| 23 Byggi- og býarskipanarnevndin | 11.04.2018 | 88/18 | 14/05065-1 |
| 24 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.05.2018 | 124/18 | 14/05065-1 |
| 25 Fíggjarnevndin | 18.05.2018 | 146/18 | 14/05065-1 |
| 26 Býráðsfundur | 24.05.2018 | 123/18 | 14/05065-1 |
| 27 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 151/18 | 14/05065-1 |
| 28 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2018 | 265/18 | 14/05065-1 |
| 29 Fíggjarnevndin | 05.12.2018 | 355/18 | 14/05065-1 |
| 30 Býráðsfundur | 13.12.2018 | 319/18 | 14/05065-1 |

### Málslýsing:
Í sambandi við hugskots- og prosjektkappingina, sum var liðug 16. mai 2014 (journal nr. 14/01637), var ætlanin at koma í gongd við at gera fyribils kostnaðarmetingar og raðfesta tey ymisku átøkini í miðbýnum til langtíðar íløguætlanina hjá býráðnum (journal nr. 14/01463).

Kappingin var býtt sundur í tvær uppgávur, eina heildarætlan fyri allan miðbýin og eina prosjektkapping fyri økið kring Steinatún.

Zeta arkitektar, sum fingu fyrstu virðisløn í kappingini hava gjørt eina fyribils kostnaðarmeting fyri 1. byggistig av prosjektinum við Steinatún. 1. byggistig fevnir um betraði ferðsluviðurskifti, nýggjan flísa- og steinbelegning, uppfylling av steinagøtu oman ímóti Bank Nordik bygninginum, nýggja uppihaldstrappu við Tilhaldið, ljós og planting.

Kostnaðarmetingin er gjørd út frá einum skitsuuppskoti, sum ikki er gjøgnumarbeitt, og er tí rættiliga óviss. Hædd er heldur ikki tikin fyri møguligum trupulleikum við undirlendinum, og at arbeiðið skal ganga fyri seg á einum vegastrekki við nógvari ferðslu.

Kostnaðarmetingin ljóðar uppá kr. 14,4 mió. Og við eini óvissu uppá 20% gevur tað kr. 17,4 mió.

Í sambandi við ætlanina, hevur umsitingin biði Rambøll um tilboð uppá eina ferðslukanning við simulering av broyttu umstøðunum við Steinatún. Rambøll kann gerða hetta fyri kr. 60.000,-.

Býarskipanardeildin mælir nevndini til at taka støðu til, um peningur skal játtast til prosjektering av verkætlanini, soleiðis at ein meira nágreinilig kostnaðarmeting kann gerast fyri verkætlanina.

Í upprunaligu íløguætlanini fyri 2014 stóðu kr. 9 mió. til miðbýarætlan og kr. 2 mió. til spælipláss í miðbýnum. Eftir endurskoðan av íløguætlanini og flytingar til onnur endamál eru í dag kr. 3,109 mió. til miðbýarætlan og kr. 850.000 til spælipláss í miðbýnum. Í uppskotinum til íløguætlan fyri 2015 eru kr. 5 mió. settar av til miðbýarætlan.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at nevndin tekur støðu til um arbeiðast skal víðari við ætlanini, sum er mett at kosta íalt 15-20 mió.

Um arbeiðast skal víðari við ætlanini, eigur projekteringin at verða sett í gongd, umframt kanningar av leiðingum, ferðslukanning v.m.

Projekteringin er mett til kr. 1.300.000
Ferðslukanning er mett til kr. 60.000

Verður peningur játtaður, eigur tað at fara av íløgunum til miðbýarætlanina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2014:** Samtykt at gera eina ferðslukanning og at heita á fíggjarnevndina um at játta kr. 60.000 av íløgum til miðbýarætlanina. Eisini samtykti nevndin, at umsitingin arbeiðir víðari við málinum at leggja fyri nevndina aftur.

**Ískoyti**:
Í sambandi við arbeiði við miðbýarætlanini, eru ymiskar kanningar gjørdar, umframt at ein meirnýtsla hevur verið í sambandi við arkitektakappingina, hetta er gjørt upp til íalt kr. 510.022,- harav kr. 181.418,75 er meirnýtsla og kr. 328.603,25 til ymiskar kanningar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at játtaðar verða kr. 60.000,- til ferðslukanning við Steinatún, umframt kr. 510.022,00 til at gjalda omanfyri nevndu rokningar, soleiðis at tað íalt verða játtaðar kr. 570.022,00 av íløgunum til miðbýarætlanina.

**Fíggjarnevnd 03. december 2014:** Samtykt at játta kr. 60.000 til ferðslukanning við Steinatún, ið verður at játta av íløgunum til miðbýarætlanina.

**Býráðsfundir 11. desember 2014:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**:
Ferðslukanningin av Steinatúni, sum bleiv samtykt at gera á fundi í byggi- og býarskipanarnevndini 28. november 2014, er nú liðug.

Ferðslukanningin tekur støði í verandi viðurskiftum, grundað á teljingar av bilum, gangandi fólki og bussleiðini í Steinatúni í meldurtíðini frá kl. 15.30 til 16.30 ein vanligan dag.

Miðað var eftir loysnum at tøma Steinatún fyri bilar i tíðarbilum við ferðsluljósum við Niels Finsens gøtu og Tórsgøtu samsvarandi vinnandi projektuppskotinum frá arkitektakappingini fyri miðbýin frá ZETA arkitektar.

Niðurstøðan í kanningini vísir, at miðal bilrøðirnar við Steinatún í meldurtíðini vilja verða nakað longri enn í dag, meðan longstu bilrøðirnar verða somu longd sum í dag.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at nevndin tekur støðu til um peningur skal játtast til projektering av 1. byggistigi av projektinum við Steinatún.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. november 2015:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjørt skipanaruppskot fyri Steinatún. Sí Hjáløgdu skitsu j.nr. 14/05065-8. Býarskipanardeildin mælir til, at játtaðar verða kr. 500.000 av íløgukarminum á 6275 Fríðkan av kommununi, til projektering av Steinatúni.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at játta 500.000 kr. av konto 6275 Fríðkan av kommununi til projektering av Steinatúni.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 05. februar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2016:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðsfundur 25. februar 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Ferðslunevndin skal taka støðu til fyriliggjandi uppskot um ferðsluviðurskiftini á Steinatúni.

**Ferðslunevndin 23. mars 2016:** Málið umrøtt. Arbeitt verður víðari við málinum.

**Ískoyti:**
BYARSKIPAN hevur fingið gjørt projekt klárt at bjóða út í undirhondsboð millum tveir arbeiðstakarar at bjóða uppá. Ráðgevararnir hava mett um tíðarætlanina fyri verkætlanina og meta at tað ber til at gera nevndan part av Steinatúnsverkætlanini lidna til 15. juli í ár.

Sostatt er klárt at bjóða hetta arbeiðið út í undirhondsboð millum tveir arbeiðstakarar at innheinta tilboð, at leggja aftur fyri nevnd og býráð til støðutakan á komandi fundi.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at bjóða arbeiðið út í undirhondstilboð at leggja fyri nevndina aftur á komandi fundi.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. apríl 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Arbeiðið er boðið út framíhjá og vóru tilboðini hesi uttan MVG:
- P/F Articon: kr. 4.479.578,-
- Sp/f TG Verk: kr. 3.926.120,-

Umsiting kommununnar er í samráðingum við Sp/f TG Verk um sáttmála um arbeiðið og hevur gjørt eina samlaða kostnaðarmeting (sí j. nr. 14/05065-25) fyri arbeiðið við støði í tilboðnum frá TG-Verk, har prosjektering, byggileiðsla, fakeftirlit, byggiharraveitingar, óvæntað, MVG v.m. er íroknað.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at heimila umsitingini at gera sáttmála við TG-Verk um arbeiðið og at játtaðar verða kr. 5.596.000,- av íløgukarminum á 6275 Fríðkan av kommununi, afturat teimum kr. 500.000,- sum áður eru játtaðar til prosjektering. Málið verður beint í fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 17. mai 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at útvega fleiri parkeringspláss í Tórsgøtu beinanvegin.

**Tekniska nevnd 18. mai 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 19. maj 2016:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 19. mai 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Sum liður í framhaldandi menningini av Steinatúni, so hevur umsitingin fingið ráðgeva at gjørt uppskot til tak/skýli at staðseta í Steinatúni.

Skýlið kemur at virka sum bæði eitt bussskýli, umframt eitt tak til uppihald. Talan er um at gera eitt eyðkent bussskýli í høgari góðsku, umframt at ætlanin er at gera eitthvørt, sum víkir frá verandi bussskýlum, so sum eina til tvær reiggjur, har fólk kunnu stytta sær um tíðina, meðan bíðað verður eftir bussinum. Sí skjal nr. 14/05065-41, sum vísir hvussu skýlið kemur at taka seg út á økinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at heimila umsitingini at íverkseta projektering, útbjóðing í heildarveiting og uppseting av bussskýlinum, umframt at játta umsitingini at fara undir at planleggja næsta byggistig av Steinatúni, sum er at umbyggja norðaru síðuna av Steinatúni og at játtaðar verða kr. 2 mió. av konto 6275 til hesi arbeiðir.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. oktober 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. november 2016:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. november 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Kunnað verður um málið.

**Tekniska nevnd 07. november 2017:** Kunnað varð um málið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. november 2017:** Kunnað varð um málið.

Helena D. á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Verandi uppskot leggur ikki upp til lívd í mun til regn og vind, tí hevur verið tosað við ráðgevan frá Zeta Arkitektar um at gera nýtt uppskot til sjálvt skýlið undir hálvtekjuni.

Kunnað verður um nýggja uppskotið á fundinum, har ráðgevin kemur at greiða frá broytingini, ið skal tryggja lívd til tey, ið bíða eftir bussinum.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin og virkandi býararkitekturin mæla til at góðkenna nýggja uppskotið.

**Tekniska nevnd 28. november 2017:** Kunnað varð um málið og arbeitt verður víðari við málinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. november 2017:** Kunnað varð um málið og arbeitt verður víðari við málinum.

**Ískoyti:**
Kunnað verður um annað alternativt uppskot - *Steinatún, bussskýlið 11.12.2017*.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin og virkandi býararkitekturin mæla til at góðkenna uppskotið *Steinatún, bussskýlið 11.12.2017*.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. desember 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 12. desember 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti og tilmæli kemur mánadagin**.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. apríl 2018:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur fingið til høldar ráðgevarasáttmála við Zeta Arkitektar áljóðandi 324.600,00 kr. uttan mvg. at standa fyri høvuðsprosjekti, útbjóðing og eftirliti av býartorginum í Steinatúni. Zeta Arkitektar hava bjóðað arbeiðið út í undirhondsboð til arbeiðstakararnar P/F Articon og Sp/f TG-Verk.

Tilboðini eru soljóðandi:

Articon: 3.645.953,00 kr. uttan mvg.
TG-Verk: 2.798.258,00 kr. uttan mvg.

Zeta Arkitektar og umsitingin eru farin í samráðingar við TG-Verk, sum høvdu lægsta tilboðið, til tess at finna sparingar. Í tilboðnum varð biðið um tvær loysnir á antin holaðar (perforera) koparveggir ella herdaðar glasveggir, soleiðis at byggiharrin sjálvur hevur møguleika at velja. Stødd og snið tað sama, sum lýst í útbjóðingartilfarinum. Niðurstøðan er, at glasið er munandi bíligari frá báðum tilboðsveitarum. Herdað glas er somuleiðis ein tilfarsloysn, ið skapar ljósari sjónligari umhvørvi í býartorginum, í mun til holaðar (perforeraðar) koparplátur. Um tikið verður við hesari loysn og sparingum er tilboðið hjá TG-Verk áljóðandi:

TG-Verk: 1.722.115,20 kr. uttan mvg.

Umsitingin hevur síðani gjørt eina samlaða kostnaðarmeting at gera býartorgið í Steinatúni liðugt. Samlaði kostnaðurin er kr. 2.399.664,00 kr. við mvg., um tikið verður av lægsta tilboðnum við sparingum. Her er veiting og montering av býartorgi, beinkir, ráðgevarakostnaður, prosjektumsiting, trygging v.m. íroknað.

2 mió. eru longu játtaðar av konto 6275 og 400.000,00 kr. við mvg. resta í, um tikið verður av samlaða kostnaðinum. Møguleiki er at fíggja 400.000,00 av konto 7510, bussleiðin.

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla til at taka av lægsta tilboðnum við sparingum hjá TG-Verk, at játta írestandi 400.000,00 kr. av konto 7510, bussleiðin, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. mai 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2018:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. mai 2018:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Einmælt samtykt.

**Ìskoyti:**
Eftir lisitatiónina hevur TG-Verk viðmerkt, at "tilboðið at gera býartorg í Steinatúni sambært ABF06, §3, stk. 5, ikki longur er bindandi fyri TG Verk Sp/f, tí freistin á 20 dagar langt síðani er farin, og TG Verk ikki hevur lovað at staðið við tilboðini". Niðurstøðan er, at TG-Verk eru leysgivnir av tilboðnum.

Tórshavnar kommuna hevur síðani verið í kontakt við hægra tilboðsveitara, P/F Articon, sum hava váttað, at teir ikki megna at koma niður til prísin, sum varð komið ásamt um í sparirunduni við TG-Verk, og sum varð samtyktur í Býráðnum. Eftirfylgjandi hevur umsitingin verið í samráð við Sp/f Húsavarðartænastuna, P/F Nomatek og somuleiðis kannað møguleikar í Danmark, men eingin hevur verið áhugaður at gera hetta fyri prísin, sum varð komið ásamt um í sparirunduni við TG-Verk, og sum varð samtyktur í Býráðnum.

Umsitingin hevur bíðað eftir at bjóða verkætlanina út av nýggjum, tí tilboðini vórðu formelt annulleraði fríggjadagin 24.08.2018. Tískil skal mann smb. ABF06 bíða í 3 mánaðir frá hesum dato, áðrenn møguleiki er at bjóða hetta út av nýggjum, t.e. í fyrsta lagi 24.11.2018.

Fyri at fáa býartorgið í Steinatúni gjørt, so er ætlanin at bjóða somu verkætlan út enn einaferð í innbodna lisitatión til hesar arbeiðstakarar:

Sp/f Búsetur
Sp/f ÁTS
Sp/f Húsavarðartænastan
Sp/f Norðhús
P/F Articon
P/F MT/Højgaard

Umsitingin hevur gjørt eina samlaða kostnaðarmeting at gera verkætlanina býartorg í Steinatúni liðugt. Samlaði kostnaðurin framgongur í kostnaðarmetingini, j.nr. 14/05065-77. Her er HVÙ, ráðgevarakostnaður, prosjektumsiting, trygging, o.a. íroknað.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, leiðarin á verkætlanardeildini og býararkitekturin mæla til at bjóða arbeiðið á býartorg í Steinatúni út aftur eftir omanfyristandandi leisti, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 05. desember 2018:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 13. desember 2018:** Einmælt samtykt.

# 320/18 Gøtan kring Havnina og fiskastykkið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.09.2017 | 175/17 | 17/02247-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 04.10.2017 | 246/17 | 17/02247-1 |
| 3 Tekniska nevnd | 07.11.2017 | 56/17 | 17/02247-1 |
| 4 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 09.11.2017 | 54/17 | 17/02247-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 06.12.2017 | 306/17 | 17/02247-1 |
| 6 Býráðsfundur | 14.12.2017 | 308/17 | 17/02247-1 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.09.2018 | 177/18 | 17/02247-1 |
| 8 Tekniska nevnd | 02.10.2018 | 56/18 | 17/02247-1 |
| 9 Tekniska nevnd | 27.11.2018 | 74/18 | 17/02247-1 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2018 | 251/18 | 17/02247-1 |
| 11 Mentamálanevndin | 10.12.2018 | 374/18 | 17/02247-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 05.12.2018 | 358/18 | 17/02247-1 |
| 13 Býráðsfundur | 13.12.2018 | 320/18 | 17/02247-1 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Býarskipanardeildin hevur arbeitt við eini ringrás kring Havnina. Ringrásin er eitt áleið 35 km langt gøtu- og vegasamband, sum liggur í landslagnum kring býin. Hugskotið er at leiða borgaran og ferðafólk út í náttúruna umframt at skapa søguligar og mentanarligar upplivingar á leiðini.

Ringrásin er eitt samanhangandi strekki, sum fevnir um seks styttri og longri leiðir við hvør sínum serliga eyðkenni - frá miðbýnum og niðan í fjallalendið. Ringrásin bjóðar tí náttúrupplivingar við rørslu og útsýni umframt upplivingar fram við bygdum øki, har surrandi býarlívið skilur seg týðiliga frá tí opna landslagnum. Landslagið er sermerkt við jørð, vatn og vindi, ið avgjørt setur sín dám á leiðina.

Ringrásin tillagar seg landslagið, og fylgir so vítt møguligt verandi vegum og gøtum, sum tilsamans telja 25 km av leiðini.

**Gøtan millum bý og hav**
Sum ein liður í heildarætlanini av ringrásini er uppskot at gera gøtu fram við strondini Yviri við Strond. Hugsanin er at skapa eitt samband frá Skansanum og niðan til Boðanes, har fólkið kann flyta seg burtur frá einum vegastrekki við nógvari ferðslu og tættari at náttúruni. Harafturat kann kommunan verja landslagið við at leiða fólk, hvar tey skulu ganga, hetta eisini í mun til vaksandi ferðafólkatalið.

Væl vitandi um, at hav og vindur setur sín dám á strondina, vil leiðin ikki altíð vera atkomulig, tá sjógvur skolar inn yvir. Arbeiðast skal við eini ítøkiligari ætlan, ið nemur við tilfarsval í mun til vatnføri, og hvussu sniðgivið verður við virðing fyri náttúruni.

**Fiskastykkið**
*Yviri við Strond er einasta fiskastykkið, sum eftir er í Havn. Hetta eigur at verða varðveitt og atkomuligt fyri almenningin.*

Leiðir leggja seg eftir, hvar menniskjan hevur havt ávirkan á landslagið. Hetta kemur m.a. til sjóndar í søguligum og mentanarligum slóðum. Eitt dømi um hetta er fiskastykkið Yviri við Strond, ið liggur á leiðini frá Skansanum til Boðanes. Økið varð nýtt til fiskaturking, eisini nevnt fiskastykkið hjá Johannes í Stórustovu.

"Helst eru tey farin at turka fisk á stykkinum yviri við Strond í seinnu helvt av 1920-árunum, ella kanska fyrst í 1930-árunum. Sostatt var virksemið hjá fyritøkuni stutt har yviri.
*Í 1934 søkti Johannes í Stórustovu um loyvi at byggja eitt pakkhús "ved Torgard anlagte Fisketørreplads har jeg tænkt mig opført midlertidig Fiskehus..." Byggiloyvið varð latið honum (Th. Bygningskommision, j. no. 32/1934) V.ø.o. hava tey turkað fisk á hellu og tí steinsetta lendinum á leigutrøðni hjá Johannesi, áðrenn húsið varð bygt. Ein abbasonur Johannes í Stórustovu, Johannes Jacobsen, f. 1935, vanliga nevndur Hannis í Stórustovu, veit at siga, at húsini, sum standa í dag, har feløgini Føroya Ellisakfør og Føroyskir Radioamatørar halda til, eru tey somu húsini, sum vórðu bygd til endamálið á sinni, men eru tó umvæld seinni..."*

Sí søguliga lýsing av fiskastykkinum í skjalinum "Fiskastykkið hjá Johannes í Stórustovu". Verandi støða á fiskastykkinum í dag, er hin sama, sum lýst verður í skjalinum, og stendur soleiðis skrivað:

*"...Uttanfyri síggjast enn sjónligu sporini eftir gamla "Bukkvald", og longur uppi er tjaldingarplássið, har fremmandir gestir halda til um summarið. Framvið fjøruna og suður móti Tórgarðstanga, har fiskastykkið hjá Johannes í Stórustovu er, síggjast stórir tyrvdir dungar av alskyns tilfari, asfalt, betong og yvirskotsgróti. Hetta er til lítlan sóma fyri umhvørvið harúti. Fjøran er sum øllum kunnugt friðað, og nú átti tíðin verið búgvin at rudda økið. Undir hesum dungum eru uttan iva eisini leivdir av steinsetta fiskastykkinum.*
*Á fiskastykkinum liggur antennuútbúnaður, og har hevur tað ligið leingi. Niðriundir húsinum, oman móti fjøruni, stendur onnur útgerð og rustar. Hetta átti avvarðandi kommunalu myndugleikin, sum eigur og umsitur ognina, at síggja til at fáa beint burtur..."*

*"...Sum greitt frá omanfyri átti lendið við Tórgarðstanga at verið ruddað. Tað steinsetta lendið er í støðum vorðið meira ójavnt. Tað er farið av tíðarinnar tonn. Hømilia og illgras skora seg upp millum steinarnar, brotnar fløskur liggja og sløðast..."*

Økið fevnir um 11 matriklar, ið eru ogn hjá Tórshavnar kommunu, Føroya Landsstýri og privatum eigarum.

Fyri at fara undir verkætlanina, gøtu og fiskastykkið, er neyðugt at gera avtalur við avvarðandi eigarar og leigarar og at fáa loyvi frá friðingarmyndugleikunum. Leigusáttmáli er við Føroyskir Radioamatørar og Føroya Ellisakfør.

Á sumri 2017 var verkætlanin um "Tórsstien" løgd fram, sum starvsnæmingar gjørdu á býarskipanardeildini. Uppskotið er gott grundarlag at arbeiða út frá, og skal ein ítøkilig ætlan gerast, sum í høvuðsheitum fevnir um at rudda økið, gera gøtu og uppskot til skipan av fiskastykkinum og øðrum hóskandi mentanarsøguligum minnum og útsýnisstøðum á strekkinum Yviri við Strond. Mælt verður somuleiðis til at ein ítøkilig ætlan verður gjørd í stigum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið fram við strandarlinjuni Yviri við Strond liggur í umráðispartinum D1, umframt at ein partur av økinum liggur í B6 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.
Umráðispartarnir D1 verða í síni heild lagdir til almenning, náttúrufriðingar- og mentanarlig endamál og tílíkt. Um at skipa gøtur í B6 skal loyvi fáast frá eigarunum.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Málið um varðveitan av nevnda fiskastykki varð reist í 1992. Økið varð skrásett og ein ítøkilig ætlan varð gjørd um at hampa økið og harnæst at varðveita fiskastykkið. Harafturat varð mett frá einum frílendissjónarmiði, at økið av Skansanum - ella Eystfalsskeri og niðan á Boðanes – átti at fatast sum ein heild, og tí er fiskastykkið yviri á Tórgarði áhugavert og hevur sjálvsagdan søguligan týdning. Málið var fyri í mentamálanevndini í 1995, men har kom tað ikki longur.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Økið er friðað sambært lóg um náttúrufriðing.

**Umhvørvisárin**
Mett verður ikki, at gøtan fer at hava serligt árin á umhvørvið.

**Fíggjarlig viðurskifti**
Krøv frá eigarum og brúkarum av lendinum og ætlanarkostnaður.

**Viðmerkingar frá øðrum deildum**
Ymisk viðurskifti framvið strond skulu gerast í samráð við mentamáladeildina.

Húsaumsitingin metir bygningin ikki vera í góðum standi, og mælir til, at bygningurin verður tikin niður.

Býarverkfrøðingurin tekur undir við ætlanini treytað av, at nýggj staðseting verður funnin til Reinhaldið til at umskipan av sópingarmaskinunum. Og atlit skulu takast til kloakkviðurskifti á staðnum.

**Skjøl:**
Fiskastykkið hjá Johannes í Stórustovu, journal nr. 17/02247-2
*Tórsstien,* journal nr. 17/02247-3.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla nevndini til at heimila umsitingini at byrja at gera ítøkiliga verkætlan og at fara í samráðingar við avvarðandi myndugleikar og eigarar umframt at játta kr. 1 mió. av íløgunum fyri 2018 til verkætlanina og at beina málið í mentamálanevndina, náttúru- og umhvørvisnevndina, teknisku nevnd, fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. september 2017:** Samtykt at arbeiða víðari við ætlanini.

**Mentamálanevndin 04. oktober 2017:** Tikið verður undir við byggi- og býarskipananevndini.

Heðin Mortensen var ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Tekniska nevnd 07. november 2017:** Samtykt at taka undir við ætlanini.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 09. november 2017:** Samtykt at taka undir við ætlanini.

**Fíggjarnevndin 06. desember 2017:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini, mentamálanevndini, teknisku nevnd og heilsu- og umhvørvisnevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 14. desember 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti – kunning um verkætlanina:**
Fundur hevur verið við Ólav Frederiksen, formann hjá Føroyskum Radioamatørum,
um at fara í holt við at rudda fiskastykkið og at bjóða økið út til uttanhýsis ráðgeva at koma við uppskoti til, hvussu økið kann gerast til eitt uppihaldsstað, har ljós er varpað á søguna á økinum.
Sambært Ólav hevur felagið onga stórvegis útgerð á fiskastykkinum, og verkætlanin fer ikki at ávirka virksemið hjá felagnum. Ólavur viðmerkir tó, at tað hevði verið tryggast, um onkur forðing varð gjørd millum fiskastykkið og restina av matriklinum, soleiðis at vitjandi ikki fara inn á økið, har allir káplarnir liggja. Sí Fundarfrásøgn Fiskastykki, journal nr. 17-02247-25.

Umsitingin hevur móttikið skipanaruppskot til, hvussu fiskastykkið kann koma at síggja út og uppskot uppá hvussu verkætlanin kann býtast upp í átøk og byggistig frá ráðgeva EYA v/Eyðun Eliasen. EYA hevur tillagað uppskotið eftir kunning frá Ólavi sí Fiskastykkið við Strond_Skipanaruppskot, journal nr. 17-02247-26.

**Samandráttur av skipanaruppskotinum**
Uppskotið fevnir um økið frá norðanfyri vegnum móti campingøkinum og vegnum út á Bukkvald og suðurum lítlu "víkina" við matrikulmarkið (sí s. 12 í uppskotinum). Í skipanaruppskotinum verður mælt til at byggja uppá og fríðka um verandi øki við at:

- leggja tilfar afturat verandi rúgvu av mold, grasi o.l. fyri at gagnnýta økir við lívd, útsýnislinjum og sólargangi.
- reinsa og á summum støðum umvæla steinsetingina á Fiskastykkinum.

Í uppskotinum verður dentur lagdur á at geva vitjandi á fiskastykkinum best møguligu lívd. Uppskot er tí um at gera tvey innvik í skulpturellum skapi, sum vitandi kunnu uppihalda seg í. Innvikini verða skorin inn í steinlaðingina og helluna á Fiskastykkinum. Fyri at fólk skulu trívast á einum útiøki sum hesum, er týdningarmikið at økið ikki er ov vítt. Tí er dentur lagdur á at gera "verjugarðar" móti vestri, norðri og eystri á ovara partinum av fiskastykkinum. Eftir at økið er ruddað og nærri skrásett, verður støða tikin til, hvussu langt suðureftir tað broytta fiskastykkið skal fara. Skráarnir á økinum verða klæddir við timburbrettum, so hallið ikki verður ov stórt. Hetta ger tað eisini møguligt at skapa eina farleið, sum kann knýtast at ætlaðu 'Gøtuni kring Havnina'.
Uppskotið fevnir eisini um at  gera parkeringsøkið har sum Reinhaldið heldur til í dag og at nýta asfaltrúgvuna móti sjónum til at geva lívd.

Harafturat verður eitt ítøkiligt átak skotið upp, ið snýr seg um at umskapa bygningin á ognini til endamál, sum hava tilknýti til fiskastykkið ella líknandi evni. Talan kann vera um eitt savn við framsýningum um fiskavinnu og –yrki og/ella eina matstovu, sum borðreiðir við saltfiskavørum. Hugskotið er sera áhugavert, men umsitingin metir, at tað verður torført og sera dýrt fyri Tórshavnar kommunu at flyta føroyskar radioamatørar, ið leiga matrikulin, á annað øki. Leigusáttmálin millum Føroyskir Radioamatørar og Tórshavnar kommunu er galdandi til 2029. Sambært Radioamatørunum eru káplar blivnir lagdir á lendið gjøgnum eitt langt áramál, og eru sera nógvir arbeiðstímar lagdir í hetta arbeiði. Káplarnir liggja sum eitt

eiturkoppanet á einum stórum parti av økinum, og tað er nærum ómøguligt at flyta ella taka káplarnar uppaftur.

Uppskotið fevnir um 8 byggistig (sí s. 17 í uppskotinum). Umsitingin mælir til, at farið verður ígongd við at bjóða byggistig 1, 3, 4 og 8 út til ávikavist ráðgeva og tilboðsgeva at menna. Sí byggistig niðanfyri.

1. Skráseta økið neyvari fyri møguligar leivdir, lutir o.a.

3. Rudda alt økið. Fyrst leyst tilfar og órudd og síðan mold og óegnað gróttilfar o.a.

4. Gera og góðkenna endaligu verkætlanina og fáa loyvi frá friðingarmyndugleikum.

8. Bukkvald-verkætlanin gerast so hon eisini gerst ein natúrligur partur av økinum.

Umsitingin fer í næstum at finna nýggja staðseting til Reinhaldið.

**Skjøl:**
Fundarfrásøgn Fiskastykki, Journal nr.17-02247-25
Fiskastykkið við Strond_Skipanaruppskot, Journal nr. 17-02247-26

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | x | | x |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | x | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | x |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at nevndin umrøður uppskotið uppá verkætlanina og beinir málið í teknisku nevnd til kunningar, umframt at umsitingin fer undir at seta ymisku átøkini í verk.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. september 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Kunnað verður um málið.

**Tekniska nevnd 02. oktober 2018:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti – nýggj staðseting til Reinhaldið**
Saman við teknisku deild hevur býarskipanardeildin gjørt uppskot um nýggja staðseting til umlastuplássið hjá reinhaldinum í Gundadali.

Smáu feiu-bilarnir eru ikki egnaðir at koyra langar teinar, og arbeiðsfólk við trillubøru skulu sleppa av við ruskið uttan at skula ganga ov langt, tí er týdningarmikið at nýggja staðsetingin er nærhendis miðbýnum. Hugskotið er at savna øll umlastuplássini hjá reinhaldinum í Gundadali. Hetta merkir, at umlastuplássini á Skálatrøð og á Bukkvald verða flutt, og at hesi øki tí eisini verða tøk til framtíðar verkætlanir.

Uppskot upp á staðseting í Gundadali eru gomlu vaskiplássini hjá bilstøðini Bil, sum Tórshavnar kommuna er eigari av. Neyðugt verður at tillaga plássini til bingjur og gera vaskipláss við oljuútskiljara. Ein gamal oljuútskiljari er á plássinum, men um hesin kann brúkast má eftirkannast. Um tangin ikki kann brúkast, kann oljutangin á Bukkvald blíva tikin upp og staðsettur í Gundadali. Fólk frá Tórshavnar kommunu er frammanundan í Gundadali og rudda aftaná landsdystir og sunnudagsdystir. Tí er upplagt, at sameina hetta virksemið við umlastuplássið hjá Reinhaldinum og skipa alt hetta í Gundadali.

Fyri at plássið skal verða til so lítlan ampa fyri grannar, virksemi og vitjandi á økinum sum gjørligt, er neyðugt at gera ein uml. 2 m høgan garð uttan um plássið. Plássið liggur beint uppat einum grønum kliva av runnavøkstri, og tí vildi tað verið upplagt at plantað runnar uppat garðinum, soleiðis at plássið verður betri sameina við verandi øki. Sum sæst á Kort 1 - uppskot um staðseting.pdf journal nr. 17/02247-30, rennur Havnará vestan fyri plássið og mælt verður til at plássið verður flutt 2,5 m eystureftir burtur frá ánni og 0,5 m frá vegnum. Fyri at sleppa undan at hava inn- og útkoyring frá Gundadalsvegnum, verður mælt til at eitt automatiskt portur verður sett á eystaru síðu av plássinum, soleiðis at feiu-bilarnir kunnu koyra inn millum bingjurnar til tøming og vaskiplássið og at lastbilur kann koyra inn fyri at heinta bingjurnar. Samanlagt verður plássið uml. 250 fermetrar.

Kostnaðurin fyri at fyrireika verandi pláss á Bukkvald var uml. kr. 350.000. Av hesum plássi kann oljuútskiljari og skúrur brúkast aftur í Gundadali og harafturat kemur so garðurin.

**Skjøl:**
17/02247-30 Kort 1 - uppskot um staðseting.pdf

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | x | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekurin mæla til at samtykkja nýggja staðseting av umlastistøð til reinhaldið í Gundadali, at játta 350.000 kr. av L62032 Gøta kring Havnina og Fiskastykkið til flytan av verandi umlastistøð Yviri við Strond niðan í Gundadal, at beina málið í mentamálanevndina til kunningar og síðani í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 27. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Tróndur Sigurðsson atkvøður blankt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2018:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Tróndur Sigurðsson atkvøður blankt.

**Fíggjarnevndin 05. desember 2018:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Mentamálanevndin 10. desember 2018:** Kunnað varð um málið.

**Býráðsfundur 13. desember 2018:** Einmælt samtykt.

# 321/18 Føroya Ríðingarfelag : Umsókn um trøðna matr. nr. 1156, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.11.2018 | 217/18 | 18/01264-2 |
| 2 Tekniska nevnd | 27.11.2018 | 75/18 | 18/01264-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 05.12.2018 | 359/18 | 18/01264-2 |
| 4 Býráðsfundur | 13.12.2018 | 321/18 | 18/01264-2 |

**Upprunin til málið:**
Tórshavnar kommuna hevur fingið umsókn frá Føroya Ríðingarfelag um trøðna matrikul 1156 í Havnardali til nýggja kappríðingarbreyt. Í dag hevur felagið eina ríðibreyt uppi í Marknagili umframt aðrar kappingarbreytir í Havnardali, har virksemi felagsins annars heldur til.
Felagið hevur eitt ynski um at betra um verandi breytir og savna allar hesar á einum staði og við hesum savna alt virksemið hjá felagnum úti í Havnardali.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Talan er um eina 500 m langa ríðibreyt úti í Havnardali, ið gongur tvørtur ígjøgnum verandi ríðibreyt, yvir um Tvørá og tvørtur ígjøgnum matrikul 1156. Um tað er møguligt ynskir felagið, at ríðibreytin kemur at liggja soleiðis, at hon sker ígjøgnum horni á matrikul 1157 og at hon skal fara nakrar metrar inn á Flatnahaga matr.nr 1160a (sí j.nr.18-10264-1 Flatmynd av økinum við bana). Sum nú er leigar Felagið lendið, ið gongur heilt upp til Tvørá.

Økið, har felagið ynskir at leggja ríðibanan, hevur eitt hall uppá uml. 30 m og hetta merkir, at banin kemur at hava eina promillu uppá uml. 60. Talan verður tó ikki um eina spreinging av lendinum men um eitt dekk sum verður lagt á soleiðis, at hallið verður javnað út (j.nr. 18-01264-4 ríðiøki_v_m18).

**Lógir, ásetingar o.a.**
Matr.nr. 1156 og 1160a liggja í 4. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, ið er ætlað til landbúnað, alment frílendi og tílíkt. Mælt verður til at matrikul 1156 og og ein partur av 1160a verða ummatrikuleraði til ein matrikul og at matrikulin verður broyttur til D2, samsvarandi við restina av ríðiøkinum (j.nr. 18-01264-5 uppskot til ummatrikulering).

Ein partur av ríðibreytini fer ígjøgnum matr.nr. 1157, ið er eitt D1 øki. Hetta øki er ætlað til almenning, náttúrufriðingar- og mentunarlig endamál og tílíkt. Tískil er neyðugt at taka støðu til um breytin skal flytast útum matr.nr. 1157 ella um tann parturin av matriklinum, ið breytin gongur ígjøgnum skal broytast til D2.

Av tí at talan er um eina breyt, sum gongur tvørtur um eina á, ið er meiri enn 4 m breið hevur áin eina verndarlinju uppá 300 m. Hetta merkir, at øll bygging innan fyri hesar 300 m skal góðkennast av friðingarmyndugleikanum. Sostatt skal ríðibreytin í samb. við byggiloyvi góðkennast av friðingarmyndugleikanum.

Verandi ríðibreyt hevur verið nógv brúkt, og hevur hon verið til stóran gagn, men við einum ætlaðum framtíðar innkomuvegi í økinum, verður ríðibreytin helst ávirkað, um ikki heilt oyðiløgd. Harumframt hevur felagið víst á, at felagið til tíðir hevur stórar trupulleikar av at

borgarin nýtir ríðibreytina til at ganga og renna á, tí at rossini ríða so skjótt, og tá er ikki gott við fólki á breytini.

Felagið hevur somuleiðis ætlanir um at byggja nýggjar stallar í økinum, og tá hetta arbeiðið verður framt, er ætlanin at gagnnýta tilfarið frá avgrevstrinum til at byggja nýggju ríðibreytina.

Umsitingin metir, at tað er upplagt at savna alt ríðivirksemið í Havnardali, og metir tískil eisini, at farast skal undir neyðugu broytingarnar í byggisamtyktini, uppsøgn av leigusáttmála, skipan av matrikul viðurskiftunum, keyp av víðkaðum leigusáttmála til ríðingarfelagið o.s.fr.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
17/02742 Umsókn um brúksrætt til økið norðanfyri gøtuna niðan til Tølthøllina. Talan er um felagið FAFU, sum ynskir eitt øki til bygging av ríðihøll við stallum til síni ross. Ynskiligt er at finna eina staðseting til virksemið, og arbeiðir umsitingin við felagnum fyri at finna eina hóskandi staðseting.

15/00497 Umsókn vegna Bogaskjótisamband Føroya um at fáa eitt øki at skjóta á. Tað hevur í fleiri umførum verið umrøtt í politisku nevndunum at staðseta felagið úti í Havnardali uppat virkseminum hjá Føroya Ríðingarfelag. Tað er tó ikki heilt sannlíkt, at virksemini hóska serliga væl til hvørt annað, og tá hugt verður at møguleikunum hjá Føroya Ríðingarfelag at vaksa um teirra virksemi, so eru ætlanirnar við skjótibreytini lagdar á hillina og arbeiðir umsitingin við at finna aðra góða staðseting til Bogaskjótisamband Føroya.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Broyting av almennu byggisamtyktini skal gerast fyri at virksemið skal kunna víðkast.

**Umhvørvisárin**
Einki

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Einki

**Skjøl**
j.nr.18-10264-1 Flatmynd av økinum við bana
j.nr. 18-01264-4 ríðiøki_v_m18
j.nr. 18-01264-5 uppskot til ummatrikulering

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
| --- | --- | --- | --- | --- |
| Umsitingaravleiðingar | x | | x | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | x | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☒**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til at farast skal undir samráðingar við Landsverk um innkomuvegin, fyri at tryggja rossavirksemið, umframt Havnardal og tá semja er fingin

við Landsverk, fara undir samráðingar við traðarleigararnar, broytingarnar í matrikul viðurskiftunum, broytingarnar í byggisamtyktini, at víðkað leigusáttmálan við Fø. Ríðingarfelag og at málið verður beint í býráðið umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum. Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Tekniska nevnd 27. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 05. desember 2018:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 13. desember 2018:** Einmælt samtykt.

# 322/18 Nýggj serstøk byggisamtykt fyri íbúðarbygging á matr. nr. 877m við Dalastíg, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2018 | 249/18 | 18/03670-2 |
| 2 Býráðsfundur | 13.12.2018 | 322/18 | 18/03670-2 |

**Upprunin til málið:**
Byggi- og býarskipanarnevndin í Tórshavnar kommunu samtykti á fundi 3. oktober 2018 at loyva íbúðarbygging á matr. nr. 877m, við Dalastíg, Tórshavn, og í hesum sambandi at serstøk byggisamtykt verður gjørd fyri økið sí 18/03680-3 Kortskjal 1 yvirlitskort og 18/03670-04 SERSTØK BYGGISAMTYKT VIÐ DALASTÍG.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Tórshavnar kommuna hevur fingið umsókn frá eigara av matr. nr. 877m, Tórshavn, um at fáa loyvi at byggja íbúðir á økinum. Talan er um tveir íbúðarbygningar í tveimum hæddum, við tilsamans 12 íbúðum, 6 íbúðir á 74 m² og 6 íbúðir á 57 m².
Størri bygningurin verður 224 m² til víddar, og minni bygningurin 150 m².
Pláss verður fyri 16 p-plássum inni á ognini. Sambært almennu byggisamtyktini skal minst 1 p-pláss verða fyri hvørjar 75 m² íbúð, og eru sostatt fleiri p-pláss, enn minstakravið í almennu byggisamtyktini. Harumframt er øki lagt av til felags tún, sí kortskjalið 18/03670-3 Skipan. Ognin liggur á horninum Dalavegur/Vestari Ringvegur og vegatkoma verður frá Dalastígi.

Økið liggur í A1 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, og sambært ásetingunum fyri A1 øki *"kann, fyri eitt natúrligt avmarkað øki, verða loyvt at byggja íbúðir".*

Um verkætlanina skrivar umsøkjarin:
*"Arkitektoniska hugskotið tekur støði í staðnum. Dalastígur liggur á einari hædd við góðum útsýni út á Nólsoyarfjørð (suður, eystur). Vit hava lagt 2 stengur, ið liggja forskotnar i mun til hvørja aðra. Miðgarðurin trappar [skráar] oman við lendinum og húsalonirnar liggja sostatt við opna skapinum suðureftir. Trappaða [tað skrá] miðrúmið er hugsað sum ein felagsgarður fyri búðfólkið."* Sí 18/03670 Kortskjal 2 skipan av økinum.

Eystanfyri matrikul 877m liggur eitt tætt bústaðarøki sett saman av einamest stakhúsum. Vestari Ringvegur sker vestaru síðuna av matriklinum av við vegi og hinumegin vegin, vestanfyri matrikulin, er eitt grønt øki, ið somuleiðis er eitt A1-øki til bústaðarbygging. Í mun til ljósviðurskifti og útsýni verður ikki mett, at íbúðarbygningarnir koma at ávirka grannalagið.

Serstaka byggisamtyktin tryggjar fleiri íbúðir í býnum og býartættar í ein ávísan mun, og er hon sostatt í tráð við bústaðarpolitikkin hjá Tórshavnar kommunu.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í A1

Ásetingar fyri A1 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu eru millum annað:

*1. Loyvt er einans at byggja stakhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð, og eftir serloyvi frá byggivaldinum tvíhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð og raðhús og tílíkar bústaðir fyri eitt húski.*

*Í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrligt avmarkað øki, verða loyvt at byggja íbúðir.*

*Í serstakari byggisamtykt kann víkjast frá ásetingum um tal av hæddum og hæddarásetingum, har lendið er soleiðis háttað, at tað fellur natúrliga inn.*

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
18/03503 Umsókn um byggiloyvi til íbúðarbygging á matr. nr. 877m, Dalastígur 21, Tórshavn

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**
Økið er viðgjørt eftir umhvørvisflokki 1

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
18/03670-4 SERSTØK BYGGISAMTYKT VIÐ DALASTÍG
18/03670-3 Kortskjal 1 yvirlitskort
18/03670-3 Kortskjal 2 skipan av økinum
18/03670-3 Skipan

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | x | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | x | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | x |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekurin mæla til, at nevndin góðkennir serstøku byggisamtyktina fyri Dalastíg, sambært viðheftu skjølum, og beinir málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 13. desember 2018:** Einmælt samtykt.

# 323/18 Skógfriðing

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 11.04.2018 | 71/18 | 18/00982-1 |
| 2 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 03.05.2018 | 30/18 | 18/00982-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 15.08.2018 | 170/18 | 18/00982-1 |
| 4 Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin | 28.08.2018 | 10/18 | 18/00982-1 |
| 5 Kollafjarðarnevndin | 06.09.2018 | 8/18 | 18/00982-1 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2018 | 258/18 | 18/00982-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 05.12.2018 | 360/18 | 18/00982-1 |
| 8 Býráðsfundur | 13.12.2018 | 323/18 | 18/00982-1 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Skógfriðing av fleiri økjum í kommununi.** Framhald av máli nr. 17/01142.

Ynski er um at varðveita og náttúrufriða grønu økini og frílendini í kommununi, tískil er avgjørt at fara undir at kanna møguleikarnar at skógfriða fleiri økir í Tórshavnar kommunu.

Ájavnt við einum vaksandi býi, veksur eisini tørvurin á frílendum, viðarlundum og náttúrufriðaðum økjum, har fólk kunnu njóta friðsæluna og koma burtur frá meldrinum. Nógv nýggj altjóða gransking v.m. vísir greitt, at nútíðar býarbúgvin hevur stóran tørv á rekreativum grønum lendi til heilsubót, bæði við atliti at strongd, rørslu og betri fólkaheilsu sum heild. Eisini vísa kanningar í útlondum, at tættleiki til grøn øki við gróðurseting av viðarlundum o.tíl. økja munandi um fastognarvirðið í grannalagnum. Framsøknir býir nú á døgum leggja tí stóran dent á at menna munandi mongd av frílendum av ymsum slag til sínar býarbúgvar at njóta.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg um viðarlundir, sum seinast broytt við løgtinslóg nr. 110 frá 29. juni 1995 sigur samb. § 3 og 4: at eigarin av skógfriðaðum lendi, skal halda hegn, vegir, gøtur, rudda og gjalda tað, sum tað kostar. Nakrar av ásetingunum í løgtingslógini um viðarlundir eru soljóðandi:

*Tað verður ein treyt í framtíðini fyri almennum studningi til niðursetingar ella rakstur av viðarlund, at friðingarváttan er tinglisin á viðkomandi lendi eftir hesi lóg.*

***§ 3.** Eigari av skógfriðingarskyldugum lendi hevur skyldu at halda haldgott stik rundan um alt lendi, sum kann halda seyði og stórdýrum úti, líka mikið hvør garðskylduna í grundini hevur. Tað er eisini ein treyt, at lendið er vetrarfriðað og hevur hóskandi nógvar breytir. Tað er eigarans skylda at umsita breytirnar og forkoma tílíkum óruddi, sum kann lýta viðarlundina innan og eisini uttanum.*

*Øll forstlig tiltøk eitt nú niðurseting, felling og tynning verða útinnt av skógfriðingarnevndini, sum hevur fullt ræði á øllum vøkstri og dýralívi í viðarlundini.*

*Almenningurin hevur onga atgongu uttan eftir loyvi nevndinnar, men nevndini áliggur at loyva atgongu mest gjørligt uttan at nerva vakstrarlíkindi viðarlundinnar.*

Løgtingslóg um náttúrufriðing, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 110 frá 29. juni 1995:

*§ 2. Uttangarðs er ikki loyvt at byggja hús, búðir, skúr ella a.l. uttan loyvi frá friðingarnevndini. Undantiknir eru tó smærri bygningar, sum eftir gomlum siði vanliga hava verið bygdir uttangarðs í samband við landbúnaðin, tá ið teir ikki skemma natúruna.*
*Stk. 2. Innangarðs eigur ikki at verða bygt uttan loyvi frá friðingarnevndini:*
*1) Undir bakkanum frá vallingini og omaneftir og á økir, ið eru upp til 100 m frá bakkatromini, har eingin fjøra er frá meginflóðarmálanum,*
*2) nærri enn 300 m frá teimum viðalundum, ið Føroya viðalundanevnd hevur um hendi,*
*3) nærri enn 300 m frá vøtnum, ið hava størri vídd enn 1 ha og frá áum, ið eru meira enn 4 m breiðar í botninum.*

**Upplýsingar frá umsitingini**
Verandi samstarv er skipað soleiðis, at býargartnarin hjá Tórshavnar kommunu saman við deildarleiðaranum hjá Skógrøkt, samskipa arbeiðini í skógfriðaðu økjunum, sum Tórshavnar kommuna eigur; Havnardalur, Kerjar, Grið og Gundadalur, tilsamans 403.000 $m^2$. Daglig røkt planting, tynning, rudding v.m. verður fyriskipað av Skógrøkt, umframt viðlíkahald av hegnum, gøtum og veitum. Árligur rakstur er 1 mió. kr. um árið.

Hjálagt er kort, ið vísir møgulig øki at skógfriða og tey skógfriðaðu økini, ið eru í býnum.

Umsitingin skjýtur upp ítøkiliga at fara undir tilgongd at skógarfriða hesi lendi:

- **Havnardalur**, økið millum Sandvegin-Sandá-Liasarveg og Velbastaðvegin og somuleiðis vestanfyri Sandá frá Velbastaðvegnum til hagamarkið millum Norðara – og Syðra Spakaseyð.
- **Ternuryggur**, brekkuna millum gøtuna Vestan Hoydalsá - Tóru-ogTuriðargøtu og Óluvugøtu, og millum Birnugøtu og Vestan Hoydalságøtuna og Sundsvegin
- **Kaldbak**, økið undir útstykkingini á Fløtum
- **Argir**, undir Hamrinum frá Argjaboða - Kvíggjartún/Hóvabrekku
- **Signabøur** v.f og s.f Flatnabø úttykkingina, matr.nr 280c
- **Kollafjørður,** millum Myllutunguánna og Kirkjuánna, matr.nr. 107a
- **Nólsoy** øki við Hvítthjalla norðuri á Boða matr. nr. 113 og 141a
- **Velbastaður,** øki millum Ervaveg og Velbastaðvegin
- **Hestur,** matr. 102 við Svimjihøllina
- **Norðradalur,** matr.nr. 20a partur av Kongshaga
- **Syðradalur,** við Syðradalsá millum landsvegin og bøgarðarnar
- **Kirkjubøur,** matr.nr. 21b, inni á Fjósi millum Geilina og bøgarðin

og at samráðast við staðbundnu feløgini, avvarðandi myndugleikar, eigarar, festarar og brúkarar. Miðað verður eisini eftir at skipa áhugafeløg á staðnum.

**Onnur viðurskifti, sum kunnu hava týdning fyri málið**
Kommunur, ið ynskja at skógfriða øki, mugu nevndarviðgera málini innanhýsis, áðrenn málið verður sent um skógarfriðing til skógfriðingarnevndina.

Ein skógarfriðing tryggjar at trø og runnavøkstir fáa frið at vaksa seg stór, og tað tekur eini 40-50 ár, áðrenn tað byrjar at líkjast viðarlund.

Um eitt økið skal skógarfriðast ella ein skógfriðing avtakast, skal málið leggjast fyri skógfriðingarnevndina.

**Umhvørvisárin**
At skógarfriða og gróðurseta bøtir um alheims $CO_2$ javnvágina, hevur fagurfrøðiliga ávirkan á landsløg og náttúrumyndina, umframt at skapa lívsumstøður til fugl, skordýr o.m.a.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Málið hevur ikki verið til ummælis hjá øðrum deildum.

**Skjøl**
Skógfriðing_Bygdir, j. nr. 18/00982-2
Skógfriðing_Tórshavn, j. nr. 18/00982-3
Skógfriðing_Kollafjørður, j. nr. 18/00982-4
Skógfriðing_Kirkjubøur, j. nr. 18/00982-5
Skógfriðing_Signabøur, j. nr. 18/00982-6
Løgtingslóg um skógfriðing, j. nr. 18/00982-7

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingar avleiðingar** | x | x | x | |
| **Umhvørvis avleiðingar** | x | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Virkandi býararkitekturin mælir nevndini til at umrøða heildaruppskotið til øki at skógfriða og hvørji øki skulu raðfestast og fyrireikast til skógfriðing, og at beina málið í náttúru- og umvhørvisnevndina, fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. apríl 2018:** Samtykt at arbeiða viðari við uppskotinum og at beina málið í staðbundnu nevndirnar og náttúru- og umhvørvisnevndina.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 03. mai 2018:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og at fáa avleiðingarnar lýstar.

**Ískoyti:**
Náttúru- og umhvørvisnevndin samtykti at fáa avleiðingarnar av at skógarfriða lendið lýstar. Avleiðingarnar verða lýstar niðanfyri:

Tinglýst skógarfriðað øki kann ikki longur brúkast til annað enn planting og upplivingar, ið eru tengdar at træ- og runna vøkstrum, sum fulglalív, skordýr, soppavøkstir, ymiskum fjølbroyttum urtagróðri og góðari lívd. Umframt til hugsavnan og ró. Skógarfriðing tryggjar, at trø og runnavøkstir fáa frið at vaksa seg stór, og tað tekur eini 40-50 ár, áðrenn tað byrjar at líkjast viðarlund.

Neyðugt er, at økið eisini er tinglýst vetrarfriðað, soleiðis at seyður ella annar fenaðaur ikki hevur rætt til bit á økinum.

Loyvi krevst, tá byggjast skal nærri enn 300m frá tinglýstum friðaðum viðarlundum innangarðs. Tað loyvið krevst frá friðingarmyndugleikunum, náttúru- og yvirfriðingini. Víst verður á, at tað kann hava avmarkingar á verandi og komandi byggilendi, um økið uppat hesum verða skógfriðað, tí bygging nærri enn 300m krevur loyvi frá friðingarmyndugleikanum. At skógarfriða millum býlingar og útsykkingar í verandi býi verður mett trupult, tíðar- og orkukrevjandi, dømi er skógarfriðaða trøðin við útvarpshúsið.

Kommunan, sum eigari av skógfriðaðum lendi, skal gjalda tað, sum tað kostar at skipa og halda hegn, gøtur, beinkir og upprudding. Gróðurseting og tað, sum harav stendst, er undir ábyrgd hjá skógfriðingarnevndini. Fíggjarávirkan, fyri verandi friðaðar viðarlundir, er pr. $m^2$ er 2,50 kr/ár.

Kommunur, ið ynskja at skógfriða økið, mugu nevndarviðgera málini innanhýsis í avvarðandi nevndum og býráði, áðrenn málið um skógarfriðing verður sent til skógfriðingarnevndina.

Um eitt øki skal skógarfriðast ella ein skógarfriðing skal avtakast, skal málið leggjast fyri skógfriðingarnevndina.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg um viðarlundir, sum seinast broytt við løgtinslóg nr. 110 frá 29. juni 1995 sigur samb. § 3 og 4: at eigarin av skógfriðaðum lendi, skal halda hegn, vegir, gøtur, rudda og gjalda tað, sum tað kostar. Eitt økið á t.d. 100.000 m2, sum verður skógfriðað, kostar kommununi kr. 250.000 pr/ár í rakstrarútreiðslum.

Fundur hevur verið við leiðaran á Skógrøktini, har tosað varð um, hvar frægast var at skógfriða lendið til alment gagnlig endamál. Fleiri egnaðið øki eru at skógfriðað, og avtalað varð at samstarva neyvt um skipan av nýggjum viðarlundum.

Grundað á omanfyri standandi verður í fyrstu atløgu mælt til at velja økið at skógfriða, ið liggja 300m frá bygdum øki.

**Ítøkilig øki at skógarfriða**

| Matr.nr. | Eigari | Vídd $m^2$ | Ummál m | Hegn/stik | Brúk /leiga | Kostnarmeting kr |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 55-1165, 1164a og 1160a Tórshavn | TK | 47.860 | 920 | er stikað | hundafeløgini, traðarleigumál | 390.226 |
| 38-50a Velbastaður | BST | 24.450 | 675 | ikki stikað | festijørð fungagimbrar | 2.649.500* |
| 51-132b, 145a, 107a Kollafjørður | BST TK | 9.896 | 485 | er stikað | festijørð og kommuna | 634.000 |

*Herav er keypsprísur fyri landsjørð 24.450 x 90 = 2.3 mió.
*Prísirnir eru samb. Búnaðarstovuni. Søla av landsjørð uml. 90 kr/$m^2$

**Avloysing av vetrarbiti 0,7 kr/$m^2$

Kostnaður at skógarfriða og matrikulera v.m.:
(dømi um ymisk gjøld fyri viðarlundaruppskotið í Havnardali)

- Friðingarbræv (meting): kr. 5.000
- Matrikulering: 4000 + 1% av mettum jarðarprísi (90x47860x1%) kr. 47.074
- Tinglýsingaravgjald (meting) kr. 1.000
- Avloysing av vetrarbiti: (0,7 x 47.860) kr. 33.502
- Stik (um tað verður kravt): (200 x 920) kr. 184.000
- Árligt viðlíkahald: (2,50 x 47.860) kr. 119.650

Tilsamans kr. 390.226

Harumframt
- Velting: av økjum til planting 25 kr/$m^2$
- Gøtugerð: 1000-1500 kr/lbm

**Skjøl:**
ViðarlundHavnardalu18_00982.pdf j.nr. 18/00982-11
ViðarlKollafj1800982.pdf j.nr. 18/00982-12
ViðalVelbasta18_00982.pdf j.nr. 18/00982-13

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla til at góðkenna staðsetingarnar, at senda málið til friðingarmyndugleikarnar til viðgerðar, áðrenn málið aftur verður at leggja fyri byggi- og býarskipanarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. august 2018:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.
Ein minniluti, Helena Dam á Neystabø mælir til at fara á ástaðarfund, áðrenn støða verður tikin til málið.

**Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin 28. august 2018:** Staðbundna nevndin tekur ikki undir við staðsetingini og mælir til at málið verður tikið uppaftur í byggi- og býarskipanarnevndini til nýggja staðseting í samráð við borgararnar á Velbastað. Eisini ynskir nevndin at borgarafundur verður hildin um málið.

**Ískoyti:**
Kunnað verður um málið.

**Kollafjarðarnevndin 06. september 2018:** Staðbundna nevndin ynskir umhugsingartíð og vendir aftur skrivliga hvussu víðari skal farast fram.

**Ískoyti:**
**Havnardalur**, økið heimanfyri Sandvegin millum Sandá og Liasarveg, eru tvær traðir, sí hjálagda kort.

Matr.nr. 1164 a og 1165, fyrr tvær traðir, vídd ávikavist 10.430 $m^2$ og 9496 $m^2$, sum Axel Hansen bóndi velti í 1940'unum. Kommunan keypti traðirnar í 2005 fyri 2.4 mill. til frílendisbrúk hjá borgarunum í býnum. Traðirnar liggja dygst heimanfyri Sandvegin. Har er fitt tjørn á økinum, um 1100 $m^2$ til víddar. Hús var á trøðni, tað varð tikið niður. Ætlan var at gera nýtt hús, sama vídd, sum tað, ið var. Nakað av trøum er gróðursett fram við Liasarvegi.

*Skógfriðing krevur vanliga haldgott hegn í seyðahøgum standi, og er partur av hesum traðunum hegnaður.

Skotið verður upp at skógarfriða matr. nr. 1164a og 1165.

Kostnaðarmeting fyri at friða 1164a og 1165 tils. 19.926 $m^2$.

- Friðingarbræv (meting): kr. 5.000
- Matrikulering: 4000 + 1% av mettum jarðarprísi (90x19.926x1%) kr. 17.933
- Tinglýsingaravgjald (meting) kr. 1.000
- Avloysing av vetrarbiti: (einki, TK eigur lendið) kr. 0
- Stik øki (um tað verður kravt)*: (200 x 200) kr. 40.000
- Árligt viðlíkahald: (2,50 x 19.926) kr. 49.815

Tilsamans **kr. 113.748**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at farið verður undir at skógarfriða matr. nr. 1164a og 1165 í Havnardali, at játta kr.120.000 av konto L62032 Gøta kring Havnina og fiskastykkið til endamálið, at eitt árligt gjald á kr. 50.000 verður at gjalda fyri viðlíkahald av skógarfriðaða økinum av konto 6210 og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 05. desember 2018:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 13. desember 2018:** Samtykt við 11 atkvøðum fyri, 1 ímóti og 1 blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Tróndur Sigurðsson, Helenu Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus og Hallu Samuelsen.

Ímóti atkvøddi: Annfinn Brekkstein

Blankt atkvøddi: Bjørg Dam.

# 324/18 Nýggj serstøk byggisamtykt við Dalavegin, matr. nr. 864a, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 11.04.2018 | 68/18 | 18/01173-1 |
| 2 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 92/18 | 18/01173-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.09.2018 | 180/18 | 18/01173-1 |
| 4 Býráðsfundur | 27.09.2018 | 218/18 | 18/01173-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2018 | 269/18 | 18/01173-1 |
| 6 Býráðsfundur | 13.12.2018 | 324/18 | 18/01173-1 |

**Upprunin til málið:**
Byggi- og býarskipanarnevndin hevur samtykt útstykking á matr. nr. 864a, 864e, 864f, 864g og 864h við Dalavegin, Tórshavn. Av tí at tey flestu grundstykkini eru minni enn 500 $m^2$ til støddar, skal serstøk byggisamtykt gerast.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Samlaða víddin á útstykkingini er uml. 6900 $m^2$. Søkt er um at útstykkja 12 grundstykkir – 9 til stakhús og 3 við møguleika fyri at byggja tvíhús. Harumframt er fríøki, gøtusamband, felags p-pláss og øki til reinsiverk.

Grundstykkini verða millum 400-700 $m^2$ til støddar og fríøkið verður uml. 700 $m^2$.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
17/03444 – Útstykking á matr. nr. 864a, við Dalavegin í Tórshavn

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Virkandi býararkitekturin mælir til at góðkenna uppskotið um nýggja serstaka byggisamtykt við Dalavegin og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í sambandi við almennu hoyringina um uppskot um nýggja serstaka byggisamtykt við Dalavegin hevur Tórshavnar kommuna fingið eitt mótmælisskriv. Umboð fyri grannaognirnar seta í høvuðsheitum fram hesar viðmerkingar og sjónarmið í mótmælisskrivinum:

- Fýlst verður á, at verandi tilfar er ógreitt og ófullfíggjað, og at eingin verulig grundgeving er fyri broytingina av byggisamtyktina. Byggivaldið eigur at fylgja galdandi reglum og at gera sjálvstøðugar fakligar metingar.

- At talan er um vánaliga borgaratænastu og vánaligan fyrisitingarsið, at umsitingin ikki vendir sær beinleiðis til grannarnar, sum verða ávirkaðir av broytingini, og at talan er um eina almenna hoyring við stuttari freist.

- Talan er um eina broyting, sum minkar um virðið hjá grannunum. Harafturat verður týdningurin av byggisamtyktum lagdur fram, og víst verður á, at tílík útstykking og bygging, sum talan er um, er í mótstríð við endamálið at broyta eina byggisamtykt uttan eina fullgóða grundgeving.

- Økið vestanfyri Dalavegin er sermerkt við nýggjum vælgjørdum sethúsum, og hava tey gjørt íløgur í bæði hús og grundstykkir, har byggingin er tillagað verandi byggisamtykt, sum nú er ætlanin at broyta, og ikki er hóskandi at byggja tvíhús tætt upp at hesum húsum.

- At byggingin upp at matr. nr. 864o, 864k, 866e og 866d verður sera tøtt, tí at hesi húsini longu eru bygd tætt við markið. Umframt at grannar á matr. nr. 868c, 868d, 868e og 868f fara at missa útsýnið, serliga tí talan er um smærri grundstykki og tvíhús.

Umsitingin hevur viðgjørt mótmælið, og eru viðmerkingar og sjónarmið ikki grundað á galdandi reglur og byggisamtyktir, sum sipað verður til, tí talan er ikki um eina broyting av verandi byggisamtykt, men um eina nýggja serstaka byggisamtykt.

Økið, ið talan er um, liggur í umráðispartinum A1, og sambært ásetingunum fyri umráðispartin eru hesar ásetingar galdandi:

1. *“Loyvt er einans at byggja stakhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð, og eftir serloyvi frá byggivaldinum tvíhús...”.*

2. *“Grundstykkini skulu vera í minsta lagi 500 m2. Tá byggingin verður framd eftir serstakari byggisamtykt, kann býráðið loyva, at grundstykkini eru minni enn 500 $m^2$, tó í minsta lagi 400 $m^2$ fyri stakhús og 300 $m^2$ fyri hvønn partin av einum tvíhúsum ella raðhúsum. Ein partur av teirra minstuvídd kann verða lagdur sum felagslendi og sum bilstøðil.”*

3. *“Útstykking verður einans loyvd, um hon hóskar við eina útstykkingarætlan, sum byggivaldið hevur góðkent fyri eitt náttúrliga avmarkað øki, og tá ið byggibúningin annars er tryggjað sambært vanligu útstykkingartreytum kommununnar.”*

Byggi- og býarskipanarnevndin hevur samtykt nýggja útstykking á matr. nr. 864a, 864e, 864f, 864g og 864h við Dalavegin, og av tí at tey flestu grundstykkini er minni enn 500 $m^2$ til støddar, skal serstøk byggisamtykt gerast, og verður hetta gjørt við heimild í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir frá 21. mai 1954. Talan er um eina nýggja serstaka byggisamtykt, sum er grundað á eina góðkenda útstykkingarætlan. Byggivaldið fylgir tískil eisini galdandi reglum.

Endamálið við serstøku byggisamtyktini er at skipa bústaðarbygging á økinum, sum frammanundan liggur í A1 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, sum er øki ætlað til bygging. Grannar í økinum kunnu tískil ikki tryggja sær frítt útsýni, og at hús ikki verða bygd tætt upp at teirra matrikli.

**Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 19 frá 18. mars 2013**
***§ 6. 1)*** *Áðrenn uppskot um byggisamtykt verður sent landsstýrismanninum, skal tað verða lagt fram í minsta lagi 3 vikur til alment eftirlits á einum fólki atkomuligum staði. Kommunan skal frammanundan á vanligan hátt kunngera, at byggisamtyktin er framløgd til eftirlits, og kunngerðin skal skila til, hvørt økið tað er, ið uppskotið umfatar. Mótmæli móti uppskotinum, og broytingaruppskot mugu verða send kommunustýrinum, áðrenn 6 vikur eru lidnir frá kunngerðardegnum.*

Øllum er tryggjað smbr. §6 í byggi- og býarskipanarlógini, at koma til orðanna og gera mótmæli til ætlaðar broytingar. Sostatt kunnu grannar og onnur blíva hoyrd, nevniliga við at gera síni møguligu mótmæli galdandi. Í hesum máli lá uppskotið um nýggja serstaka byggisamtykt frammi alment frá 30. apríl til 11. juni 2018.

Broyting í byggisamtyktum og uppskot til nýggjar serstakar byggisamtyktir eru at meta sum eitt reguleringsamboð og ikki ein vanlig fyrisitingarlig avgerð. Harvið verður tryggjað við lóg, at allir viðkomandi aktørar verða “hoyrdir” í tíðini, har broytingin liggur frammi alment. Tí verða broytingar av byggisamtyktum ikki sendar ávísum borgarum til hoyringar, men til allan almenningin til viðmerkingar.

*“Á vanligan hátt kunngera”* verður lisið sum kunngera á heimasíðu, skal lýsast í avísum og framløgd í fysiskum formi á t.d. Snarskivuni. Tað eru eingi formlig krøv til t.d. at sendast skal skriv til ávísar borgarar. Tað at broyta eina byggisamtykt er at meta sum eitt reguleringsamboð og kann samanberast við ”lóggávubroyting” og rakar yvirskipað.

Feilur var í tilfarinum til almennu hoyringina, tí okkurt skjali vantaði, men talan var ikki um skjal, sum kundi havt ávirkan á tað, sum mótmælt varð um. Tað er tó sera óheppið, at tilfarið ikki var fullfíggjað, sum somuleiðis verður víst á í mótmælisskrivinum. M.a. av hesi orsøk verður mælt til at leggja málið til almenna hoyring av nýggjum

**Aðrir upplýsingar frá umsitingini:**
Ein partur av Stóragarði er á økinum, har nýggja útstykkingarætlanin er ætlað. Grótgarðurin í økinum er áleið 75 metrar, og liggur fram við markinum á fýra matriklum, ið allir eru privat ogn. Stórigarður er ikki friðaður, men ynski er lagt fram um at varðveita garðin ella partar av

honum, og at kanna hvørjir møguleikar eru í hesum sambandi. Sí skjalið *Stórigarður*, sum er mál stovnað í sambandi við at varðveita garðin ella partar av honum.

Umsitingin hjá kommununi og eigararnir av jørðini eru blivin samd um at koyra eina áseting í serstøku byggisamtyktina, sum skal tryggja, at garðurin verður varðveittur. Tann ásetingin er soljóðandi:

"§2. Stk. 6. *Stórigarður er í økinum, og skal hesin varðveitast. Um grivið verður á grundøkjunum, sum deila mark við Stóragarð, skal hetta gerast í samráð við kommununa."*, sí skjal *Serstøk byggisamtykt – tekstur*.

Í skeytinum til tey grundøkini, sum liggja nærmast garðinum, verður somuleiðis víst til serstøku byggisamtyktina.

Stórigarður liggur vakur og markantur í landslagnum, og hevur søguligt virði sum avmarking til býarskipanina í Havnini. Vísandi til § 6. stk. 2 í lógini um náttúrufriðing, kunnu friðingartiltøk setast í verk í sambandi við at varðveita garðin ella partar av honum.

Í sambandi við at Stórigarður er í sama øki, sum útstykkingarætlanin við Dalavegin er, er málið sent til hoyringar hjá friðingarmyndugleikunum. Náttúrufriðingarnevndin sigur í afturskrivi, at teir fara at heita á Yvirfriðingarnevndina um at friða garðin, sí skjal *4764_001.pdf*. Yvirfriðingarnevndin er ikki komin við endaligum svari, um teir fara at friða garðin og ógreitt er, hvussu long viðgerðartíðin av einum slíkum máli er. Um Yvirfriðingarnevndin avgerð at friða Stóragarð, gera teir ásetingar viðvíkjandi bygging nær garðinum. Hugsast kann, at ein áseting er, at øll bygging innan fyri eina ávísa frástøðu frá garðinum skal sendast til hoyringar hjá friðingarmyndugleikanum.

Av tí at tað er óvist, hvussu langa viðgerðartíð eitt slíkt mál hevur í Yvirfriðingarnevndini, mælir umsitingin hjá Tórshavnar kommunu til at góðkenna serstøku byggisamtyktina fyri Dalavegin, við ásetingini um, at allur grevstur á grundøkjunum, sum deila mark við Stóragarð, skal gerast í samráð við Tórshavnar kommunu. Um Yvirfriðingarnevndin avger at friða garðin, so skulu byggimál í økinum somuleiðis sendast friðingarmyndugleikanum til hoyringar, men hettar verður avgreitt so hvørt sum umsóknir um byggiloyvi koma.

Av tí at feilur var í fyrri almennu hoyringini og ein nýggj áseting er í serstøku byggisamtyktini, verður mælt til at leggja málið til nýggja almenna hoyring.

**Løgtingslóg um náttúrufriðing, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 110 frá 29. juni 1995**
*§ 6. Eftir reglunum í hesi lóg kunnu friðingartiltøk setast í verk viðvíkjandi*
*1) økir á landi, á vøtnum og áum, tá ið friðingin má haldast ynskjandi av vísindaligum ella søguligum orsøkum,*
*2) onnur økir, ið bera av í vakurleika, liggja væl fyri ella hava sereyðkennir í landslagnum, plantigróðri ella djóralívi, hava munandi týdning fyri fólk, har íroknað støð, har frítt útsýni er, niðursettar plantur, grótgarðar o.a.t., sum hevur tílíkan týdning,*
*3) einsæris landsløg, sum drangar, gjáir og gil, fossar, klettar, stórir steinar, áir, vøtn, trø og træhópar, tá friðingin tykist ynskjandi í mun til vísindaligt ella søguligt virði, vakurleika ella sereyðkennir.*

**Skjøl:**
Mótmæli til broyting av byggisamtykt við Dalavegin, journal nr. 18/01173-12
Stórigarður, journal nr. 18/01173-15.

Serstøk byggisamtykt – tekstur
4764_001.pdf,

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at góðkenna uppskotið til serstøku byggisamtyktina fyri Dalavegin við ískoyti til frama fyri at varðveita Stóragarð og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. september 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 27. september 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í sambandi við, at serstaka byggisamtyktin við Dalavegin hevur ligið til almenna hoyring, er eitt mótmæli móttikið, sí skjal *Kæra_LHB_HBL_19102019*. Hetta mótmælið er frá einum av grannahúsunum, sum eisini áður hava sent inn mótmælisskriv, og sum hava verið á fundi við umsitingina hjá kommununi um útstykkingina.

Yvirskipað er hetta at siga um málsgongdina og málsviðgerðina:

- Økið liggur í A1 økið, sum er økið ætlað sethúsabygging. Grundstykkir skulu vera minst 500 $m^2$, men um serstøk byggisamtykt verður gjørd fyri økið, kunnu grundstykkir vera minst 400 $m^2$ fyri hvørt stakhús og 300 $m^2$ fyri hvønn partin av einum tvíhúsum. Viðvíkjandi trøðni við Dalavegin varð mett, at tað var hóskandi at loyva grundstykkjum minni enn 500 $m^2$, m.a. grundað á støddina á grundstykkjum í nærumhvørvinum, lendisviðurskiftunum, einum ynski um at býartætta og at fáa fleir bústaðir í býnum.
- Málið varð lagt til fyrstu almennu hoyring 24. apríl.
- 11. juni varð fyrsta mótmæli frá grannum móttikið, har m.a. víst varð á ónøktandi tilfar í sambandi við almennu hoyringina. Sí skjal *Mótmæli til broyting av byggisamtykt við Dalavegin.*
- 16. juli kom ein viðmerking frá einum øðrum granna, sí skjal *Spurningur viðvíkjandi broyting í byggisamtykt á Dalavegnum*.
- 1. oktober: Loyvi frá Yvirfriðingarnevndini, sí skjal *Viðmerkingar frá Yvirfriðingarnevndini*.
- Orsakað av manglandi tilfari í sambandi við hoyringina og at eitt nýtt ískoyti viðv. varðveiting av Stóragarði varð málið lagt til nýggja almenna hoyring 8. oktober.
- 17. oktober var fundur við fýra umboðum frá grannalagnum, sí skjal *17-10-18_Fundarfrágreiðing_fundur við grannar*.
- 19. november kom triðja viðmerkingin/mótmæli frá einum grannahúsi, sí skjal *Kæra_LHB_HBL_19102019*.

Mótmælisskrivið vísir í stóran mun á eina áskoðan og ónøgd við býarskipan í Tórshavnar kommunu sum heild.

Í einum grannalagi, sum altíð hevur ligið upp at eini grønari fløtu og einum útsýni, ið ikki hevur verið órógvað av bygging uppat, er tað sjálvsagt harmiligt at missa hesar ágóðarnar. Hetta er tó eitt øki mitt í býnum, sum hevur ligið sum byggiøki í longri tíð, og var tað sostatt nokk bert ein spurningur um tíð, áðrenn bygt varð í økinum.

Viðvíkjandi tí ítøkiliga málinum, so eru tað í høvuðsheitum hesi viðurskifti, ið grannarnir vísa á og mótmæla:

1. Umsitingin tykist at dylja teirra mistøk í málsviðgerðini og lýkur ikki góðan fyrisitingarligan sið, tá tað kemur til samskifti við mótmælarar.
2. Við størri stykkjum er størri sannlíkindi fyri, at fólk byggja í einari hædd.
3. Í Býaratlasinum verður býarmyndin við Dalavegin lýst sum dømi um eitt útsýni og linjur, sum miða seg eftir og peika á virði í býarmyndini, sum eiga at vera havd í huga, tá nýggjar útbyggingar leggjast aftur at býnum.
4. Broytingaruppskot: at tað í serstøku byggisamtyktini verður álagt, at ikki má byggjast hægri enn 1 hædd + hálv hædd, umframt krav um flagtekjur.

Ad. 1 – Í sambandi við fyrstu almennu hoyring av málinum vóru nøkur skjøl, ið ikki vóru at síggja á heimasíðuni hjá Tórshavnar kommunu. Talan var um kortskjølini, ið vístu staðseting og skipan á økinum. Hetta vístu grannarnir á í fyrsta mótmælinum, og var tað m.a. av hesi orsøk, at málið varð lagt til nýggja almenna hoyring. Annars hevur almenna hoyringin av nýggju serstøku byggisamtyktini verið sum ásett við lóg og sambært vanligu mannagongd kommununnar.

Fyrsta mótmælisskriv frá grannunum varð móttikið 11. juni. Hetta var undirskrivað av fleiri grannum. Tað er hetta mótmælisskrivið, sum víst verður á, at tey ikki hava fingið svar uppá enn. Tó skal sigast, at svarið varð sent júst sama dag, sum síðsta mótmælisskriv varð móttikið.

16. juli kom ein viðmerking, frá eini aðrari teldupostadressu, men hesin avsendarin var eisini ein av teimum, sum hevði skrivað undir uppá fyrra mótmælið. Hesin fekk svar í telduposti 20. august, og orsakað av at hesin stóð sum tann fyrsti, sum hevði undirskrivað fyrra mótmælið, hevði umsitingin tað fatan, at hesin var ein av umboðsfólkunum í grannalagnum. Mett var tí, at hetta var eitt nøktandi fyribils svar, inntil tann politiska viðgerðin var liðug.

Harumframt hevur umsitingin, eftir áheitan frá grannunum, verið á fundi hin 17. oktober, m.a. við tey, ið stóðu fyri at senda tað fyrsta og tað næsta mótmælisskrivið, áðrenn endaligt formligt svar uppá mótmælisskrivið varð sent tann 19. november 2018.

Ad. 2 – Hesin pástandur er torførur at spáa um, men royndirnar hjá Tórshavnar kommunu vísa, at fólk í stóran mun byggja so nógv sum gjørligt, hetta óansæð um stykkini eru 400 $m^2$, 500 $m^2$ ella meira.

Ad. 3 – Myndin frá Tórshavnar býaratlasi, sum mótmælið vísir á, vísir ein útsýnisdepil uppi á Oyggjarvegnum, og leggur atlasið upp til, at útsýnið úr hesum deplinum oman móti Tinganesi, havnarlagnum og Skansanum verður varðveitt í mestan mun.

Hóast linjan, ið gongur frá Oyggjarvegnum til Tinganes, havnarlagið og Skansan, gongur ígjøgnum útstykkingina við Dalavegin og grannaøkið, so er hetta ikki at skilja sum at býaratlasið leggur upp til, at øll í økjunum, sum linjan gongur ígjøgnum, skulu hava frítt útsýni til Tinganes.

Ad. 4 – Ásetingarnar viðvíkjandi hædd, byggi- og nýtslustigi í serstøku byggisamtyktini við Dalavegin eru tær somu, sum eru galdandi fyri A1 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Tað er eisini sambært hesum ásetingum, nærmastu grannaløg til útstykkingina við Dalavegin hava bygt eftir. Somuleiðis eru grundstykkini í nærmastu

grannaløgum í stóran mun uml. 400 $m^2$, og brýtur hendan ásetingin í serstøku byggisamtyktini sostatt ikki heildarmyndina í økinum.

Um ásetingar verða gjørdar um, at mest loyvda hædd er 1 + ein hálv hædd og einum kravi um flagtekju, kemur hendan útstykkingin at skilja seg sjónliga burturúr heildarmyndini av økinum, og eru hettar ásetingar, ið ikki eru sambært vanligari føroyskari byggisamtyktar siðvenju.

**Skjøl:**
*Kæra_LHB_HBL_19102019,* journal nr. 18/01173-37.
*Mótmæli til broyting av byggisamtykt við Dalavegin,* journal nr. 18/01173-9.
*Spurningur viðvíkjandi broyting í byggisamtykt á Dalavegnum,* journal nr. 18/01173-13.
*Viðmerkingar frá Yvirfriðingarnevndini*, journal nr. 18/01173-30.
*17-10-18_Fundarfrágreiðing_fundur við grannar*, journal nr. 18/01173-32.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at halda fast við verandi uppskoti um serstaka byggisamtykt við Dalavegin og at beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 13. desember 2018:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri, ongari ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Annfinn Brekkstein Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø og Halla Samuelsen.

Blankt atkvøddi: Bjørg Dam.

# 325/18 Skipan av økinum omanfyri Marknagilsvegin og undir Fjalli

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.05.2018 | 126/18 | 18/01811-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.05.2018 | 145/18 | 18/01811-1 |
| 3 Býráðsfundur | 24.05.2018 | 129/18 | 18/01811-1 |
| 4 Tekniska nevnd | 27.11.2018 | 62/18 | 18/01811-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2018 | 259/18 | 18/01811-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 05.12.2018 | 361/18 | 18/01811-1 |
| 7 Býráðsfundur | 13.12.2018 | 325/18 | 18/01811-1 |

**Upprunin til málið:**
Málið er byrjað sum framhald av málinum um keyp av lendi til bústaðarbygging, sum Sjálvsognarfelagið Kirkjubøarvegur hevur havt ynski um at keypa.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Økið, sum felagið ynskti at keypa til bústaðarbygging, er ikki partur av eini størri heildarætlan, og er í løtuni ongin heildarætlan fyri økið og matriklarnar hjá kommununi í nærumhvørvinum.

Býurin veksur og byggilendini gerast færri í tali, tá hugsað verður um bygging innanfyri verandi bý. Tískil er eyðsætt at skipa alt økið, soleiðis at samanhangur verður ímillum bygging, vegasamband, atkomu, fríøki, parkering og virksemi í økinum. Her verður hugsað um alt økið og matriklarnar hjá kommununi omanfyri undir Gráasteini og niðan til byggingina "Mark", sí kortskjalið *Skipan av økinum_Marknagil* (reyða linjan á kortinum er vegleiðandi). Avmarkaða kortskjalið fevnir um matrikklarnar 1112, 1108, 1107, 1170, 1160a, 1160c, 1172a og 1176.

Avmarkaða økið liggur í umráðispørtunum A1 og A2 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, sum í høvuðsheitum loyvir bústaðarbygging, bæði stakhúsum og íbúðum. Ein heildarætlan stuðlar undir visjónini í bústaðarpolitikkinum, at kommunan framhaldandi útvegar lendi til bústaðarbygging. Umframt bústaðarbygging er eisini møguligt at skipa økið til almennar stovnar, so sum ein møguligan dagstovn, røktarheim v.m.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingarnar fyri umráðispartarnar A1 í 3. grundumráði eru (brot úr almennu byggisamtyktini):

1. *Loyvt er einans at byggja stakhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð, og eftir serloyvi frá byggivaldinum tvíhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð og raðhús og tílíkar bústaðir fyri eitt húski.*

   *Í sambandi við bústaðarøki kann byggivaldið geva serloyvi til annað virksemi sum handlar, smærri vinnuvirki og stovnar, ið natúrliga hoyra býlinginum til, treytað av, at hetta ikki er til ampa ella spillir dámin á økinum sum sethúsabýlingur og sum lúka treytirnar í flokking av vinnuvirkjum í Tórshavnar kommunu.*

2. *Grundstykkini skulu vera í minsta lagi 500 m2. Tá byggingin verður framd eftir serstakari byggisamtykt, kann býráðið loyva, at grundstykkini eru minni enn 500 $m^2$, tó í minsta lagi 400 m2 fyri stakhús og 300 m2 fyri hvønn partin av einum tvíhúsum ella raðhúsum.*

3. *Útstykking verður einans loyvd, um hon hóskar við eina útstykkingarætlan, sum byggivaldið hevur góðkent fyri eitt náttúrliga avmarkað øki, og tá ið byggibúningin annars er tryggjað sambært vanligu útstykkingartreytum kommununnar.*

4. *Byggistigið má ikki fara upp um 0,3*

5. *Nýtslustigið má ikki fara upp um 0,6 fyri stakhús og 0,7 fyri tvíhús, ella raðhús. Tó kann tað fyri grundstykkir til stakhús, sum eru 200 m2 ella minni, fara upp til helvtina hægri og fyri stykkir millum 200 m2 og 500 m2 verða sett javnt minkandi soleiðis, sum mynd 3 vísir.*

   *Í serstakari byggisamtykt kann víkjast frá ásetingum um tal av hæddum og hæddarásetingum, har lendið er soleiðis háttað, at tað fellur natúrliga inn.*

Ásetingarnar fyri umráðispartarnar A1 í 3. grundumráði eru:

1. *Loyvt er einans at byggja hús í fleiri hæddum til bústaðarendamál. Í samband við bygging skal tó bera til at gera rúm til felags nýtslu sum t.d. stovnar, vaskirúm o.a. fyri tey, ið har búgva.*

2. *Útstykking til tilíka bygging verður einans loyvd sambært serstakari byggisamtykt, sum byggivaldið hevur góðkent fyri eitt nattúrliga avmarkað øki.*

3. *Byggistigið má ikki fara upp um 0,25.*

4. *Nýtslustigið má ikki fara upp um 0,8.*

5. *Hús kunnu einans verða bygd við í mesta lagi 5 hæddum umframt nýttum lofti og mugu ikki vera hægri enn 15 m til hægsta punkt við útvegg og 18 m mált til mønuna. Kjallari verður roknaður sum húsahædd.*

**Upplýsingar frá umsitingini**
-

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Áheitan vegna Sjálvsognarfelagið Kirkjubøarvegur um keyp av lendi av matr nr. 1160a, Tórshavn til sethúsabygging, journal nr. 16/03590

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
-

**Umhvørvisárin**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Ongar. Heildarætlanin verður gjørd í samráð við býarverkfrøðingin og teknisku deild.

**Skjøl**

Skipan av økinum_Marknagil, journal nr. 18/01811-2

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla til, at umsitingin kann fara undir at skipa avmarkaða økið til bústaðarbygging og almennar stovnar v.m., at gera eina heildarætlan fyri økið, umframt at játta kr. 200.000 av kt. 6475 til skipan av økinum og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. mai 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2018:**Samtykt at taka undir við Byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. mai 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Ove Mortensen Arkitektavirkið og Arkitektar 99 hava gjørt eitt ávegis uppskot til útstykkingarætlan fyri økið, sí skjal *Presentatión 11-10-2018 TK.*

Endamálið við uppgávuni var, at samskipa alt økið so, at skilagóður samanhangur verður millum ymisku økini í útstykkingini, og samstundis gera eina yvirordnaða ætlan fyri skipan av økinum.

Sum tað fyrsta hevur verið arbeitt við at skipa økið við nøktandi vegatkomu, sum kann røkka øllum økinum, men samstundis eisini gagnnýta økið sum best. Úrslitið eru tvær vegatkomur, ein frá verandi Grásteinsgøtu og ein frá komandi innkomuvegi, sum bindur í Marknagilsvegin. Hendan skipanin hevur við sær, at tað ikki verður gjøgnumkoyrandi til alla útstykkingina frá tí eina vegnum, men metir umsitingin, at tað einans kann gagna útstykkingini við at tað ikki verða alt ov nógvir bústaðir knýttir í somu vegatkomu.

Síðani hevur tað verið arbeitt við at skipa økið við ymiskum slag av bústøðum, bæði í skapi, hædd og slag, umframt at lendið er lagt av til tveir stovnar í økinum. Uppskotið lýsir møguleikarnar fyri at byggja karré bygging við innara garði, ið verjir móti veður og vindi, blokkar, ið eru skiftandi í skurðið, bygging, ið veksur í skala frá sethúsastødd til íbúðarblokkar og lágari bústaðarbygging, ið veksur í hædd upp móti fjallasíðuni. Møguligt er at skipa ymisku byggingina við íbúðum, raðhúsum og sethúsabygging.

Harumframt er grøni parturin av økinum skrásettur, og uppskot til hvussu frílendini verða innarbeitt í útstykkingina er lýst, umframt at víst er á grøna kílan, sum kann styrkjast allan vegin oman í innara part av vesturbýnum.

Næsta stig í ætlanini at skipa økið er at kanna, um vegirnir kunnu liggja soleiðis, sum uppskotið leggur upp til og hvussu vegarbeiðið skal skipast. Mælt verður til, at fáa uttanhýsis ráðgeva at gera hetta arbeiðið.

Neyðugt verður at broyta almennu byggisamtyktina soleiðis, at ymiska bústaðarbyggingin kann fremjast og verður hetta gjørt í sambandi við arbeiðið at endurskoða almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til at ávegis uppskot til útstykkingarætlan verður samtykt sum yvirskipað ætlan fyri økið, at byggisamtyktin, í sambandi við at hon verður endurskoðað, verður broytt samsvarandi uppskotinum, at 100.000 kr. verða játtaðar av konto 6475 til uttanhýsis ráðgeva at kanna vegaføringina og at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 27. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 05. desember 2018:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 13. desember 2018:** Einmælt samtykt.

# 326/18 Broyting av serstøku byggisamtyktini fyri Marknagil

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.09.2018 | 179/18 | 18/03140-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.09.2018 | 220/18 | 18/03140-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2018 | 264/18 | 18/03140-1 |
| 4 Býráðsfundur | 13.12.2018 | 326/18 | 18/03140-1 |

**Upprunin til málið:**
Í sambandi við ætlanir um at bygging, m.a. lestraríbúðir, á matr. nr. 919a og 919b við Marknagilsvegin/Landavegin, hevur Tórshavnar kommuna fingið umsókn um at broyta serstøku byggisamtyktina fyri Marknagil.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Menningin í økinum, sum serstaka byggisamtyktin við Marknagil er, er stór – Glasir er nýliga opnað, bygging av Skúlanum á Fløtum, Musikkskúlanum o.s.f. Alt stórir, hábærsligir bygningar.

Økið liggur í C3 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, sum er øki ætlað miðstaendamálum, skúlum, almennum stovnum og íbúðum. Sambært ásetingunum fyri C3 øki er mest loyvda byggistigið 0,4 og mest loyvda nýtslustigið 0,8.

Í 2011 bleiv serstaka byggisamtyktin við Marknagil gjørd fyri økið. Sambært ásetingunum fyri øki III, sum er galdandi fyri matr. nr. 919a og 919b, er mest loyvda byggistig 0,4 og mest loyvda nýtslustigið 0,5 – altso er nýtslustigið 0,3 lægri í serstøku byggisamtyktini, enn í almennu byggisamtyktini í økinum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri C3 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu:

§ 22. Stk. 3. Byggistigið fyri umráðispartin má ikki fara upp um 0,4.
Stk. 4. Nýtslustigið fyri umráðispartin má ikki fara upp um 0,8.

Ásetingar áðrenn broyting í serstøku byggisamtyktini fyri Marknagil fyri øki III:

§ 3. Stk. 4. Eindin skal nýtast til miðstaðarendamál, t.e. handlar, smærri stovnar, skúlar, skrivstovuhøli, ráðleggingarvirki og tænastuvirki, ið hava samband við hetta og bústaðir.

§ 5. Stk. 4. a) Byggistigið fyri økispartin má ikki fara upp um 0,4.
b) Nettonýtslustigið fyri økispartin má ikki fara upp um 0,5.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Orsøkin til at nýtslustigið er 0,5 fyri øki III í serstøku byggisamtyktini fyri Marknagil er, at økið eisini liggur í C3 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, og í almennu byggisamtyktini, sum varð galdandi í 2011, var mest loyvda nýtslustig í C3 øki 0,5. Í samband við at almenna byggisamtyktin fyri Tórshavnar kommunu bleiv endurskoðað í 2013, varð mest loyvda nýtslustig í C3 øki broytt frá 0,5 til 0,8, sí skjal *Almenn byggisamtyktin – áðrenn endurskoðan í 2013*. Tó er serstaka byggisamtyktin fyri Marknagil ikki blivin endurskoðað sambært broytingini í almennu byggisamtyktini.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Mál nr. 2009-0216: 04-07 Lokalplanur{serstakar byggisamtyktir – Serstøk byggisamtykt fyri økið við Marknagil – broyting av byggisamtykt (2010-2946) – Vesturskúlin.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
*Serstaka byggisamtyktin við Marknagil – áðrenn broyting, j.nr.* 18/03140-2
*Serstøk byggisamtykt fyri Marknagil – broytt 2018, j.nr.* 18/03140-3
*Almenna byggisamtyktin – Áðrenn endurskoðan í 2013, j.nr.* 18/03140-4

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at broyta ásetingarnar fyri nettonýtslustigið fyri økispartin III í serstøku byggisamtyktini fyri Marknagil frá 0,5 til 0,8 og at beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. september 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 27. september 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í sambandi við at broytingin av serstøku byggisamtyktini fyri Marknagil hevur ligið frammi til almenna hoyring, er eitt mótmæli komið, undirskrivað av íbúgvum undir Gráasteini sí skjal nr. 18/03140-9 Hoyringarviðmerking viðv byggisamtykt fyri Marknagili - IMG_3529.

Íbúgvarnir undir Gráasteini skriva, at at teir ikki ynskja, at nýtslustigið verður hækkað. Teir føra fram, at landslagið er fullkomiliga broytt, við tað at tveir stórir skúlar, umframt ein størri handil eru bygdir í umhvørvinum seinastu árini. SEV hevur bygt út við bingjum, og íbúðarblokkar av bingjum verða settir upp. Tey ynskja ikki, at økið verður meira "*avtaglað við nýbygningum, enn mann upprunaliga hevur hildið var forsvarligt og heldur varðveita nakað av luft og útsýni, sum er tað, sum ger økið á fløtum til nakað serligt.*"

Økið liggur sum C3 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Í sambandi við at almenna byggisamtyktin fyri Tórshavnar kommunu varð endurskoðað í 2013, varð tað mett

at verða ráðiligt, at hækka nýtslustigið fyri C3 økir úr 0,5 til 0,8. Serstaka byggisamtyktin fyri Marknagil varð gjørd í 2011, og varð mest loyvda nýtslustigið uppá 0,5, allarhelst grundað á, at tað var tað ásetingarnar í táverandi almennu byggisamtyktini loyvdu.

Umsitingin metir, at tað er ráðiligt, at hækka mest loyvda nýtslustigið í økinum frá 0,5 til 0,8, soleiðis sum ásetingarnar fyri C3 øki í núverandi almennu byggisamtyktini loyva.

Ætlanin er at byggja íbúðir í fleiri støddum í økinum. Sambært serstøku byggisamtyktini og almennu byggisamtyktini er økið ætlað miðstaðar- og bústaðarbygging, t.e. handlar, smærri stovnar, skúlar, skrivstovuhøli, ráðleggingarvirki og tænastuvirki, ið hava samband við hetta og bústaðir. Sum er, er skúli, barnagarður, Sev, handil og nakrar íbúðir í økinum. Mett verður, at tað er hóskandi við fleiri íbúðum í økinum, fyri at tryggja ætlaðu miðstaðar og bústaðarbyggingini í økinum, og av tí økið liggur sum býarvakstrarøki í kommunuætlanini.

Broytingin viðførir fleiri íbúðir og býartætting, og er sostatt eisini í tráð við Bústaðarpolitikkin.

Tekniska deild er í hálvt við skipa ferðsluna í økinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at halda fast við ætlaðu broytingini av nýtslustiginum frá 0,5 til 0,8 og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2018:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 13. desember 2018:** Samtykt við 8 atkvøðum fyri, ongari í móti og 5 blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass og Helena Dam á Neystabø.

Blankt atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Halla Samuelsen, Bjørg Dam og Annfinn Brekkstein.

# 327/18 Broyting av almennu byggisamtyktini fyri matr. nr. 139b, Hoyvík, frá B8 til B7

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2018 | 263/18 | 18/04108-2 |
| 2 Býráðsfundur | 13.12.2018 | 327/18 | 18/04108-2 |

**Upprunin til málið:**
Tórshavnar kommuna hevur fingið umsókn um loyvi at keypa matr. nr. 139b, Hoyvík og er ætlanin at byggja eitt biogassanlegg, sum skal taka ímóti úrdráttum frá alivinnuni og tøðum frá føroyskum bóndum, á økinum.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Økið, sum eftir ætlan verður selt, er 12.000 $m^2$ av matr. nr. 139b, Hoyvík, sum er innasta økið á Skarðshjalla. Í sambandi við ídnaðarvirksemið á Skarðshjalla, so er skilagott at staðseta eitt nýtt biogass anlegg innast á økinum, hetta eisini í sambandi við eina møguliga útbygging/flyting av brennistøðini, ið somuleiðis eyðsæð verður staðsett tætt við biogassanleggið.

Økið, sum ætlanin er at byggja eitt biogassanlegg í, liggur sum B8 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. B8 øki er ætlað virkjum, sum eru í umhvørvisflokki 4-6 sambært umhvørvisflokkingini av virkjum í Tórshavnar kommunu.

Biogassanlegg er í umhvørvisflokki 7, og skal loyvi verða at byggja eitt biogassanlegg í økinum, skal almenna byggisamtyktin fyri økið broytast frá B8 til B7 øki.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri B7 øki eru m.a.:
- *Loyvt er einans at byggja hús til stór vinnuvirki, verksmiðjur, goymslur og tílíkt og til tænastuvirksemi, ið hevur samband við hesi.*
- *Virkini í hesum umráðispartinum skulu kunna flokkast í umhvørvisflokkunum 5 til 7 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.*
- *Byggingin skal verða sett samsvarandi heildarætlan fyri alt økið ella fyri hóskiligar partar av økinum*

Ásetingar fyri B8 øki eru m.a.:
- *Loyvt er einans at byggja hús til vinnuvirkir, her undir umsitingar- og tænastuvirki, verksmiðjur, goymslur og tílíkt og til tænastuvirksemi, ið hevur samband við hesi.*
- *Virkini í hesum umráðispartinum skulu kunna flokkast í umhværvisflokkunum 4 til 6 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.*
- *Bygging skal verða sett samsvarandi heildarætlan fyri alt økið ella hóskiligar partar av økinum.*

Umhvørvisflokking hjá Tórshavnar kommunu:
- *Flokkur 4: Matvøruframleiðsla, bilverkstaðir við og uttan sproytukabinu.*
- *Flokkur 5: Maskinverkstaðir, betongvirkir, sláturvirkir.*
- *Flokkur 6: Størri maskinvirkir, betongvirkir, sláturvirkir, asfaltvirkir.*
- *Flokkur 7: Orkuverk, brennistøð, heilvágs- og psticidframleiðsla.*

**Upplýsingar frá umsitingini**

Eftir ætlan verður ídnaðarøkið á Hjalla víðkað omanfyri verandi virksemið, ið leggur upp til fleiri grundøki og møguleikar til vinnu og ídnað.

Bygging av einum slíkum anleggi er fult í tráð við ætlanina hjá landi og kommunum um at útvinna mest møguligt av grønari orku, samstundis sum hetta tiltak vil verða til stóran frama fyri umhvørvið sum heild.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
18/00908 – Umsókn um keyp av øki burtur av matr. nr. 139b, Hoyvík til bygging av einum biogassanleggi.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**
Biogassanlegg er í umhvørvisflokki 7 sambært umhvørvisflokking av vinnum í Tórshavnar kommunu.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Tá myndugleikaprojekt fyriliggur, skal málið sendast til:

- Umhvørvisstovuna í sambandi við umhvørvisgóðkenning.
- Arbeiðs- og brunaeftirlitið.

**Skjøl**
*Kort_Eftir broyting* – journal nr. 18/04108-3.
*Kort_Áðrenn broyting* – journal nr. 18/04108-3.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at broyta almennu byggisamtyktina fyri matr. nr. 139b, Hoyvík sambært kortskjølunum og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2018:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 13. desember 2018:** Samtykt við 11 atkvøðum fyri, ongari ímóti og tveimum blonkum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Bjørg Dam.

Blankt atkvøddu: Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein.

## 328/18 Kloakk í Villingardalsvegnum í samband við nýggja fjarhitaleiðing.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 29.11.2016 | 116/16 | 16/04362-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 07.12.2016 | 432/16 | 16/04362-1 |
| 3 Býráðsfundur | 15.12.2016 | 346/16 | 16/04362-1 |
| 4 Tekniska nevnd | 27.11.2018 | 68/18 | 16/04362-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 05.12.2018 | 366/18 | 16/04362-1 |
| 6 Býráðsfundur | 13.12.2018 | 328/18 | 16/04362-1 |

**Málslýsing:**
Uppgradering av kloakk- og regnvatnsleiðing frá Villingadali oman í Gundadal.

Verandi kloakk- og regnavtnsleiðing í Villingadalsvegnum og í Gundadalsvegnum krevur umleggingar og er í støðum ikki tíðarhóskandi at taka í móti vaksandi kloakk- og regnvatnsnøgdum. Somuleiðis er økið fram við Villingadalsvegnum óbygt byggiøki A1 og A3. Tað er tí eitt ynski frá at Tórshavnar kommuna fyrireikar seg at taka ímóti og leiða burtur kloakk og regnvatn.

Fjarhitafelagið fer í gongd við at leggja nýggja fjarhitaleiðing frá Blómubrekku oman í Gundadal, hetta er eitt umfatandi grevstrararbeiði og mælt verður til at Tórshavnar Kommuna í hesum sambandi leggur kloakk og regnvatn samstundis sum hetta arbeiðið fer fram.

Ynski er at lýsa tørvin nágreiniligt og lata gera eitt skitsuprojekt og loysn sum støða kann takast til hvussu farast skal fram.

Fíggjarlig viðurskifti:
Samlaði fíggjartørvurin fyri at gera eitt skitsuprojekt, er mettur til kr. 220.000,- sambært fíggjarligu uppgerð j.nr. 16/04362-2 og er ynskið at biðja SMJ at gera arbeiðið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at játta kr. 220.000,- av markaðum íløgum fyri kloakkir fyri 2016, konto 6875 (Kloakkir) og beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 29. november 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 07. december 2016:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 15. desember 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**

Sambært játtanarreglunum skulu lidnar verkætlanir eftirmetast í avvarðandi nevnd, og leggjast fyri býráðið til kunningar.

Verkætlanin verður samstundis lokað og møguligt avlop fellur aftur til íløgukarmin.

Arbeiðið við at gera prosjekt í at dagføra kloakkirnar í Villingardalsvegnum ísv. við leggjan av nýggjum fjarhitaleiðingum er liðugt og avhendað.
Verkætlanin L68030 Kloakk í Villingardalsvegnum í sambandi við fjarhitaleiðing er uppgjørd og vísir eitt avlop álj. kr. 3.984,-.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at avlopsupphæddin á kr. 3.984,- verður, sambært galdandi játtanarreglum um avlop av lidnum verkætlanum, flutt frá verkætlanini L68030, at vera tøkt til konto 6865, og at verkætlanin verður lokað og málið beint í fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

**Tekniska nevnd 27. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 05. desember 2018:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 13. desember 2018:** Kunnað varð um málið**.**

# 329/18 Hugskot/uppskot um nýtslu av tilfari úr Sandoyartunlinum.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 11.04.2018 | 77/18 | 17/03303-2 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.04.2018 | 98/18 | 17/03303-2 |
| 3 Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin | 16.04.2018 | 5/18 | 17/03303-2 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 16.04.2018 | 109/18 | 17/03303-2 |
| 5 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 103/18 | 17/03303-2 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 03.10.2018 | 207/18 | 17/03303-2 |
| 7 Býráðsfundur | 25.10.2018 | 246/18 | 17/03303-2 |
| 8 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.11.2018 | 234/18 | 17/03303-2 |
| 9 Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin | 21.11.2018 | 14/18 | 17/03303-2 |
| 10 Býráðsfundur | 13.12.2018 | 329/18 | 17/03303-2 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Uppskot er komið inn um hvussu ein partar av tilfarinum úr Sandoyartunlinum kundi verið nýtt til at fylla upp út fyri Kirkjubø.

Tað hevur verið landfast millum hólman og land og nú møguleiki er at fáa grót, er upplagt at tað lendið, havið hevur máa burtur, verður tikið aftur og lagt sum eitt prýði fyri Kirkjubø og tey nógvu ferðafólk sum har koma og har Føroya mætastu fornminnir eru.

Støða er ikki tikin til hvat økið skal brúkast til, men nærliggjandi er at brúk er fyri øki til vaksandi ferðavinnuna bæði til lands og á sjónum vestanfyri. Fleiri bygningar og gøtur eru burturmáaðar og fornfrøðingar vita um steinsettar gongugøtur sum peika beina kós út móti hólmanum.

Ætlanin er at lata hólman verið leysan, tí hólmurin er blivin serstakur við tað at fuglur, terna, æða o.a. fuglur eigur har.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Á landi, har fylt verður ímóti, liggur økið í umráðispartinum H, G, D og H1 í serstøku byggisamtyktini fyri Velbastað og Kirkjubø.

Økini eru løgd út sum
H, Frílendi
G, Neyst og bátapláss
D, Havnaøki
H1, Friðað øki

Neyðugt er at broyta byggisamtyktina.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Talan er um at fylla upp út til- og eitt sindur runt um hólman. Vestanfyri verður eitt nýtt øki uppá uml. 65.000 m² og eystanfyri uml. 62.000 m²

Tað er ikki upplýst hvussu nógv grót skal brúkast.

Hetta arbeiði krevur, at stórt grót verður lagt uttast sum brimverja.

<u>Borgarafundur var hildin á Velbastað 20.03.2018</u>
Annika Olsen legði fyri við m.a. at siga, at grótið er eitt stórt tilfangi, tað kann nýtast til planering, vegagerð, ítróttarøki, ídnaðarøki og bakkaverjur.

Teitur Samuelsen greiddi frá teirra ætlan at tyrva grótið í tveimum økjum, við sunnaru omankoyring frá Landsvegnum til Velbastað, at brúka til dyrkingarlendi.

Bjørn Paturson greiddi frá teirra ætlan, at fylla landið uppaftur sum náttúran hevur tikið frá Kirkjubø millum Kirkjubøshólman og landið "Kirkjubøfløtan" har fáast kunnu 65.000 + 62.000 fermetrar hvør síni megin hólman.

Søren Yde frá Holscher Nordberg Architects løgdu fram eitt hugskotskatalog, við uppskotum um hvat grótið kann brúkast til.Herundir nýggj bústaðarøki og ymisk grøn øki í náttúruni.

Stein Olvur Petersen greiddi frá teirra ætlan at fylla upp norðanfyri økið á Gomlurætt, soleiðis at teir fáa eitt nýtt vinnuøki uppá íalt 75.000 m² (til samanlíkningar er vinnuøkið í vika uml. 50.000 m²).

Síðani var orðaskifti, har tað m.a. kom fram:
- at tað er ikki rætt at leggja eftir dyrkaðum lendi
- at tað kunnu fáast góð bústaðarøkir á Velbastað, men so skal kommunan gera íløgur í vegir, kloakkir og leiðingar, umframt skúla v.m.
- at tað at verja fornminnini í Kirkjubø og á Velbastað eigur at verða raðfest høgt.
- at verandi vegur á Velbastað er ov smalur og nú ber til at breiðka vegin við tunnilsgrótinum.

Tað tykist at verða breið semja um, at grótið eigur at verða nýtt til nýtt vinnuøki við Gomlurætt, nýggj bústaðarøki og at verja fornminnini.

Marin Katrina Frýdal rundaði av og segði m.a., at vit fara at hava ein borgarafund aftur.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Kommunan hevur 4 mál um grótið úr Sandoyartunlinum, tey eru:
1. Tórshavnar kommuna, j.nr. 17/02930 Útstykkingar, fríøkir o.a.
2. Tunnilsfelagið, j.nr. 17/00760 Umsókn um at tyrva grótið
3. J&K Petersen, j.nr. 18/00817 Umsókn um vinnuøki á Gomlurætt
4. Bjørn Paturson o.fl., j.nr. 17/03303 Kirkjubøfløtan og fornminnir

Tórshavnar kommuna skal taka støðu til tey 4 uppskotini sum eru komin inn.

Tá støða verður tikin til uppskotini, eiga fylgjandi viðurskifti at verða tikin við í metingina:
- Ætlanin eigur so vítt gjørligt at verða til gagns fyri almenningin, vinnuna ella onnur, soleiðis at tilfeingið verður brúkt á skilabesta hátt.
- Ætlanin eigur so vítt gjørligt at taka atlit til náttúruna.
- Ætlanin eigur so vítt gjørligt at taka atlit til umhvørvið og í tí sambandi eigur ein loysn at verða funnin, har grótið verður flutt sum minst.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Umsóknin krevur, at byggisamtyktin verður broytt.

**Umhvørvisárin**
Er viðgjørt eftir umhvørvisstigi 1-2

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Byggi- og umhvørvisdeildini:
Skal ætlanin fremjast, so skulu hesi viðurskifti koma upp á pláss:
- Ognarviðurskiftini, økið talan er um, er í dag sjógvur, men inni við land eru 2 eigarar, tað er Sóknarkirkjan og Føroya Jarðargrunnur
- Friðingarmyndugleikarnir skulu geva loyvi.
- Byggisamtyktin skal broytast
- Prosjekt skal gerast, sum vísir hvussu økið verður fylt upp, hvussu ætlanin er at skipa økið, siglingarrennur o.a.

**Tekniska deild:**
Býarverkfrøðingurin hevur verið við til at lýsa málið.

**Viðmerkingar frá øðrum myndugleikum:**
Friðingarmyndugleikarnir skulu viðgera málið
Landsverk skal viðgera málið, í sambandi við at landsvegur liggur har.

**Skjøl**
Skjøl sum eru tøk í sambandi við viðgerðina av málinum:
- Uppskot, j.nr. 17/03303-1

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**
Fíggjarligu viðurskiftini eru ikki lýst

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin, leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini, býarverkfrøðingurin og virkandi býararkitekturin mæla til at kommunan svarar uppskotstillaranum, at áðrenn støða verður tikin til málið, má verkætlanin lýsast nærri við tekningum og frágreiðingum, herundir eisini fíggjarligu viðurskiftini.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. apríl 2018:** Útsett.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. apríl 2018:** Samtykt at senda málið til hoyringar í kirkjubøar- og velbastaðarnevndini og at leggja málið fyri nevndina aftur á eykafundi skjótast til ber.
Marin Katrina Frýdal luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin 16. apríl 2018:** Nevndin mælir frá at brúka grótið til uppfylling í Kirkjubø, men at mæla til at bakkaverjan verður gjørd sum skjótast.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 16. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við Kirkjubøar/Velbastaðarnevndini.
Marin Katrina Frýdal luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Kunnað verður um málið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Fundur var við Tjóðsavnið 24.09.2018 og var málið um bakkaverjuna umrøtt. Fundur hevur í juni mánað verið millum Tórshavnar kommunu, Landsverk og Tjóðsavnið, har tosað varð um hvat kann gerast fyri at fáa eina nøktandi bakkaverju. Ætlanin er at tryggja vegin niðan fyri múrin, umframt eitt horn í kirkjugarðinum og at gera brimverju undir sjónum longur úti, soleiðis at brimið verður steðgað í at máa undan kirkjuni. Tað varð upplýst á fundinum, at Landsstýrið hevur sett 1 mió. kr. av til arbeiðið, og at hetta er ein verkætlan fyri seg.

Umboðini fyri Tjóðsavnið søgdu harumframt, at hetta projektið, at fylla út ímóti hólmanum, ikki er nakað sum savnið fer at mæla til, tí hetta fer at broyta økið fullkomiliga.

Harumframt verður víst á, at staðbundna nevndin fyri Kirkjubø og Velbastað mælir frá at brúka grótið til uppfylling í Kirkjubø, men at bakkaverjan verður gjørd sum skjótast.

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla frá, at farið verður víðari við hesi verkætlanini og mæla til at verkætlanin verður lokað og send í býráðið til kunningar. Mælt verður samstundis til at arbeiðið at skipa nøktandi bakkaverju, heldur fram.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 03. oktober 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Marin Katrina Frýdal luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 25. oktober 2018:** Atkvøtt varð um tilmælið frá borgarstjóranum um at beina málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndina, ið varð eimnmælt samtykt.

Marin Katrina Frýdal luttók ikki í viðgerðini.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. november 2018:** Vísandi til at hetta málið bert snýr seg um uppfylling uttan fyri Kirkjubø, verður tað lokað og sent býráðnum.
Tróndur Sigurðsson atkvøður blankt.

Marin Katrina Frýdal og Helena Dam á Neystabø luttóku ikki í viðgerðini av málinum.

**Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin 21. november 2018:** Málið varð umrøtt.

**Býráðsfundur 13. desember 2018:** Kunnað varð um málið. Marin Katrin Frýdal luttók ikki í viðgerðini vegna ógegni.

# 330/18 Tøkur peningur 2018

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 28.11.2018 | 337/18 | 18/04155-1 |
| 2 Býráðsfundur | 29.11.2018 | 285/18 | 18/04155-1 |
| 3 Býráðsfundur | 13.12.2018 | 330/18 | 18/04155-1 |

**Málslýsing**
Eykajáttan krevst í sambandi við hækking av samtyktu fíggjarætlanini, við hækking av bæði inntøkum og útreiðslum. Við hvørja eykajáttan skal verða víst á, hvussu hon verður fíggjað. Eyka játtanir skulu vera samtyktar við aðru viðgerð innan 31. desember í fíggjarárinum.

Inntøkurnar hava í árinum verið hægri enn mett og gevur hettar møguleika fyri at hækka fíggjarætlanina. Harumframt hevur kontan til aðrar útreiðslu eitt avlop í árinum. Orsaka av hesum er mett er at 25,7 mió. kr. eru tøkar til eykajáttan.

Tilfar kemur til fundin.

**Tilmæli:** Møguleiki er at fíggja neyðugar íløgur og at gera aðrar raðfestingar av tøkum peningi. Stjórnin mælir til at støða verður tikin til niðanfyristandandi uppskot til eykajáttan.

Játtan av tøkum peningi:

| Deild | Projekt | Navn | Upphædd | Viðmerkingar |
|---|---|---|---|---|
| 3175 | L00001 | Barnaansing | 10.000 | Játtanin er ætlað til at útvega fleiri dagstovnapláss til tess at nøkta plásstørvin. |
| 7317 | 73200 | Talgildu Føroyar | 2.500 | Býráði hevur samtykt heimild at gera samstarvsavtalu um Talgildu Føroyar. |
| 6275 | L62035 | Bygdirnar/vetrarfriðing | 2.500 | Játtanin er ætlað vetrarfriðing. Eisini er játtanin ætlað ymisk tiltøk, størri ábøtur, ferðslutrygdartiltøk og tílíkt. |
| 6875 | L00001 | Kloakkir | 2.500 | Játtanin skal nýtast til neyðugar umleggingar og dagføringar. |
| 8175 | L00001 | Vegir | 5.000 | Játtanin er til innkomuvegin |
| 8175 | L81018 | Miðstaðarøkið Marknagil/vegir | 2.500 | Játtanin skal nýtast til ferðsluviðurskiftini við Marknagil. |
| | | **Tilsamans av tøkum peningi** | **25.000** | |

Játtan av 20910 aðrar inntøkur:

| Deild | Projekt | Navn | Upphædd | |
|---|---|---|---|---|
| 5510 | | Býarsavn | 200 | Játtanin er ætlað at tryggja ætlaða virkisstig savnsins. |
| 7710 | | Ferðavinnan | 200 | Játtanin er serliga ætlað vinnuferðavinnuni. |
| 2720 | | Heilsuhúsið | 300 | Játtanin er ætlað til menning av heimatænastuni. |
| 20910 | | Aðrar útreiðslur | -700 | |

**Fíggjarnevndin 28. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 29. november 2018:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 13. desember 2018:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

# 331/18 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2018

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 21.02.2018 | 60/18 | 18/00018-1 |
| 2 Býráðsfundur | 01.03.2018 | 45/18 | 18/00018-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 14.03.2018 | 87/18 | 18/00018-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 18.04.2018 | 125/18 | 18/00018-1 |
| 5 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 99/18 | 18/00018-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 18.05.2018 | 158/18 | 18/00018-1 |
| 7 Býráðsfundur | 24.05.2018 | 134/18 | 18/00018-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 20.06.2018 | 212/18 | 18/00018-1 |
| 9 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 167/18 | 18/00018-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 22.08.2018 | 239/18 | 18/00018-1 |
| 11 Býráðsfundur | 30.08.2018 | 197/18 | 18/00018-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 19.09.2018 | 268/18 | 18/00018-1 |
| 13 Býráðsfundur | 27.09.2018 | 227/18 | 18/00018-1 |
| 14 Fíggjarnevndin | 10.10.2018 | 293/18 | 18/00018-1 |
| 15 Fíggjarnevndin | 24.10.2018 | 305/18 | 18/00018-1 |
| 16 Býráðsfundur | 25.10.2018 | 254/18 | 18/00018-1 |
| 17 Fíggjarnevndin | 28.11.2018 | 338/18 | 18/00018-1 |
| 18 Býráðsfundur | 29.11.2018 | 286/18 | 18/00018-1 |
| 19 Fíggjarnevndin | 13.12.2018 | 375/18 | 18/00018-1 |
| 20 Býráðsfundur | 13.12.2018 | 331/18 | 18/00018-1 |

**Upprunin til málið:**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. §10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávisar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingar avleiðingar | | | | |
| Unhvørvis avleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Ískoyti:** Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 21. februar 2018:** Framlagt og góðkent

**Býráðsfundur 01. mars 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 14. mars 2018:** Útsett.

**Ískoyti:**
Roknskapur fyri februar og mars verður lagdir fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2018:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri apríl verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2018:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 24. mai 2018**: Framlagt og góðkent.

**Ískoyti**:
Roknskapurin fyri mai verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2018:** Framlagt og góðkent**.**

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti**:
Roknskapurin fyri juni verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 22. august 2018:** Framlagt og góðkent**.**

**Býráðsfundur 30. august 2018:** Framlagt og góðkent**.**

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri juli verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 19. september 2018:** Framlag og góðkent.

**Býráðsfundur 27. september 2018:** Framlagt og góðkent**.**

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri august verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 10. oktober 2018:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti**:
Roknskapurin fyri september verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 24. oktober 2018:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapirnir fyri august og september verða lagdir fram til góðkenningar.

**Býráðsfundur 25. oktober 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri oktober verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 28. november 2018:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 29. november 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri november verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 13. desember 2018:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 13. desember 2018:** Framlagt og góðkent.

# 332/18 Ásetan av fundardøgum fyri býráðið 2019

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 13.12.2018 | 332/18 | 18/03968-1 |

**Málslýsing:**

Uppskot frá umsitingini til fundardagar 2019:

31. januar
28. februar
28. mars
24. apríl
23. mai
20. juni
26. september
31. oktober
21. november
12. desember

**Býráðsfundur 13. desember 2018:** Tikið til eftirtektar**.**

# 333/18 Dagføring av høvuðskloakkleiðing frá Sandvíkarhjalla

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 10.01.2017 | 4/17 | 16/03105-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.01.2017 | 9/17 | 16/03105-2 |
| 3 Býráðsfundur | 26.01.2017 | 55/17 | 16/03105-2 |
| 4 Tekniska nevnd | 27.11.2018 | 67/18 | 16/03105-2 |
| 5 Fíggjarnevndin | 05.12.2018 | 365/18 | 16/03105-2 |
| 6 Býráðsfundur | 13.12.2018 | 333/18 | 16/03105-2 |

**Málslýsing:**
Í sambandi við gerð av tilkoyringarvegi til Eysturoyartunnilin og umlegging av landsvegnum, við Rossagil, niðan fyri verandi landsveg norðan fyri Hvítanes við íbindingina til Sandvíkahjalla, er spurningur um dagføring av kloakkleiðingunum, sum liggja gjøgnum økið blivin aktuellur. Verandi leiðingar, sum ganga frá Sandvíkahjalla oman til Hvítanes, eru frá á leið mitt í áttatiárunum og eru hesar við at hava ov lítlan kapasitet, síðani er ídnaðarøkið eisini víðkað longur inn á Skarðshjalla, at taka øktu spillivatnsnøgdirnar og nøgdirnar av yvirflatuvatni frá økinum har. Harumframt eru verandi leiðingar í ringum standi. Talan er um at víðka og umleggja høvuðskloakkleiðingina frá øllum økinum undir Skarðshjalla og á Hjalla, sum er ein ø250 regnvatnsleiðing og ein ø200 skittvatnsleiðing sambært FDS-skipanini.

Ein partur av arbeiðinum at umvæla og dagføra verandi leiðing er framt í 2016, í sambandi við gerð av arbeiðsvegi til Eysturoyartunnilin strekki 1 (sí 16/03105-4 og 5)

Teinarnir talan er um, eru vístir á yvirlitsplani í 16/03105-4, har framhaldandi arbeiðið, sum her er talan um, eru strekki 2 og 3, meðan strekki 1 longu er framt.

Mett verður at hetta arbeiðið ikki eigur at bíða, tí nýggi tunnilsvegurin fer at gera tað sera trupult at koma aftur umaftur.

Við tað at Tunnilsfelagið er sinnað at vera við at deila kostnaðin, verður biðið um 1,25 mió. kr. umframt 6,5%, ella íalt 1,35 mió. kr. til strekki 2 og 3, umframt 500.000,- kr. til strekki 1 (sum er framt). Samanlagt 1,85 mió. kr. til endamálið. Við hesum eru leiðingarnar frá uml. Brennistøðini til útstykkingina á Gerðisbreyt á Hvítanesi dagførd.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at hetta verður fíggjað, í alt 1,85 mió. kr., av kt. 6875, íløgur til kloakkir í 2017 og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Tekniska nevnd 10. januar 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. januar 2017:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 26. januar 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Sambært játtanarreglunum, skulu lidnar verkætlanir eftirmetast í avvarðandi nevnd, og leggjast fyri býráðið til kunningar.

Verkætlanin verður samstundis lokað og møguligt avlop fellur aftur til íløgukarmin.

Nú verkætlanin L68031, Dagføring av høvuðskloakkleiðing frá Sandvíkarhjalla er liðug og avhendað, er staðfest eitt avlop áljóðandi kr. 2.625,-.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at avlopsupphæddin á kr. 2.625,- verður, sambært galdandi játtanarreglum um avlop av lidnum verkætlanum, flutt frá verkætlanini L68031 at verða tøkt til konto 6875, og at verkætlanin verður lokað og málið beint í fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

**Tekniska nevnd 27. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 05. desember 2018:** Kunnað varð um málið, ið varð beint í býráðið til kunningar.

Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 13. desember 2018:** Kunnað varð um málið.

# 334/18 Graslíki á komandi fótbóltsvøll í Hoyvík - "Hoyvíksvøllur"

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 06.04.2016 | 114/16 | 16/00407-3 |
| 2 Fíggjarnevndin | 11.05.2016 | 163/16 | 16/00407-3 |
| 3 Mentamálanevndin | 04.05.2016 | 131/16 | 16/00407-3 |
| 4 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 151/16 | 16/00407-3 |
| 5 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 168/16 | 16/00407-3 |
| 6 Mentamálanevndin | 31.08.2016 | 218/16 | 16/00407-3 |
| 7 Mentamálanevndin | 18.08.2016 | 198/16 | 16/00407-3 |
| 8 Fíggjarnevndin | 23.08.2016 | 254/16 | 16/00407-3 |
| 9 Býráðsfundur | 23.08.2016 | 197/16 | 16/00407-3 |
| 10 Fíggjarnevndin | 07.09.2016 | 285/16 | 16/00407-3 |
| 11 Býráðsfundur | 12.09.2016 | 204/16 | 16/00407-3 |
| 12 Mentamálanevndin | 19.09.2016 | 235/16 | 16/00407-3 |
| 13 Fíggjarnevndin | 19.10.2016 | 319/16 | 16/00407-3 |
| 14 Býráðsfundur | 27.10.2016 | 250/16 | 16/00407-3 |
| 15 Mentamálanevndin | 28.11.2018 | 347/18 | 16/00407-3 |
| 16 Fíggjarnevndin | 05.12.2018 | 363/18 | 16/00407-3 |
| 17 Býráðsfundur | 13.12.2018 | 334/18 | 16/00407-3 |

**Málslýsing:**
Talan er um framhald av máli nr. 14/03366 – Samlað útbjóðing av undirhondsboð av nýggjum fótbóltsvølli í Hoyvík og útstykking við Djúpagil í Hoyvík – oman gil, ið aftur er framhald av málunum nr. 14/000714 – Staðseting av fótbóltsvølli í Hoyvík – Dalurin langi bóltvøllur (2010-0498) og máli nr. 14/01462 - Nýggjur fótbóltsvøllur í Hoyvík.

Arbeiðið við at gera fótbóltsvøllin verður ætlandi liðugt innan 2 mánaðir. Í verandi verkætlan er ikki íroknað graslíki, umframt undirlag (t.e. skerv, asfalt, sand, innfill, stoytdoyvingarlag), ið er neyðugt fyri at fáa ein vøll eftir nútíðans krøvum.

Í verandi verkætlan er ymiskt, ið ikki er íroknað verkætlanina, umframt graslíkisvøllin, eitt nú kloakkleiðingar við tilhoyrandi brunnum, el-arbeiðið, gittarmastur til vallarljós, áskoðarapláss, lendisjavning, betongtrappa, gøta og hegn, innkoyring og parkering frá Karlamagnusarbreyt, útskriftingarbenkur o.a. Tá verkætlanin er liðug verður nærri greitt hvat er eydnast at fáa við av hesum innanfyri verandi fíggjarkarm.

Tíðarætlan
Uttandura vallir og umsitingin hava saman við LBF P/F hava mett um tíðarætlan fyri at fáa lagt graslíki á í summar. Frá tí at samtykt fyriliggur vil samlaða tilgongd frá útboð til lisitatión verða umleið 4 vikur og síðani nevndarviðgerð og í býráðið umleið 3-4 vikur. Um málið verður samtykt í apríl kann vøllurin verða liðugur at taka í brúk í heyst. Sí hjálagt útbjóðingartilfar.

Mett verður at kostnaðurin fyri arbeiðið er umleið 3,6 mio.kr. alt eftir marknaðarstøðuni og kapping innan graslíkisveiting og innan tilfar og gerð av arbeiðinum. Hartil er sannlíkt at onnur liðugtger av økinum kring vøllin kann koma at kosta 2-3 mio.kr (við fyrivarni fyri nærri metingum tá verandi verkætlan er liðug í næstum – nýtt tilmæli kemur um tað tá).

**Tilmæli**

Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og leiðarin av stjórnarskrivstovuni mæla nevndini til at samtykkja at heimilað umsitingini at fara undir útbjóðing av arbeiðinum við at leggja á graslíki vm. á Hoyvíksvøll og venda aftur til nevndina við einum úrsliti til støðutakan. Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 06. april 2016:** Ein meiriluti Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen og Sigrun Mohr tekur undir við tilmælinum.

Minnilutin Jógvan Arge tekur støðu, tá greitt yvirlit er útvegað yvir kostnaðin av tí, sum higartil er gjørt við vøllin, og yvir mettan kostnað at gera vøllin lidnan.

Helena Dam á Neystabø var ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Ískoyti:**
Samlaði fíggjarkarmurin, ið játtaður er til arbeiðið at gera fótbóltsvøllin, er kr. 17,625 mió. Disponeraðar kostnaðarupphæddir eru kr. 17,227 mió. Avlopið er kr. 397.534.

Írestandi løgukarmurin til vøllin í Hoyvík fyri 2016 er kr. 2.000.000. Harumframt er samtykt við 1. viðgerð í býráðnum kr. 1.000.000 aftrat. Verður hetta samtykt við 2. viðgerð, er tøka játtanin sostatt kr. 3.397.534.

Kostnaðarmeting fyri verkætlanina við at leggja graslíkið er kr. 4.070.820 v/mvg.
Fíggjartørvur er sostatt kr. 673.286.

Tað eru eisini onnur arbeiði kring vøllin, sum ikki eru tikin við omanfyri – talan er um el-arbeiði, trappur, innkoyring og áskoðaraskýli, samlað kostnaðarmeting fyri hesi arbeiði er kr. 2.359.539 v/mvg.

Mett verður, at konta 5710 uttandura vallir kann fíggja írestandi partin til graslíkið og til okkurt av mest neyðugu arbeiðunum, sum eftir eru at gera kring vøllin, í alt kr.1.600.000, ið verður at játta til løgukontuna 5775 L57014 Fótbóltsvøllur í Hoyvík.

**Tilmæli:**

Trivnaðarstjórin, tekniski stjóri og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 3.000.000 av íløgukarminum 5775 ítróttaranlegg og kr. 1.600.000 av kontu 5710 uttandura vallir til løgukontu L57014 Fótbóltsvøllur í Hoyvík.

**Mentamálanevndin 4. mai 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og heita á umsitingina um at leggja við eina greiða uppseting av kostnaðinum av vøllinum í Hoyvík til viðgerðina í fíggjarnevndini og býráðnum.

Halla Samuelsen var ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Fíggjarnevndin 11. maj 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini við teirri broyting, at kr. 2.000.000,00 verða játtaðar av íløgukarminum 5775 Ítróttaranlegg og kr. 1.600.000,00 av konto 5710 uttandura vallir til løgukonto L57014 Fótbóltsvøllur í Hoyvík og beina málið í býráðið sum eykajáttan, ið krevst tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 19. mai 2016:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti

Fyri atkvøddu:
Heðin Mortensen, Rúni Djurhuus, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrun Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen, Sjúrður Olsen, Jógvan Arge og Jákup Dam.

Greiddi ikki atkvøðu: Marin Katrina Frýdal.

**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Tey, ið atkvøddu fyri, vóru: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigðursson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen og Jákup Dam.

Marin Katrina Frýdal greiddi ikki atkvøðu.

**Ískoyti**
P/F J&K Petersen er nú um at verða liðugt við sína arbeiðstøku, ið fevnir um gerð av vallarøkinum og sjálvum fótbóltsvøllinum til og við grovplanering. Arbeiðstøkan fevndi ikki um graslíki, umframt undirlag (t.e. fínplanering, drenasfalt, stoytdoyvingarlag vm.).

<u>Drenasfalt:</u>
Í upprunaliga tilboðnum hjá P/F J&K Petersen var fínplanering og áleggjan av drenasfalti. Hetta valdi Tórshavnar kommuna tá at taka úr tilboðnum hjá P/F J&K Petersen at fremja tað fyri seg. Undirveitarin hjá P/F J&K Petersen var Sp/f HJ Asfalt. Samskifti hevur verið við tað felagið, hvørt tað stóð við sínar upprunaligu einleikaprísir og um felagið kundi fremja arbeiðið innan umleið hálvan september. Felagið hevur váttað, at kunna fremja arbeiðið fyri einleikaprísirnar, tó við tí fyrivarni, at nøgdirnar av tilfarinum til fínplanering vera at avrokna t.d. við vektarseðlum ella øðrum hátti, partarnir semjast um. Hetta tí at ávís óvissa kann verða viðv. javnleika og tí kann krevja nakað meiri av tilfari. Arbeiðið verður framt sbrt. upprunaliga útbjóðingartilfarinum hjá Sp/f HMP Consult.

Kostnaðirnir fyri fínplanering sbrt. tilboð er 312.200.kr. og drenasfalt sbrt. tilboð 821.500.kr. Hartil er metingin um eykakostnaðir fyri eykafínplanering vm. umleið 230.000.kr. umframt kommunalt MVG og ókent.

Graslíki:
15. august 2016 var innboðin lisitatión uppá at leggja graslíkið. 5 feløg vóru boðin við og 3 lótu inn tilboð. Talan er um tilboð frá Polytan Danmark, Laiderz Aps. og Ide Møblar (P/F Føroya Møblasøla). P/F LBF hevur kannað innkomnu tilboðini um graslíkið, sí hjálagt fylgiskjal 1.

Mett verður, at lægsta tilboð lýkur ikki krøvini í mun til útbjóðingartilfarið, meðan hini tilboðini eru ov dýr í mun til tøka fíggjarkarmin.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og deildarleiðarin á Stjórnarskrivstovuni mæla til at gera sáttmála við Sp/f HJ Asfalt um at fínplanera og áleggja drensafalt á Hoyvíksvøll fyri 1.449.000. kr. og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina. Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og deildarleiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla harumframt til at bjóða graslíkið út av nýggjum.

**Mentamálanevndin 18. august 2016:** Ein samd nevnd tekur undir við fyrra tilmælinum um fínplanering, drenasfalt v.m. fyri kr. 1.449.000 og beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein meiriluti, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson, Sigrun Mohr og Annfinn Brekkstein, samtykkir harumframt at taka av lægsta tilboðnum um graslíki við grønum gummigranulati kr. 2.298.000 u/mvg, og beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Jógvan Arge, tekur undir við tilmælinum frá fyrisitingini um at bjóða graslíkið út av nýggjum.

**Fíggjarnevndin 23. august 2016:** Samtykt at beina málið aftur í mentamálanevndina við atliti til at viðgera útbjóðingina av nýggjum, visandi til nýggjar upplýsingar í málinum.

**Býráðsfundur 23. august 2016:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**:
**Asfaltundirlag ella fínplanering eina?**
a). Tórshavnar kommuna hevur asfalt á øllum fótbóltsvallunum undantikið Eysturvølli. Nakrir fótbóltsvallir kring landið (t.d. tann í Norðagøtu og á Eiði) hava undanframleidda stoytdoyvingarmottu beinleiðis omaná fínplanering.

Vallarreglugerðin 2016 hjá FSF hevur ikki ásetingar hesum viðvíkjandi, men vísa til javnleikakrøv og FIFA 2 Star reglur. Enn eru FIFA Quality Pro krøv ikki komin.

Fyrimunurin við ikki at leggja asfaltundirlag er, at kostnaðurin gerst nakað bíligari í fyrstu atløgu. Posturin fyri drensafalt í upprunaliga tilboðnum er ásettur til kr. 821.500 (tó vilja einleikaprísirnir fyri fínplanering helst gerast nakað hægri um asfaltering ikki er við). Vansin er tá, at tá graslíkið skal skiftast og um tað verða brúktar undanframleiddar stoyttdoyvingarmottur ístaðin fyri staðstoypt stoytdoyvingarlag, vil tað kunna viðføra ávís eykaabeiði við at rætta vøllin uppaftur. Bæði Niðari- og Ovari vøllur í Gundadali og vøllurin í Vika hava ikki havt stórvegis tørv á at verða upprættaðir í sambandi við skift av graslíki. Asfaltløgini eru nærum óskalaði frá uppruna av.

Mett verður at undarlagið á Hoyvíksvølli er so mikið gott at vónandi kemur hann ikki at seta seg nakað serligt, men torført er at geva nakra vissu fyri tí.

**Nýtt útboð?**
Í verandi støðu ber fíggjarkarmurin ikki at taka av sáttmála um fínplanering, asfaltering og einum høvuðstilboði um graslíkið (tvs. við staðstoyptum stoytdoyvingarlag og TPE-gummigranulati).

Hinvegin kann eisini umhugsast at velja aðra loysnir m.a. sum lýst í alternativunum í licitatiónini, sum innibera undanframleitt stoytdoyvingarlag/mottu og gummigranulat av slagnum gráum EPDM. Í hjálagda lista sæst uppseting við ymisku samansetingunum.

Hinvegin, um ynskið er at fáa bjóðað út av nýggjum, er hóskandi at gjøgnumganga útbjóðingartilfarið av nýggjum við atliti til, um ynskið er at fáa fleiri møguleikar frá teimum bjóðandi og møguliga enn fleiri bjóðandi, men har serliga staðstoypt stoytdoyvingarlag er alternativ og ikki treyt til høvuðstilboð, tó treytað av, at loysnirnar eru antin FIFA 2 Star ella Quality Pro góðkendar.

Løgfrøðilig metingin hjá løgdeildini er, at til ber at bjóða útaftur beinanvegin í innbodnari licitatión.

Av tí at heystið nærkast kann veðrið ávirka arbeiðið.

**Tilmæli:**

Asfaltundirlag:
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og deildarleiðarin á Stjórnarskrivstovuni mæla til at gera sáttmála við Sp/f HJ Asfalt um at fínplanera og áleggja drenasfalt á Hoyvíksvøll fyri 1.449.000. kr.

Graslíki:
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og deildarleiðarin á Stjórnarskrivstovuni mæla til at bjóða graslíkið út av nýggjum, har treytin fyri høvuðstilboði ikki longur er staðstoypt stoytdoyvingarlag og TPE-gummigranulat.

**Mentamálanevndin 31. august 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælunum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 07. september 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið viðv. asfaltundirlagnum í býráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 12. september 2016:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu:
Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrun Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen, Sjúrður Olsen, Jógvan Arge og Jákup Dam.

Greiddi ikki atkvøðu: Marin Katrina Frýdal.

**Ískoyti:**
10. September 2016 var licitatitón uppá veiting og álegging av graslíki vm. til Hoyvíksvøll.

6 feløg vóru boðin at bjóða. 4 lótu inn tilboð. Hesi vóru Laiderz Aps, Polytan Danmark, UniSport v/Jónfinn Olsen og L/F MBM.

(øll tøl í málslýsingini eru uttan kommunalt MVG um ikki annað er tilskilað!)

Í hjálagda fylgiskjalið síggjast tilboðini nágreinaði. Sí eisini hjálagda meting frá P/F LBF av licitatiónini.

Høvuðstilboðini vóru samanlagt hesi:

| | |
|---|---|
| Laiders | kr. 2.350.589 |
| Polytan | kr. 2.585.564 |
| MBM | kr. 3.031.606* |
| UniSport | kr. 3.171.726 |

* Valdu ber at geva tilboð uppá TPE-V gummigranulat.

Bíligasta høvuðstilboðið er sostatt frá Laiderz Aps og er tá við EPDM gummiigranulati og undanframleiddari máttu.

3 feløg hava latið inn alternativ 1 við industri EPDM, gráum gummigranulati og eru prísirnir tá:

| | |
|---|---|
| Laiderz | kr. 2.153.453 |
| Polytan | kr. 2.224.148 |
| UniSport | kr. 2.908.878 |

4 feløg hava latið inn alternativ 2 við TPE-V grønum gummigranulati og eru prísirnir tá:

| | |
|---|---|
| Laiderz | kr. 2.613.431 |
| Polytan | kr. 2.700.560 |
| MBM | kr. 3.031.606 |
| UniSport | kr. 3.253.866 |

3 feløg hava latið inn alternativ 3 við staðstoyptum undirlagi og eru meirprísirnir tá:

| | |
|---|---|
| Laiderz | kr. 229.992 |
| Polytan | kr. 361.416 |
| UniSport | kr. 287.490 |

Áleggingartíðspunkt
Vegna at so mikið er útligið á árið við ofta ringum veðri, verður mælt til at álegging í fyrsta lagi verður gjørd í apríl 2017.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, Mentamálaleiðarin og deildarleiðarin á Stjórnarskrivstovuni mæla mentamálanevndin til at taka av tilboðum frá Laiderz uppá antin:
a). Høvuðstilboð á kr. 2.350.589 ella
b). Alternativ 1 samansett við alternativ 3 á tils. kr. 2.383.445.

**Mentamálanevndin 19. september 2016:** Ein meiriluti, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen, Jógvan Arge og Bjørghild Djurhuus, mælir til at taka av punkt b) Alternativ 1 samansett við alternativ 3 á tils. kr. 2.383.445, og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. oktober 2016:** Samtykt við 10 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu:
Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen, Sjúrður Olsen, Jógvan Arge og Jákup Dam.

Greiddi ikki atkvøðu:
Marin Katrina Frýdal.

**Ískoyti**
Sambært játtanarreglunum skulu lidnar verkætlanir eftirmetast í avvarðandi nevnd og leggjast fyri fíggjarnevndina og býráðið til kunningar. Verkætlanin verður samstundis lokað, og møguligt avlop fellur aftur til íløgukarmin ella skal fíggjast av honum.

Nú verkætlanin, "´Fótbóltsvøllur í Hoyvík" L57014 skal lokast, er sambært leiðslukunningini staðfest eitt yvirskot á 575.875 kr. Umsitingin hevur eftirmett verkætlanina. Mett verður at arbeiðið sum heild gekk á eini leið. Avbjóðingar vóru viðv. at fáa veitarar og veitingar til tíðina, umframt onkrir smærri manglar vóru, ið nú eru rættaðir.

Hinvegin tykist arbeiðið nú vera væl úr hondum greitt og tekur seg væl út í økinum og er til stóra gleði fyri stovnarnar í økinum, fótbóltsfelagið Giza Hoyvík og nærumhvørvið í Hoyvík. Innan fótbóltin er nú ein nýggj tíð byrjað í Hoyvík!

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at loka verkætlan L57014 og at minni nýtslan verður flutt á løgukarmin 5775. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 28. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 05. desember 2018:** Kunnað varð um málið, ið varð beint í býráðið til kunningar við teirri viðmerking, at talan er um eitt staðfest yvirskot á kr. 555.875.

Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 13. desember 2018:** Kunnað varð um málið**.**

# 335/18 Umsókn um stuðul til umvæling av Tórshavnar ítróttar- og samkomuhøll - skeyti 1386 - ymiskt tilfar í eini kassettu (1999-0345)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 20.10.2014 | 203/14 | 14/04763-136 |
| 2 Mentamálanevndin | 06.10.2015 | 202/15 | 14/04763-136 |
| 3 Mentamálanevndin | 09.11.2015 | 225/15 | 14/04763-136 |
| 4 Fíggjarnevndin | 11.11.2015 | 275/15 | 14/04763-136 |
| 5 Mentamálanevndin | 25.11.2015 | 234/15 | 14/04763-136 |
| 6 Fíggjarnevndin | 02.12.2015 | 299/15 | 14/04763-136 |
| 7 Býráðsfundur | 10.12.2015 | 237/15 | 14/04763-136 |
| 8 Mentamálanevndin | 07.12.2015 | 254/15 | 14/04763-136 |
| 9 Fíggjarnevndin | 09.12.2015 | 332/15 | 14/04763-136 |
| 10 Mentamálanevndin | 13.01.2016 | 3/16 | 14/04763-136 |
| 11 Fíggjarnevndin | 20.01.2016 | 15/16 | 14/04763-136 |
| 12 Býráðsfundur | 28.01.2016 | 10/16 | 14/04763-136 |
| 13 Mentamálanevndin | 02.03.2016 | 72/16 | 14/04763-136 |
| 14 Mentamálanevndin | 06.04.2016 | 109/16 | 14/04763-136 |
| 15 Fíggjarnevndin | 13.04.2016 | 131/16 | 14/04763-136 |
| 16 Býráðsfundur | 19.04.2016 | 107/16 | 14/04763-136 |
| 17 Fíggjarnevndin | 08.06.2016 | 208/16 | 14/04763-136 |
| 18 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 164/16 | 14/04763-136 |
| 19 Býráðsfundur | 26.07.2016 | 194/16 | 14/04763-136 |
| 20 Mentamálanevndin | 20.07.2016 | 194/16 | 14/04763-136 |
| 21 Fíggjarnevndin | 26.07.2016 | 248/16 | 14/04763-136 |
| 22 Mentamálanevndin | 26.07.2017 | 189/17 | 14/04763-136 |
| 23 Fíggjarnevndin | 26.07.2017 | 167/17 | 14/04763-136 |
| 24 Býráðsfundur | 26.07.2017 | 189/17 | 14/04763-136 |
| 25 Mentamálanevndin | 28.11.2018 | 346/18 | 14/04763-136 |
| 26 Fíggjarnevndin | 05.12.2018 | 364/18 | 14/04763-136 |
| 27 Býráðsfundur | 13.12.2018 | 335/18 | 14/04763-136 |

## Málslýsing:

Á fundi í býráðnum 23. september 2004 varð m.a. samtykt at gera eina byggitekniska meting av høllini.

Byggideildin hevur havt samstarv við BBP Arkitektar A/S um at útbyggja og umvæla høllina. Byggideildin hevur á fundi í býráðnum 30. mars 2006 kunnað um ætlaðu umbyggingina av Ítróttarhøllini á Hálsi.

Í uppskotinum er ein kostnaðarætlan og ein tíðarætlan.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at fara undir at gera hesa verkætlanina so skjótt sum til ber. Tað kann ikki metast ráðiligt at halda fram við at lappa uppá verandi høll. Ei heldur má tað metast ráðiligt at fara undir at umvæla høllina bert fyri at fáa hana í brúkiligan stand tó uttan at tillaga hana til øktan tørv og krøv til nýtslu.

Høllin á Hálsi hevur altíð staðið sum ímyndin av føroyskum innanduraítrótti, harumframt at

vera stoltleikin fyri samkomu- og ítróttarvirksemi í Tórshavn. Hetta eigur Tórshavnar kommuna, sum landsins høvuðsstaður at leggja seg eftir at kunna siga um Høllina á Hálsi framyvir.

**Tilmæli:**
Mentamálaleiðarin mælir mentamálanevndini til at taka undir við tilráðingini frá býararkitektinum.

**Mentamálanevndin 24. mai 2006:** Nevndin var á staðnum og var víst runt í høllini.

**Uppískoyti/tilmæli:**
Høllin, ið er yvirtikin av Tórshavnar kommunu fyrst í 2005, er niðurslitin, og tørvar átrokandi ábøtur. Fyri at fáa sum mest burtur úr eini so umfatandi umvæling, hava vit mett rættast eisini at hava við í hesum arbeiði eina dagføring av høllini, ið alt annað enn líkur krøvini, ið eru til eina tílíka høll í dag. Tí fyriliggur eitt skitsuuppskot, sum tekur støði í hesum. Atlit eru eisini tikin til, at hon framhaldandi, eftir at arbeiðið er gjørt, fer at verða "høllin" í Føroyum. Býararkitekturin hevur sagt um skitsuuppskotið, at hetta er eitt av teimum betru.

Í skitsuuppskotinum er samantvinna umbygging, uppíbygging og um-væling. Sambært kostnaðarmetingini hjá BBP-arkitektum kostar arbeiðið kr. 32.850.000 (danskir prísir, primo 2006)

Afturat hesum kemur projekterings- og ráðgevaraútreiðslur, kr. 3.942.000 (12% av 32 mill kr.).

Av tí at uppskotið ikki bert inniheldur viðlíkahald, men eisini uppíbygging v.m., halda vit tað er rætt eisini at býta samlaða metingina upp í tveir partar. Annar er umvælingarparturin og hin er uppí- og umbyggingar parturin.

Út frá kostnaðarmetingini kemur fram, at kostnaðurin fyri alt arbeiðið er í "føroyskum kr" 37.777.500 mill. kr. Deila vit hetta upp í áður umtalaðu partar, fáa vit hesa uppdeiling:

| | | |
|---|---|---|
| Umvæling | kr. | 21.903.095 |
| Uppí- og umbygging | - | 15.874.405 |
| Samlað | kr. | 37.777.500 |

Í fjør játtaði býráðið 2,5 mill. kr. á konto 82 til Høllina á Hálsi at gera umvælingar fyri í 2006.

Býararkitekturin mælir til at tikið verður av øðrum av niðanfyri standandi tilmælum. Bæði ganga uppá at fáa sett projekteringsarbeiði í gongd nú.

Í tí fyrra tilmælinum verður mælt til, at arbeiðið verður gjørt út í eitt. Hetta hevur við sær, at eingin kann brúka høllina í byggitíðini, sum ætlandi verður liðug í september 2008.

Tað seinra mælir til, at arbeiðini verða gjørt í 4 byggistigum, soleiðis at yvir eitt rímiligt tíðarskeið stendur høllin liðug, sum skitsuuppskotið leggur upp til.

**1. tilmæli**
at projekteringin av skitsuuppskotinum verður gjørt av BBP-arkitektum, sum hava tillagað eina nýggja tíðarætlan. Teir kunnu byrja uppá projekteringina miðjan august í ár og hava hana lidna miðjan mai 2007. Arbeiðið kann byrja fyrst i juli 2007 og halda fram, til tað er liðugt, áðrenn hondbóltskappingin byrjar aftur í september 2008.

<u>at</u> játtanin til konto 82 verður hækkað við teim knapt 22 mill. kr., og tær írestandi knapt 16 mill. kr. sum íløga ella tiknar sum lán. Projekteringskostnaðurin verður goldin av teim 2,5 mill. kr., sum eru á konto 82, og tær írestandi 1,4 mill. kr. verða deildar soleiðis, at 1 mill. fer til konto 82 og 0,4 mill. kr. sum íløga ella lán. Sett upp í skema sær tað soleiðis út yvir 2 fíggjarár:

| | |
|---|---|
| Hækka játtanina til konto 82 | kr. 21.903.095 |
| Partur av projekterings og ráðgeving | - 1.000.000 |
| Samlað hækking til konto 82 | kr. 22.903.095 |

| | |
|---|---|
| Játtan til íløgu ella at upptaka lán | kr 15.874.405 |
| Partur av projektering og ráðgeving | - 442.000 |
| Samlað íløga ella lántøka | kr. 16.316.405 |

Hækkan av játtan til konto 82 og játtan til íløgu ella lántøka verða gjørd yvir eitt tvey ára skeið, so hvørt sum tørvur er á peningi.

| | |
|---|---|
| Fyri fíggjarárið 2007 verður játtanin til konto 82 hækka við | kr. 12.000.000 |
| Og íløga ella lántøka verða gjørd fyri fíggjarárið 2007 við | kr. 8.000.000 |
| Fyri fíggjarárið 2008 verður játtanin til konto 82 hækka við | kr. 11.000.000 |
| Og íløgan ella lántøka verður gjørd fyri fíggjarárið 2008 við | kr. 9.000.000 |




Omanfyri sæst tíðaraksin fyri projektering og byggitíðina, um arbeiðið verður gjørt út í eitt.

**2. tilmæli**
Í øðrum lagið verður mælt til at projektið verður gjørt liðugt, soleiðis at partar av arbeiðnum kunnu longu byrja í 2007. Arbeiðið kann tá leggjast soleiðis tilrættis, at tað verður boðið út í størri og minni bitum alt eftir tí, sum er best byggitekniskt, og sum pengar verða settir av til.

<u>at</u> peningur verður settur av soleiðis, at projekteringin kann gerast liðug av BBP-arkitektum miðskeiðis í apríl 2007. Hetta fyri at umvælingararbeiðið kann gerast við støði í tí lidna projektinum, soleiðis at arbeiðið verður gjørt í størri og smærri bitum.

<u>at</u> peningur verður settur av til at gera 1. byggistig í fyrstu atløgu, sum umfatar rúmini á eystursíðuna fyrst. Hetta inniheldur at skifta takið, hækka gólvið á hædd við vallargólvið, umvæla og broyta skiftirúmini, wc rúmini og harvið eisini gera kloakkina á nýggjum og

asfaltera gongubreytuna. Framsíðan skal gerast eftir tí nýggja uppskotinum, tvs. skifta klædningin út og skifta og broyta vindeyguni og úthurðarnar. Seta nýggja takrennu og rennustokk upp. Hesi arbeiði kunnu gerast við at hækka játtanina til konto 82 við 9 mill. kr. til fíggjarárið 2007.

Ein møgulig langtíðar ætlan kundi verið hendan.

**1. byggistig**
Umvæling og broyting av hølum, ið liggja úti við eystur síðuna. Broyting av hesi framsíðu umfatar eisini vindeygu, úthurðar, takrennu og rennustokkar. Takið skal eisini skiftast.

**2. byggistig**
Útbyggja endan norðureftir, við øllum.

**3. byggistig**
Útbyggja endan suður eftir við øllum.

**4. byggistig**
Taka niður áskoðarabeinkirnar og flyta vøllin inn í mittuna. Gera nýggj áskoðarapláss og umskapa rúmini, sum liggja út til vestur síðuna. Broyting av hesi framsíðu umfatar eisini vindeygu, úthurðar, takrennu og rennustokkar.

**Mentamálanevndin 13. juni 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til, um fíggjarnevndina, at 2,5 mió. kr., sum eru játtaðar til umvælingar av høllini 2006, verða nýttar til projektering av umvæling og umbygging, sambært uppskoti frá BBP Arkitektar A/S, februar 2006.

Eisini samtykt at viðgera málið aftur í mentamálanevndini eftir summarfrítíðina.

**Fíggjarnevndin 21. juni 2006:** Trivnaðarstjórin og leiðarin á mentamáladeildini vóru á fundinum og greiddu frá.

Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 13. september 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 21. september 2006:** Einmælt samtykt.

**Nýtt:**
Kommunan hevur arbeitt við einum projektið, ið fór at kosta 40 mill kr. umframt projekteringsútreiðslur.

Projekteringin er komin væl áleiðis og sambært sáttmála millum arkitektavirkið og Tórshavnar kommunu (TK) skal projektforslagið góðkennast av TK. Hetta liggur nú klárt til góðkenningar

Samlaði kostnaður fyri projektið er kr 47.680.000 við prístalsregulering og projektering.

Arbeiði gerast í 4 byggistigum.
1. byggistig: 1. februar 2008 – 31.oktober 2008
2. byggistig: 1. januar 2009 – 1. februar 2010
3. byggistig: 1. apríl – 27. august 2010
4. byggistig: 1. september – 30. juni 2011

Arbeiði verður fíggja av konto 90 soleiðis:

| | |
|---|---|
| Áður játtað, | 2.500.000 mill kr. |
| At játtað fyri 2007 | 6.000.000 mill kr |
| At játtað fyri 2008 | 6.415.000 mill kr |
| At játtað fyri 2009 | 14.326.680 mill kr |
| At játtað fyri 2010 | 12.829.240 mill kr |
| At játtað fyri 2011 | 5.599.080 mill kr |

Býararkitekturin mælir til at projektuppskotið, tíðarætlan og fíggingar-háttur verða góðtikin.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við tilmælinum frá býararkitektinum. Somuleiðis verður mælt til at seta bygginevnd fyri verkætlanina, sambært "Politisku/fyrisitingarligu mannagondir fyri verkætlanir"

**Mentamálanevndin 11. juni 2007:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá trivnaðarstjóranum og mentamálaleiðaranum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 21. juni 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
5 byggifyritøkur vóru innboðnar til at prekvalifisera seg til at bjóða uppá út- og umbyggingina av Høllini á Hálsi. Freistin at lata inn upplýsingar um fyritøkuna varð 6. mars kl 14.00. Av teim 5 boðnu, lótu 4 fyritøkur inn tilfar, og vóru tær allar góðkendar.

Lisitatiónin varð 28. apríl 2008 kl 10:00
Hesi tilboð komu inn

| Fyritøka | 1 byggistig | 3 byggistig |
|---|---|---|
| J & K Petersen Contractors | Einki boð | Einki boð |
| Búsetur Sp/F | kr 58.798.462,80 | kr 64.143.777,60 |
| E.Pihl & Søn Føroyar P/F | kr 64.341.329,28 | kr 69.964.259,00 |
| MT Højgaard Føroyar P/F | kr 70.810.793,03 | kr 76.310.793,03 |

Ráðgevarin BBP-arkitekter, mettu at øll innkomnu tilboð vóru kontosiónsmessig. Víðari mæltu ráðgevin til at tikið varð av tilboðnum frá Búsetur, og at arbeiðið skuldi gerast í einum byggistigi.

Bygginevndin gjørdi hetta tilmæli.

Ein meiriluti í bygginevndin, mælir frá at taka av lægsta tilboðnum áljóðandi 58.798.462,00 kr, fyri at gera arbeiði í einum. Somuleiðis mælir ein meiriluti frá, at taka av lægsta tilboðnum áljóðandi 64.143.777,00 kr, fyri at gera arbeiðið í stigum.

Grundgevingin fyri frámælinum er, at játtaðar eru bert 48 mill. kr. til at gera arbeiðið í stigum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við bygginevndini vísandi til at rúm ikki er fyri verkætlanini á konto 90.

**Mentamálanevndin 3. desember 2008:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Fíggjarnevndin 10. desember 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 29. desember 2008:** Atkvøtt var um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen, Elin Lindenskov, Inga Dahl, Vagnur Johannesen, Beate L. Samuelsen og Jan Christiansen.

Greiddu ikki atkvøðu: Sjúrður Olsen og Høgni Mikkelsen

**Uppískoyti:**
Høllin, sum Tórshavnar kommuna yvirtók í 2005, er niðurslitin og tørvar átrokandi ábøtur. Arbeitt hevur verið við at fara undir útbygging av høllini, men býráðið samtykti 29. desember 2008, at arbeiðið verður ikki gjørt í hesum umfari.

Tørvurin á umvælingum í høllini er stórur, og tí verður neyðugt at gera eina tørvsmeting av bráðfeingis umvælingum og kostnaðarmeting.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at framflyta kr.100.000 av játtan til umbygging av høllini á Hálsi til at gera tørvsmeting av bráðfeingis umvælingum og kostnaðarmeting.

**Mentamálanevndin 27. mai 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, til at játta kr. 100.000 at gera tørvsmeting av bráðfeingis umvælingum við kostnaðarmeting.

**Fíggjarnevndin 28. mai 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og játta kr. 100.000 av játtaðum íløgum á trivnaðarøkinum ætlaðar Høllini á Hálsi.

**Býráðið 28. mai 2009:** Einmælt samtykt.

**Nýtt**:
Tørvsmetingin av bráfeingis umvælingum og kostnaðarmeting er nú gjørd. Eystursíðan treingjur mest til ábøtur. Talan er her um at umvæla/skifta út umklæðingar- og brúsurúm, klædning og toilettir. Kostnaðarmetingin er sett upp í trimum punktum, sí skjálið frá HMP-Consult, dagfest 3. november 2009.

Her verður tikið saman um metingina:

| | | |
|---|---|---|
| Brúsu- og umklæðingarrúm | kr. | 3.484.100 |
| Toilettir | kr. | 861.300 |
| Arbeiðstøka samlað | kr. | 4.895.400 |
| Óvantað 15% | kr. | 734.310 |

| | | |
|---|---|---|
| Projektering og eftirlit | kr. | 675.565 |
| | | |
| Samlað uttan mvg | kr. | 6.305.275 |
| Mvg 6,25% | kr. | 390.927 |
| | | |
| Samlað við MVG | kr. | 6.696.202 |

Eftir at hesar ábøtur eru gjørdar, treingir gólvið til at skiftast. Tað er í sera ringum standi, og krevur nógv dagligt viðlíkahald. Men tá hugsað verður um at takið lekur, eigur takið at verða skift áðrenn gólvið, soleiðis at gólvið ikki fær vatnskaða tá takið verður skift.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta 4,4 mió. kr. av avlopinum av áður játtaðari upphædd til Høllina á Hálsi (j. nr. 1999-0345). Tøkar eru íalt 8,9 mió. kr.

**Mentamálanevndin 11. november 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Ískoyti/tilmæli:**
Fyri at gera bráðfangis umvælingar lidnar – mettar til 6,7 mió. kr. – mæla kommunustjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin til at játta 3,0 mió. kr. afturat av undirkonto 5776 í fíggjarætlanini fyri 2010 til arbeiðið.

**Mentamálanevndin 17. november 2009:** Nevndin tók undir við tilmælinum um netið.

**Fíggjarnevndin 18. november 2009:** Nevndin samtykti at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælunum.

**Býráðið fyri læstum hurðum 26. november 2009:** Málið varð umrøtt.

**Býráðið 26. november 2009:** Einmælt samtykt at taka undir við fíggjarnevndini 18. november 2009.

**Ískoyti:**
Jógvan Arge ynskir málið á skrá.

**Fíggjarnevndin 14. apríl 2010:** Tekniski stjórin og býararkitekturin greiddu frá málinum. Sáttmáli verður í næstum gjørdur við HMP Consult um ráðgeving og projektering. Projekteringin tekur upp til tveir mánaðir, og mælt verður til, at arbeiðið verður boðið út í innbodnari lisitatión í summar.

**Mentamálanevndin 28. apríl 2010:** Kunnað varð um málið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at bjóða arbeiðið út í innbodnari høvuðsentreprisu.

**Mentamálanevndin 17. mai 2010:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. mai 2010:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 20. mai 2010:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Mentamálanevndin 1. september 2010:** Kunnað varð um málið.

**Nýtt:**
Lisitatiónin var 22. des. 2010 og tilboðini vóru hesi:

| | |
|---|---|
| ÁTS S/pf. | 6.117.725,56 kr. |
| Karstin A. Joensen S/pf. | 6.183.979,25 kr. |
| Valbjørn Dalsgarð S/pf. | 6.302.015,96 kr. |
| Bjarni Poulsen S/pf. | 6.343.814,48 kr. |
| Búsetur S/pf. | 6.545.180,00 kr. |
| Húsavarðatænastan S/pf. | 6.678.556,15 kr. |
| | |
| Metingin hjá HMP-Consult | 6.725.000,00 kr. |

HMP-Consult hava kannað tilboðini, og mæla til at taka upp samráðingar við ÁTS, sum áttu lægsta tilboðið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at heimila umsitingini at taka upp samráðingar og gera sáttmála við ÁTS.

**Mentamálanevndin 12. januar 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Í skrivi til mentamáladeildina dagf. 13. september 2011 vísa leiðarin á Hallarumsitingini og leiðarin á Húsaumsitingini á bráðneyðugan tørv at skifta gólvið og takið. Víst verður á, at gólvið er í sera ringum standi og krevur nógv dagligt viðlíkahald, og tí treingir tað til at skiftast. Víst verður eisini á, at tá hugsað verður um, at takið lekur, eigur takið at verða skift áðrenn gólvið, soleiðis at gólvið ikki fær vatnskaða, tá takið verður skift.
Høllin á Hálsi tørvar eina størri umvæling bæði innan og uttan. Ein heildarumvæling av høllini verður sambært HMP Consult mett at kosta millum kr. 18-20 mió. Á fíggjarætlanini konta 5775 Ítróttaranlegg eru í 2012 settar kr. 2,5 mió av til framhaldandi umvælingar, sambært fíggjarætlanartekstinum skulu m.a. gólvið og takið skiftast. Greitt er, at til ber ikki at skifta bæði gólvið og takið í einum fyri hesa upphædd, men fíggingin røkkur til at skifta gólvið.

Høllin hevur øll árini verið karmur um fleiri ítróttagreinar, samkomutiltøk, handilsmessur, dans og konsertir o.a. mangt. Krøv til gólv eru ymisk, alt eftir, hvat virksemið skal vera – eitt nú skal gólv til ítrótt vera bleytt, tó at krøvini hjá ymsu ítróttagreinunum eisini kunnu vera ymiskt. Gólv til eitt nú at bera bilar skal hinvegin vera hart.

Gamla gólvið hevur víst seg at vera sera gott og haldført. Ætlanin er, at høllin eisini framyvir skal vera karmur um fjøltáttað virksemi. Metast má tí skilagott, at nýggja gólvið verður bygt upp á sama hátt við møguligum smáum betringum. Ætlanin er ikki at broyta høllina annars.

Fyri ikki at órógva kappingarárið 2012-2013 ov nógv, er neyðugt, at arbeiðið at skifta gólvið verður byrjað og gjørt liðugt beinanvegin. Tá takið verður skift, verður neyðugt at verja gólvið væl, so at tað ongan skaða fær. Mælt verður tí til, at tøka íløgujáttanin kr. 2,5 mió verður brúkt til at skifta gólvið.

Fyri at arbeiðið skal ganga so skjótt sum møguligt, verður mælt til, at Húsaumsitingin, í samstarvi við Hallarumsitingina, standa fyri upptøku og burturbeining av gamla gólvinum, meðan arbeiðið at keypa og leggja nýggja gólvið á verður bjóðað út sum undirhondsboð til tveir arbeiðstakarar.

Mett verður tó eisini neyðugt, at gongd verður sett á heildarumvælingarnar, t.e. millum annað at skifta takið, ventilatiónsskipan, klæða allan bygningin uttan, skifta vindeygu og hurðar, dagføra atkomuna, ábøtur á brunaviðurskifti eins og el- og hvs-arbeiði og aðra fríðkan. Til hetta endamálið eigur játtan í alt umleið kr. 20 mió at verða sett av á íløguætlanini fyri árini 2013 og 2014.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 2,5 mió av íløgukontu 5775 Ítróttaranlegg til at skifta gólvið í Høllini á Hálsi. Mælt verður harumframt til, at settar verða í alt umleið kr. 20 mió av á íløguætlanirnar fyri 2013 og 2014 til at umvæla bygningin lidnan.

**Mentamálanevndin 13. juni 2012:** Nevndin samtykti at játta kr. 2,5 mió av íløgukontu 5775 Ítróttaranlegg til at skifta gólvið í Høllini á Hálsi og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein meiriluti Jógvan Arge, Maria Hammer Olsen og Elin Lindenskov mæla til at peningur verður játtaður at skifta takið v.m. í 2013.

Ein minniluti Annfinn Brekkstein og Vagnur Johannesen mæla til at fylgja tilmælinum at settar verða í alt umleið kr. 20 mió av á íløguætlanirnar fyri 2013 og 2014 til at umvæla bygningin lidnan.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og játta kr. 2,5 mió. Av konto 5775, ítróttaranlegg, til at skifta gólvið í Høllini á Hálsi.

**Býráðið 28. juni 2012**: Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Arbeiðið uppá útskifting av gólvplátum og álegging av nýggjum sportslinoleum er boðið út sum undirhondsboð av HMP- Consult, ið eru ráðgevar í málinum. Tilboðini vóru hesi, uttan mvg:

Skifta gólvplátur v.m.

- Træsmiðjan Sp/f 598.210,- kr.
- Articon P/f 537.480,- kr.

- Metingin hjá HMP-Consult 520.000 kr.

Nýtt sportlinoleum v.m.

- Gólvbúni Sp/f. 414.750,- kr.
- Eyðfinn K. Eyðunsson Fa. 388.500,- kr.

- Metingin hjá HMP-Consult 424.000,- kr.

HMP-Consult hava kannað tilboðini og mæla til at skriva arbeiðstøkusáttmála við ávikavist Articon og Eyðfinn K. Eyðunsson, sum áttu lægstu tilboðini.

Eftir samráðingar við Articon um nakrar broytingar, er semja um sáttmálaupphæddina kr. 437,000,-.

Viðv. samlaða fíggjartørvinum verður víst til j. nr. 2012-1785.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka av tilboðunum við teimum broytingum, sum avtalaðar eru, frá ávikavist Articon á kr. 437.000 og Eyðfinn K. Eyðunsson á kr. 388.500, og at heimila umsitingini at gera arbeiðstøkusáttmálar við hesar.

**Mentamálanevndin 26. juli 2012:** Ein meiriluti: Jógvan Arge, Maria H. Olsen og Elin Lindenskov taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti: Annfinn Brekkstein og Vagnur Johannesen taka støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 26. juli 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka av tilboðunum frá Articon við teimum broytingum, sum avtalaðar eru, og at umsitingin fær heimild til at taka upp samráðingar við Eyðfinn K. Eyðunsson og Gólvbúna Sp/f og gera sáttmála um eitt gólv/sportslinoleum av sama slag sum verandi gólv.

**Býráðið 26. juli 2012:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Høllin á Hálsi hevur stóran umvælingartørv. Í fjør varð gólvið skift (konta 5775, L 57003 Høllin á Hálsi). Sum tað framgongur av málslýsingini omanfyri, er bráðneyðugur tørvur á at skifta takið í høllini. Víst verður eisini á, at ein heildarumvæling av høllini er neyðug, tað er at skifta takið, nýggja ventilatiónsskipan, klæða allan bygningin uttan, skifta vindeygu og hurðar, dagføra atkomuna, ábøtur á brunaviðurskifti eins og el- og hvs-arbeiði og aðra fríðkan.

Við støði í kostnaðarmeting frá september 2011 varð mett, at til hetta endamálið eigur játtan í alt umleið kr. 20 mió at verða sett av á íløguætlanini fyri árini 2013 og 2014. Á íløguætlanini fyri 2013 eru settar kr. 10 mió, sum í høvuðsheitum røkkur til at fáa skift takið og orkusparandi ventilatiónsskipan. Harumframt er eitt avlop á kontu L57003 uppá umleið 1 mió, sum kann verða flutt til tey arbeiði, sum gerast skulu í summar.

Sum fyrireikingar av arbeiðinum skal útbjóðingartilfar gerast. Mælt verður til at bjóða byggiarbeiðið út sum innboðin lisitatión. Ætlandi skal arbeiðið fremjast í summar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at gera útbjóðingartilfar og at bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión. Harumframt verður mælt til at játta kr. 10 mió av íløgukontu 5775 fyri 2013 til arbeiðið.

**Mentamálanevndin 10. apríl 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. apríl 2013:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og játta 10 mió. kr. av íløgukonto 5775 fyri 2013 til arbeiðið og beina málið í býráðið.

**Býráðið 2. mai 2013:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
**Ráðgevarasáttmálar Ráðgevarasáttmálar**

**31-05-2013** Hevur HMP undirskriva ráðgevarasáttmála fyri bygnings- og EL arbeiðir.

**04-06-2013** hevur pb Consult undirskriva ráðgevara sáttmála fyri ventilatiónsprosjekt.

**21-06-2013** hevur verið licitatión fyri bygnings- og EL arbeiðir.

Innkomin tilboð:

| Felag: | Upphædd | Fyrivarni: |
|---|---|---|
| Articon: | Kr. 13.875.468,00 | ABF 06 |
| TG Verk | Kr. 12.873.516,98 | Tíðarætlan (Sí Skriv) |
| Búsetur | Kr. 8.635.052,01 | ABF 06 |
| Húsavarðatænastan | Kr. 9.624.351,00 | ABF 06 |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka av tilboðnum hjá Búsetur á kr 8.635.052,01.

**Mentamálanevndin 26. juni 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 26. juni 2013:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðið 26. juni 2013:** Einmælt samtykt.

**Mentamálanevndin 20. oktober 2014:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Høllin á Hálsi er bygd í 1970 , hevur verið meginhøllin í býnum í fleiri áratíggju og hýsir alskyns virksemi innan ítrótt, mentan, vinnu v.m. Tørvurin innan økið økist alsamt. og verður mett at ein útbygging av Høllini á Hálsi vil hava fleiri fyrimunir samanlagt í mun til kostnað, nyttuvirði og rakstur.

Tey arbeiði, sum hava verið gjørd við nýggjum umklæðingarrúmum og w.c. á eystursíðuni, nýggjum hallargólvi, taki og endaveggi uppi á tekjuni suðureftir umframt røð av brunaátøkum, eru øll gjørd við støði í prosjektinum hjá BBP arkitektum frá 2007.

Mett verður skilagott, at komandi um- og útbyggingar eisini taka støði í hesum. Tó kann verkætlanin tillagast soleiðis, at ætlað flyting av hallargólvi ikki verður gjørd, tí nyttan í mun til kostnað er ikki so áhugaverd. Eisini kann útbyggingin suðureftir tillagast ávísum kostnaðarkarmi, meðan útbyggingin norðureftir, sum er tann, ið skal geva fleiri hallartímar, kann vaksa fyri at fáa meira nyttu.

Við at byggja út norðureftir 23m heldur enn bert 18,5m, sum BBP-prosjektið hevur, so er rúm fyri tveimum flogbóltsvøllum, eins og hetta er hálvur hondbóltsvøllur aftrat til venjing. Hetta gevur sostatt fleiri hallartímar aftrat og atknýtt goymsluhøli.

Umframt tann ítróttaliga fyrimunin, so ger henda loysnin, at umstøðurnar verða munandi betri, tá stór tiltøk eru t.d. stevnur, konsertir og møtir. Høllin rúmar tá minst 2.500 fólkum.

Týðandi er, at byggingin órógvar virksemið í høllini sum minst. Tí er eisini fyrimunur, um útbyggingin norðureftir verður framd fyrst, og at ætlanirnar serliga á suðursíðuni verða endurskoðaðar. Prosjektering og støðutakan til útboð av norðurendanum kann verða klárt til januar 2016.

Útbyggingin hevur avleiðingar fyri parkeringsumstøðurnar á Hálsi og í Gundadali. Møguleiki er at útvega 130 nýggj parkeringspláss á lendinum framvið R.C. Effersøesgøtu. Hetta eigur at verða tikið við í hallarverkætlanina.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at fara undir sum fyrsta stig at prosjektera og fáa til vega útbjóðingartilfar av útbygging norðureftir 23m samsvarandi lýsingini omanfyri.

**Mentamálanevndin 6. oktober 2015:** Nevndin samtykti at útvega kostnaðarmeting av hesi loysnini og at arbeitt verður við at staðseta og kostnaðarmeta eina heila høll á Gundadalsleiðini.

**Ískoyti**

Umsitingin hevur verið í samskifti við Sp/f HMP Consult um eina tillagaða útgávu av BBP-verkætlanini, har tað tó verður hildið fast við verandi byggistíl o.a.

Til ber at realisera eina verkætlan við útbygging norðureftir við einum hálvum vølli, gera vestursíðuna uttan lidna, umframt útbygging suðureftir til judo, borðtennis, móttøkuøkið o.a. fyri 34,9 mio.kr. uttan MVG á 6,25%.

Mett byggitíð er eitt gott ár. Útboð uppá norður og vestursíðuna kann verða um ársskiftið og uppá suðursíðuna í mars. Neyðugt er við smærri tillagingunum í projekteringini av suður-verkætlanini. Til ber eisini at gera parkeringøki við 130 plássum í lendinum millum høllina og R.C. Effersøesgøtu fyri 4,15 mio.kr. umframt kommununar MVG á 6,25%.

Henda útbygging av Høllini á Hálsi og útbyggingin av høllini í Skúlanum á Argjahamri økir um tímatalið, sum til ber at brúka hallirnar til venjing. Sum støðan er í dag, eru 97 tímar at býta til flogbólt og hondbólt. Við at útbyggja á Argjum og á Hálsi verða 166 tímar tilsamans til hondbólt, flogbólt og kurvabólt.

Í Høllini á Hálsi koma í dag lið inn einaferð um tíman. Tá útbygt er, koma lið inn hvønn hálva tíma, tí tey hita upp á hálva vøllinum (útbygdi vøllurin) og fara síðan inn á heila vøllin (verandi vøllur), og tá kann næsta lið koma inn á hálva vøllin til upphiting og venjing. Mett verður, at hetta gevur uml 70% fleiri venjingartíðir, tí skipanin kann ikki nýtast til fulnar til liðini í fremstu deildunum, tí tey vanliga venja 1,5 tíma. Talan er sostatt um munandi meira fleksibla skipan.

Ein annar vinningur er, at tíðin millum dystir gerst styttri, tí størri parturin av upphitingini kann fara fram á hálva vøllinum.

Høllin á Hálsi er eitt slag av tjóðarítróttahøll og fer útbyggingin at styrkja um tann leiklutin innan ítróttin, umframt tað ymiska fjølbroytta mentanar- og handilsvirksemi sum annars er í høllini av og á. Haraftrat er Høllin á Hálsi valstað í býnum o.s.fr.

**Viðv. kostnaðarmeting og staðseting av heilari høll á Gundadalsleiðini**
Ein møguleiki er at byggja eina nýggja høll í økinum suður úr Tórsbreyt. Talan er um matr. 1393a ogn hjá P/F Eik Banka. Ein fult útbygd nýmótans høll ella hallardepil har fer at kosta væl meir enn avsetti kostnaðarkarmurin fyri bygging av ítróttahøllum, ið er tøkur, og sum ætlanin er at játta í 2016. Eisini má væntast, at henda ætlan ber ikki til at realiserað innan stutta tíð.

Hartil skal havast í huga, at í byggiverkætlanini fyri Skúlan á Fløtum er ein ítróttahøll við 400 áskoðaraplásum, sum partur av byggistigi 2, ið verður liðugt á sumri 2019. Haraftrat verður ein ítróttahøll í Marknagilsdeplinum, og er ætlanin at gera avtalu við depilin um at umsita part av hallartíðunum, tá depilin ætlandi er liðugur miðskeiðis í 2017.

Talva við tímum í høllunum er viðfest.
Kostnaðarmeting fyri útbygging av Høllini á Hálsi er viðfest.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla til at
- at heimila umsitingini at fara undir útboð av verkætlanini í sonevndum øvugtum útboði í eini heildararbeiðstøku innan fyri karmin á 34,9 mio.kr.,
- at heimila umsitingini at fara undir útboð av parkingsverkætlanini í einum útboði í heildararbeiðstøku innanfyri karmin á 4,15 mio.kr.

og at arbeiðið verður fíggjað av karminum til ítróttahallarbygging løgukonta 5775 ítróttaranlegg.

**Mentamálanevndin 09. november 2015:** Útsett til komandi fund.

**Fíggjarnevndin 11. november 2015:** Útsett.

**Ískoyti**

**Útbygging norðureftir av høll í fullari longd, kostnaðarmeting o.a.**
Umsitingin hevur samskift við Sp/f HMP Consult um eina tillagaða útgávu av BBP-verkætlanini í norðurendanum til fevna um eina høll í fullari longd (hondbóltsvøllur), har tað tó verður hildið fast við verandi byggistíl o.a. so vítt til ber, umframt aðrar betranir.

Til ber at realisera eina verkætlan við útbygging norðureftir við einum fullum vølli, gera vestursíðuna uttan lidna (og teimum umvælingum innandura, sum standast av hesum), men ikki útbygging suðureftir til judo, borðtennis, móttøkuøkið o.a. fyri kr. 28,5 mió í handverkaraútreiðslum (HVÚ) u/mvg. Tá er eisini roknað 130 parkeringsplássum í lendinum millum høllina og R.C. Effersøes gøtu. Mett byggitíð er 18 mánaðir. Útboð uppá verkætlanina kann verða í apríl 2016, eftir at neyðug projektering er gjørd. Neyðugt er við ávísum tillagingum í áður gjørdari projektering av norðurverkætlanini.

Kostnaðarmeting og nærri greiningar fyri útbygging av Høllini á Hálsi eru viðfestar, umframt strikutekningar og visualiseringar (visualiseringar verða tøkar mikudagin).

**Nýtsluendamál og hallartímar**
Henda útbygging av Høllini á Hálsi, og útbyggingin av høllini í Skúlanum á Argjahamri økir munandi um tímatalið, sum til ber at brúka hallirnar til venjing. Sum støðan er í dag, eru 97 tímar at býta til flogbólt og hondbólt. Við at útbyggja á Argjum og á Hálsi verða 176 tímar tilsamans til hondbólt, flogbólt og kurvabólt. Verður bygt út við hálvari høll á Hálsi verða tímarnir til hondbólt, flogbólt og kurvabólt 166 tilsamans.

Tað vil siga at tey stóru feløgini(H71, Neistin, Kyndil og Fleyr) kunnu í grundreglum hava hvør sína høll og ÍA og kurvabólt feløgini kunnu deilast um eina høll.

Við heilum vølli afturat á Hálsi kunnu dystir eisini spælast har eins og á Argjahamri.

Um bygt verður sum víst er á tekningunum, verður stórt øki á eystursíðuni, sum kann brúkast til upphiting  bæði til dystir og venjing, sum í dag fer fram í geingjunum, sum er óheppið. Eisini kunnu høllini á eystursíðuni brúkast t.d. til borðtennis o.a. umframt betri goymslumøguleikar.

Tá tiltøk verða í høllini so sum stevnur, møtir, jólasøla og onnur tiltøk sum bert skulu brúka eina høll kann venjast í hinari høllini meðan gjørt verður klárt til tiltøkini, tað vil siga at munandi minni avlýsingar verða hjá feløgunum.

Høllin á Hálsi er eitt slag av tjóðarítróttahøll, og fer útbyggingin at styrkja tann leiklutin. Haraftrat er Høllin á Hálsi valstað í býnum. Høllin kemur at hava pláss fyri umleið 1800 áskoðarum á verandi áskoðaraplássum, umframt tveimum áskoðarapallum, sum kunnu

flytast. Hetta fer m.a. geva ítróttafeløgunum møguleika fyri at fáa væl størri inntøkur í sambandi við t.d. finalur í hondbólti og altjóða dystir.

**Judofelagið og borðtennisfelagið**
Judofelagið í Tórshavn hevur 26 íðkandi limir sbrt. yvirlitinum hjá ÍSF frá juni 2015, og í øllum landinum eru 66 íðkandi. Judofelagið venur og hevur kappingar í fimleikahøllini í Eysturskúlanum. Felagið hevur í løtuni 12 tímar um vikuna.
Eitt av teimum feløgunum, ið hevur ynski um betri og støðugari hølisviðurskifti, er Borðtennisfelagið Tór (t.e. borðtennisfelagið í Tórshavnar kommunu). Felagið hevur í løtuni 30 íðkandi sbrt. frágreiðingini hjá ÍSF frá juni 2015, og í øllum landinum eru 68 íðkandi.

Borðtennisfelagið hevur í dag venjingar í høllini í Skúlanum við Løgmannabreyt og í Eysturskúlanum. Borðtennisfelagið Tór hevur 12 hallartímar um vikuna. Felagið hevur stórt ynski um at fáa betri egnað høli til venjing, og at venjingin er á einum stað. Í øðrum tilmæli sæst at tilmælt verður at venjingar teirra verða staðsettar á Látrinum á Argjahamri.

Judofelagið og borðtennisfelagið hava hvør umleið 7 kappingar um árið í Havn. Ein umrøddur møguleiki fyri at skapa hesum ítróttagreinum betri umstøður er at útbygda høllin á Hálsi ognar sær máttur til judo og eini 8 borðtennisborð soleiðis at kappingar framyvir verða í høllini á Hálsi og at Ítróttaanlegg tryggjar at alt er klárt til hesar kappingar í góðum kørmum, meðan judo framyvir venjur í høllini á Argjahamri ella heldur fram í Eysturskúlanum og borðtennisfelagið á Látrinum á Argjahamri.

**Býarskipanar- og myndugleikaviðurskifti**
Høllin á Hálsi er  fevnd av øki D2 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu seinast broytt 31. oktober 2013. Innan karmar av byggisamtyktini eru rúmir møguleikar fyri bygging í økinum. Í økinum eru ikki nøktandi parkingsviðurskifti og er tí neyðugt innan 2017 at fáa gjørt fleiri parkeringspláss.

**Samlaði kapasiteturin innan ítróttaranlegg og fleirnýtsluendamál**
Hallarkapasiturin í Tórshavnar kommunu er sum heild tepur, og greitt er, at við stóru menningini innan ymiskar ítróttagreinar er tørvur á útbygging av kapasitetinum, og tørvur er á fleiri hallartímum.
Verandi nýtslustig er høgt, samstundis eru Ítróttaranlegg í holt við at fara ígjøgnum og eftirmeta skipanina við atliti at tryggja sær, at optimal nýtsla er av tøka tilfeinginum, t.d. at í fleiri førum er ein heil høll avsett, men bert hálv høll verður brúkt; at tað kemur meir enn so fyri, at ikki verður boðað frá, tá ein høll ikki verður brúkt.

Samanlagt ræður Ítróttaranlegg yvir 16 hallum í kommununi antin alt døgnið ella eftir kl. 16 og í vikuskiftum. Talan er umleið 12.000 $m^2$. av hallum, skiftingarrúmum vm.

Um nevnda útbygging verður framd,  verður *økt munandi* um tøku tíðirnar í skipanini til hondbólt, flogbólt, kurvabólt o.a.

**Rakstrarviðurskifti**
Øktir fermetrar í høllini fara at økja rakstrarútreiðslurnar hjá Ítróttaranleggum, men inntøkurnar av hallarleigu skuldu viga upp ímóti øktu útreiðslunum.

Samanumtikið verður mett, at nevnda íløga hevur høgt nyttuvirði og rímiligan kostnað í mun økta kapasitetin og gagnar ítróttinum, frítíðarendamálum og øðrum virksemi, sum er í høllini.

Skjøl eru viðfest.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla til at

- at heimila umsitingini at fara undir útboð av útbygging av høllini og parkeringsøki í sonevndum øvugtum útboði í eini heildararbeiðstøku innan fyri karmin á kr. 28,5 mió HVÚ u/mvg
  og at arbeiðið verður fíggjað av karminum til ítróttahallarbygging løgukonta 5775 ítróttaranlegg.

**Mentamálanevndin 25. november 2015:** Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um figgjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 02. december 2015:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini við tí ískoyti, at verkætlanin verður víðkað til eisini at umfata hølir til judo og borðtennis, og at beina málið í býráðið.

**Ískoyti**
Sum uppfylging uppá viðgerðina í fíggjarnevndini 2. desember 2015 hevur umsitingin fyrireikað ískoytisverkætlan viðv. hølum serliga ætlað til judo og borðtennis, umframt ta útbygging, ið longu er viðgjørd og samtykt í nevndini.

Mett verður sannlíkt, at til ber at gera ein kjallara á uml. 400 m2 undir norðurskjøldrinum í útbygdu dupulthøllini fyri umleið 6,4 mio.kr. Kjallarin kann hýsa judo og borðtennis. Harumframt kann verða talan um onnur endamál, alt eftir nær og hvussu nógv hølini verða brúkt til høvuðsendamálini. Málið er, at judomáttur til ein vøll liggja frammi, uttan so at onkur heilt serligt orsøk ger seg galdandi. Á henda hátt fær judo fastar karmar kring virksemið. Viðv. borðtennis verður møguleiki fyri, at fleiri borð kunnu standa fast frammi, og fær borðtennis soleiðis støðugar og framúr karmar. Ætlandi skal virksemið hjá hesum ítróttagreinunum kunna samvirka í ávísan mun. Sp/f HMP hevur projekterað verkætlanina á Hálsi higartil.

Nærri tekningar og útgreinað kostnaðmeting verður tøk mánadagin.

**Tilmæli**
Tekniski stjórin, trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at heimila umsitingini at fara undir samráðingar við Sp/f HMP Consult við atliti til at liðugprojektera hallarútbyggingina, sum áður samtykt 25. november 2015, umframt við hesum ískoyti viðv. útbygging í kjallaranum og venda aftur til mentamálanevndina og fíggjarnevndina við einum samráðingarúrsliti primo januar 2016.

**Mentamálanevndin 07. december 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 09. december 2015:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 10. desember 2015:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur verið í samráðingum við Sp/f HMP-consult og er nú sáttmáli klárur um projektering. Sí hjálagt sáttmálauppskot, ið lýsir viðurskiftini nærri.

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin, trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at staðfesta sáttmálauppskotið og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 13. januar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. januar 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. januar 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Ráðgevin Sp/f HMP Consult hevur gjørt klárt projektuppskot til byggiverkætlanina íroknað anleggsarbeiði viðv. parkeringsøkinum. Verkætlanarbólkur fyri útbygging av høllini á Hálsi hevur verið við í tilgongdini og mælir til at góðkenna hjálagda projektuppskot. Sí hjáløgdu skjøl.

Í mun til áður gjørdar metingar er talan um ávísan mun á metta kostnaðinum, men verður mett at talan er um innanfyri ta óvissu, ið vil verða í sambandi við slíkar metingar og sum endaligu arbeiðstøkurnar vilja staðfesta nærri. Fyri at koma til nevndu kostnaðarmeting eru gjørdar ein røð av tillagingum, ið tó ikki broyta grundleggjandi uppá verkætlanina.

Við støði í projektuppskotinum fer ráðgevin beinanvegin undir at detailprojektera verkætlanina. Ætlandi verður detailprojekteringin fyri jørðarbeiðið klár um stutta tíð, soleiðis at jørðarbeiðið longu verður klárt at bjóða út innan 2-3 vikur. Ætlanin er at tilboð uppá jørðarbeiðið eru innkomin og klár til nevndarviðgerð 6. apríl 2016.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja hjálagda projektuppskot.

**Mentamálanevndin 02. marts 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Útbyggingin av høllini á Hálsi og nýtt parkeringsøki móti R.C. Effersøesgøtu, er sum áður ætlað at bjóðað út í tveimum. Fyrst jørðarbeiði íroknað parkeringsøki og síðani bygningsarbeiði. Bygningsarbeiðið verður væntandi bjóðaði út um mánaðarskifti maj/juni.

Útboð hevur verið av jørðarbeiðinum í sambandi við verkætlanina. Týsdagin tann 5. apríl kl. 11:00 var lisitatión hildin. Fýra arbeiðstakarar vóru bidnir um at bjóða, og allir lótu tilboð inn.

Tilboðini vóru soljóðandi:

| | |
|---|---|
| P/F Articon | kr. 10.648.010,00 |
| P/F J&K Contractors | kr. 9.067.613,00 |
| Sp/f Plan | kr. 10.167.628,70 |
| Sp/f TG Verk | kr. 11.248.229,00 |
| | |
| Metingin segði | kr. 7.950.000,00 |

Ikki íroknað MVG.

Við í arbeiðinum varð bjóðað út gravir vm. til fjarhitaleiðing. Ynski um fjarhita er komið inn seinni í verkætlanina, sum ein meirkostnaður.

Parturin í innkomna tilboðnum til jørðarbeiði, sum knýtir seg til fjarhitaskipan, er kr. 391.012,00.

Hvussu stórur partur fjarhitakostnaðinum verkætlanin skal rinda og hvussu stórur partur Fjarhitafelagið skal rinda, er ikki avgreitt enn, men er til samráðingar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla til at farast kann undir samráðingar um sáttmála um jørðaarbeiðið til útbygging av høllini á Hálsi og tilhoyrandi parkeringsøki við lægsta tilboðsveitara, ið er P/F J&K Petersen Contractors, og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 06. april 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Helena Dam á Neystabø var ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Ískoyti:**
Víst verður til tilmælið og samtyktina omanfyri. Av misgáum er ikki biðið um heimild at gera sáttmála, tá samráðing er liðug at leggja fyri fíggjarnevninda. Sáttmáli væntast klárur til fíggjarnevndarfundin, og tí verður biðið um heimild til eisini at gera sáttmála.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og tekniski stjórin mæla til at, at farast kann undir samráðingar og at gera sáttmála um jørarbeiðið við lægsta tilboðsveitara at leggja fyri fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 13. april 2016:** Samtykt at gera sáttmála við P/f J&K Contractors og at játta kr. 9.101.547 umframt mvg. av framfluttum løgukarmi, 5775, til L 57003, høllin á Hálsi, og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 19. apríl 2016: Einmælt samtykt.**
**Ískoyti**
Á karminum fyri 2016 eru játtaðar 20. mio.kr. á stovnsnr. 5775 – Ítróttaanlegg (íløgur). Projekteringin av útbyggingini av Høllini á Hálsi er nærum liðug og verður byggiarbeiðið boðið út í innbodnari lisitatión (3 fak) í næstum, umframt at jørðarbeiðið og gerð av parkeringsplássi við Skipara Hansens stein longu er í gongd.
**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla fíggjarnevndini til at játta 20. mio.kr. á projektkonto L57003, umframt at flyta játtanina á projektkonto L57021 – Ítróttahøll í Gundadali - 1,686 mio.kr. og á projektkonto L57023 – Judo og borðtennishøll – 2,0 mio.kr til projektkonto L57003 – Høllin á Hálsi.

**Fíggjarnevndin 08. juni 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**

30. juni 2016 var innboðin licitatión fyri 3 arbeiðstøkur í byggiverkætlanini. Arbeiðstøkurnar vóru bygningsarbeiði, El og HVS.

Tilboðini vóru soljóðandi: (allar upphæddir uttan MVG, um ikki annað er viðmerkt!).

**Bygningsarbeiði**

| | |
|---|---|
| P/F Articon | kr. 29.685.153.00 |
| P/F Búsetur | kr. 29.445.269,00 |
| Sp/f Húsavarðatænastan | kr. 31.058.428,59 |
| P/F J&K Petersen Contractors | kr. 40.754.640,00 |
| Sp/f TG Verk | kr. 35.606.786,00 |

1 innboðið felag lat ikki inn tilboð og eitt lat inn tilboð saman við øðrum felag.

**El**

| | |
|---|---|
| Sp/f El.FO | kr. 1.683.822,00 |
| Sp/f El-net | kr. 1.973.370,82 |
| Sp/f Install | kr. 1.356.941,04 |
| P/F Leif Mohr | kr. 1.687.836,83 |

**HVS**

| | |
|---|---|
| P/F Demich | kr. 5.429.525,00 |
| P/F Maria Poulsen | kr. 4.160.383,00 |

Áður er jørð- og spreingiarbeiðið boðið út og sáttmáli gjørdur fyri hesa arbeiðstøku á kr. 9.101.547,00

Samanlagt gevur hetta ein kostnað á kr. 44.064.140,00 í hondverkaraútreiðslum (HVÚ).

Meting fyri hesar arbeiðstøkur var áður samanlagt kr. 38.355.000,00, tó uttan útreiðslur til fjarhita.

Sum liður í samtyktu átøkunum í vár fyri virkseminum hjá P/F Fjarhitafelagnum, er ætlanin at fáa fjarhita til høllina og ítróttaøkið í Gunddali. Hetta vil uppá sikt geva bæði umhvørvisligar og fíggjarligar fyrimunir.

Útreiðslur til fjarhitaskipanina eru í verandi støðu kr. 635.000,00. Tá rindar P/F Fjarhitafelagið kr. 50.000,00 sum part av kostnaðinum fyri grøvina til fjarhitarør á hallarøkinum.

**Samráðingar og tillagingar í verkætlanini**
Umsitingin hevur saman við ráðgevum mett um innkomu tilboðini og metti at ávísar tillagingar kundu gerast í verkætlanini og samstundis hava eina nøktandi verkætlan.

Umsitingin hevur síðani verið í samráðingum við lægstu arbeiðstakararnar og eru komin ásamt um eina røð av tillagingum í verkætlanini innan byggiplássið, betong-, element-, timbur-, múrara- og málara-, HVS-arbeiði, umframt tillagingar í ígongdverandi jørð- og lendisarbeiði. Í alt er talan um sparingar á kr. 4.246.254,83.

Arbeiðstøkan hjá P/F Búsetur er nú kr. 26.272.094,17. Arbeiðstøkan hjá P/F Maria Poulsen er nú kr. 3.546.798,00 og el-arbeiðstøkan hjá Sp/f Install óbroytt.

Samanlagt kostar verkætlanin nú kr. 52.101.656,00. Tá íroknað allar arbeiðstøkur, innanhýsis umsiting, fyrireiking, ráðgeving, eftirlit, byggileiðslu, trygging, MVG, fjarhitaskipan, umframt pulju til ókent og møguligan lønar- og prísvøkstur, umframt eykaútreiðslur í sambandi við herd krøv og kostnað til trygging, serliga í sambandi við spreingiarbeiðið. Tá er eisini tikið við at jørðarbeiðstøkan, íroknað parkeringsøkið við Skipara Hansens Stein, sum gjørdist umleið 1 mio.kr. hægri enn upprunaliga mett.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararktitekturin og mentamálaleiðarin mæla til at heimila umsitingini til at gera sáttmálar við P/F Búsetur um bygningsarbeiðstøkuna sum tillagað og P/F Maria Poulsen um HVS-arbeiðstøkuna sum tillagað og Sp/f Install um el-arbeiðstøkuna og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina. Útreiðslurnar í 2016 vera at rinda av projektkonto L57003. Restupphæddin á upp til 17,5 mio.kr er at játta til verkætlanina í 2017.

**Mentamálanevndin 20. juli 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 26. juli 2016:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðsfundur 26. juli 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Verkætlanin gongur sína gongd, og tørvur er á at fáa játtað samtykta peningin til verkætlanina á løgukarminum konta 5775 til verkætlanina á projektkontu L57003.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at játta 17.500 tkr. av løgukarminum konta 5775 til projektkontu L57003. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 26. juli 2017:**
Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 26. juli 2017:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 26. juli 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Sambært játtanarreglunum skulu lidnar verkætlanir eftirmetast í avvarðandi nevnd og leggjast fyri fíggjarnevndina og býráðið til kunningar. Verkætlanin verður samstundis lokað, og møguligt avlop fellur aftur til íløgukarmin ella skal fíggjast av honum.

Nú verkætlanin, "Høllin á Hálsi" L57003 skal lokast, er sambært leiðslukunningini staðfest eitt hall á kr. 636.997.

Verkætlanarbólkurin fyri útbygging av Høllini á Hálsi hevur eftirmett verkætlanina. Mett verður at arbeiðið sum heild gekk væl. Ymsar avbjóðingar vóru eitt nú at byggiskráin fyri verkætlanina kundi verið nakað neyvari og havt betri stundir til gransking av verkætlanini. Projekteringin gekk eisini til tíðir ov seint. Byggingin helt nærum tíðarætlanina og er sum heild vælútinnt. Harumframt gekk lutfalsliga væl at hava virksemi í Høllini á Hálsi samstundis sum útbygging fór fram og herundir serliga tað stóru avbjóðing sum var móti endanum av byggitíðarskeiðinum samstundis at fremja at gera nýggj áskoðarapláss og eina røð av øðrum ábótum í gomlu høllini (høll 1).

Ymsar sparingar vóru gjørdar, ið mugu takast upp eftirfylgjandi t.e. innrætting av WC/brús í kjallaranum, umframt møgulig eyka skiftirúm í nýggjum høll 2 (á eystursíðuni).

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, deildarleiðarin á verkætlanardeildini og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at loka verkætlan L57003 og fíggja meirnýtsluna av løgukarminum 5775. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 28. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 05. desember 2018:** Kunnað varð um málið, ið varð beint í býráðið til kunningar við teirri viðmerking, at talan er um eitt hall áljóðandi kr. 570.000.

Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 13. desember 2018:** Kunnað varð um málið.

# 336/18 Kunning / fráboðanir í 2018 til býráðið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 29.11.2018 | 287/18 | 18/04158-1 |
| 2 Býráðsfundur | 13.12.2018 | 336/18 | 18/04158-1 |

Kunning/fráboðanir til býráðið 29.11.18:

- Umsókn um keyp av øki burtur av matr. nr. 139b, Hoyvík til bygging av einum Biogassanleggi.

-Langtíðar íløguætlan.

**Býráðsfundur 29. november 2018:** Tikið av skrá.

Kunning/fráboðanir til býráðið 13.12.18:

- Umsókn um keyp av øki burtur av matr. nr. 139b, Hoyvík til bygging av einum Biogassanleggi.

**Býráðsfundur 13. desember 2018:** Kunnað varð um málið.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>13. desember 2018 | Blað nr.: 1300 |
| | | Formansins merki: |

# 337/18 Litir í Leiki í Skúlanum við Løgmannabreyt, blásiljóðføri

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 10.12.2018 | 377/18 | 18/04175-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 13.12.2018 | 377/18 | 18/04175-1 |
| 3 Býráðsfundur | 13.12.2018 | 337/18 | 18/04175-1 |

**Upprunin til málið:**
Uppskot frá Musikkskúlanum at seta á stovna eitt Litir í Leiki tilboð aftrat.

**Lýsing av málinum**
Litir í Leiki byrjaði í Kommunuskúlanum í 2008 og helt fram í Skúlanum á Fløtum. Litir í Leiki er eitt tónleikatilboð til næmingar í 1.-3. flokki, ið er skipað í samstarvi millum skúlan og Musikkskúlan. Næmingarnir í tilboðnum fylgja vanligu undirvísingini og fáa so undirvísing í tónleiki aftrat. Tað eru musikkskúalærarar, ið hava tónleikaundirvísingina. Samstarvsavtala er millum Tórshavnar Musikkskúla og Skúlan á Fløtum um Litir í Leiki.

Endamálið við tilboðnum er at bjóða eitt skúlatilboð, har ljóðføris- og tónleikaundirvísing eru sameind við vanligu undirvísingina í skúlanum og dagligur partur av skúladegnum fyrstu skúlaárini.

Uppskot er nú at fara undir eitt Litir í Leiki tilboð aftrat, sum verður skipað í samstarvi millum Tórshavnar Musikkiskúla og Skúlan við Løgmannabreyt. Ætlanin er at byrja við fyrsta flokki sum eina royndarskipan, og gongur eftir ætlan, so heldur skipanin fram, og tá trý ár eru farin eru so næmingar í 1., 2. og 3. flokki í Skúlanum við Løgmannabreyt í tilboðnum.

Tað kunnu vera 50 næmingar í 1.-3.flokki í Litum í Leiki. Í sambandi við innskriving í fyrsta flokk kunnu foreldur, sum skrivað børn inn í Skúlan við Løgmannabreyt, velja Litir í Leiki. Ein upptøkunevnd mannað við umboðum fyri Tórshavnar Musikkskúla og Skúlan við Løgmannabreyt avger, um næmingur verður upptikin, og hvat ljóðføri talan verður um. Ljóðførini eru blásiljóðføri, og tey eru í høvuðsheitum floyta, klarinett, saxofon og messingljóðføri.

Undirvísingin fylgir skúlaárinum. Einstaklinga undirvísing er einaferð um vikuna, bólkaspæl einaferð um vikuna, hoyrilæra/sangur/teori einaferð um vikuna og orkesturspæl fýra ferðir um árið.

Tímarnir til Litir í Leiki í Skúlanum á Fløtum eru játtaðir á 5110 Tórshavnar Musikkskúli. Sama skipan verður galdandi fyri Skúlan við Løgmannabreyt.

Luttøkugjaldið fyri Litir í Leiki er 5000 kr. um árið. Musikkskúlin sendir rokning fyri foreldragjaldið, sum verður goldið í tveimum, tvs. 2.500 kr. hvørja ferð. Henda upphædd, umframt játtan, sum er sett av til Litir í Leiki í játtanini hjá Musikkskúlanum, eru til lønir til teir lærarar, sum Musikkskúlin letur til Litir í Leiki

Um játtað verður at seta á stovn Litir í Leiki í Skúlanum við Løgmannabreyt, er ikki neyðugt at játta fleiri tímar til skúlaárið 2019/2020. Sostatt ber til, at gera eina avtalu millum skúlan og musikkskúlan, sum verður galdandi í eitt ár og síðani taka støðu til, um tilboðið skal halda fram.

Um næmingar, sum hava gingið í Litum í Leiki í 1., 2. og 3. flokki ynskja at halda fram at spæla sama ljóðføri, tá teir fara í 4. fl., verða teir fluttir í Tórshavnar Musikkskúla. Hesir fáa undirvísing eftir ásettum reglum og mannagongdum í Tórshavnar Musikkskúla.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
ongar

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Litir í Leiki mál nr. 15/00121

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Einki at viðmerkja

**Umhvørvisárin**
Einki at viðmerkja

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
ongar

**Skjøl**
Hjálagt er uppskot til samstarvsavtalu millum Tórshavnar Musikkskúla og Skúlan á Fløtum

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at góðtaka hjáløgdu avtalu, og at næmingar, sum verða skrivaðir inn í fyrsta flokk í Skúlan við Løgmannabreyt skúlaárið 2019/2020, kunnu velja Litir í leiki.

**Mentamálanevndin 10. desember 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 13. desember 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 13. desember 2018:** Einmælt samtykt.

**FUNDURIN LOKIN KL. 20.30**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Annika Jacobina Olsen | Helena á Dam Neystabø | Tróndur Sigurðsson |
| Halla Samuelsen | Bogi Andreasen | Annfinn Brekkstein |
| Jákup Dam | Marin Katrina Ragnarsdóttir Frýdal | Bjørghild Djurhuus |
| Gunvør Balle | Turið Horn | Bergun Kass |
| | Bjørg Dam | |